

# NÝKOMIN TIL FØROYA

HENTAR UPPLÝSINGAR FRÁ STOVNUM OG TÆNASTUVEITARUM

ÚTLENDINGASTOVAN
IMMIGRATION OFFICE

## *NÝKOMIN TIL FØROYA*

**Sniðgeving:** EGAARD v/ Tróndur Ellingsgaard
**Prent:** Føroyaprent
**Tekningar:** Janus D. Guttesen
**Útgáva:** 2017
**Heimasíða:** www.immigration.fo
**Týðing:** Sprotin
**ISBN:** 978-99918-877-5-3
**Myndir:** Johannes Jansson/www.norden.org (s.11), Kommunufelagið (s.17), Magnus Fröderberg/www.norden.org (s.28), Yadid Levy/www.norden.org (s.25), Landsverk.fo (s.41, 61), Visit Tórshavn (s.49, 54, 73), Barnaverndin (s.57), Ólavur Frederiksen (s.75), Mauritia Kirchner (s.82), Landssjúkrahúsð (s. 41), ikonir frá www.flaticon.com.

## ÚTLENDINGASTOVAN VIL FEGIN TAKKA

- Arbeiðseftirlitinum
- TAKS
- Landsverki
- Gjaldstovuni
- Arbeiðsloysisskipanini
- Almannamálaráðnum
- Almannaverkinum
- Gigni
- Heilsutrygd
- Mentamálaráðnum
- Kvøldskúlunum
- Námi
- Barnaverndarstovu Føroya
- Kvinnuhúsinum
- Javnstøðunevndini
- Løgregluni
- Akstovuni
- Landssjúkrahúsinum
- Visit Tórshavn
- Ríkisumboðnum
- Uttanríkis- og vinnumálaráðnum
- Kommunufelagnum
- Fróðskaparsetrinum, Granskingarráðnum og EURAXESS Føroyar

Fyri kunning um viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum vilja vit fegin takka Samtaki, Føroya Arbeiðarafelag, Fiskimannafelagnum, Arbeiðsgevarafelagnum, Lærarafelagnum, Fíggjarmálaráðnum og Vinnuhúsinum.

# Vælkomin til Føroya!

**Henda bókaútgáva er løgd til rættis í samstarvi við almennar stovnar og tænastuveitarar í Føroyum. Hon er serliga ætlað fólki, ið nýliga eru flutt til Føroya og hava í hyggju at búgva her í longri tíð. *Nýkomin til Føroya* kunnar í høvuðsheitum um føroyska samfelagið, almennar stovnar, rættindi og skyldur og annað hent, sum tær kanska tørvar fyri at seta teg inn í gerandislívið her á landi.**

Tilfarið er býtt í sjey partar, ið snúgva seg um hesi evnini:

- At flyta til Føroya
- At læra føroyskt og um føroysku mentanina
- Arbeiði
- Heilsa
- Børn, skúli og útbúgving
- Ferðafólkaflutningur og aðrar tænastur
- Frítíð

Í hvørjum einstøkum parti verður grundleggjandi kunning um hvørt evnið lýst. Um lesarin vil hava enn neyvari kunning um okkurt av hesum evnum, eru tilvísingar til viðkomandi stovn settar inn í ymisku brotini, við upplýsingum um telefonnummar og heimasíðu.
Tú kanst brúka innihaldsyvirlitið til at finna ávís evni, ella sláa upp lyklaorð í orðalistanum, aftast í bóklinginum. Aftarlaga finnur lesarin eisini kunning um almennar stovnar, um tulking og yvirlit yvir fakfeløg og arbeiðsgevarafeløg.

Bókin er ætlað at geva tær dagførda kunning. Tó, so kunnu viðurskifti broytast, og tað er tín egna ábyrgd at eftirkanna upplýsingar, eitt nú við at seta teg í samband við viðkomandi stovn. Innihaldið í hesari bók er einans ætlað at vera vegleiðandi, og er tað ikki lógliga bindandi undir nøkrum umstøðum.

Útlendingastovan hevur ábyrgdina av ritstjórn og at fáa hesa bók út ímillum fólk.

Hevur tú viðmerkingar ella uppskot til broytingar, vinaliga send teldupost til info@utlendingastovan.fo.

# Innihaldsyvirlit

## AT FLYTA TIL FØROYA

**Hesin parturin fevnir um uppihaldsloyvi í Føroyum, um at skráseta seg í kommununi, umframt upplýsingar um, hvussu tú ført ognarlutir tínar til landið, um bústaðarmøguleikar og kommunalar tænastur.**


Familjusameining . . . . . . . . . . 12
Arbeiðsloyvi . . . . . . . . . . 12
ÚTLENDINGAMYNDUGLEIKARNIR Í DANMARK OG FØROYUM . . . . . . . . . . 13
Leingjan . . . . . . . . . . 14
Kann eg fáa familjulimir við mær til Føroya? . . . . 14
Hvussu skráseti eg meg? . . . . . . . . . . 14
Kann eg taka persónligar ognarlutir við mær til Føroyar? . . . . . . . . . . 14
Bústaðarviðurskifti . . . . . . . . . . 15
Kommunalar tænastur . . . . . . . . . . 16
YVIRLIT: KOMMUNURNAR . . . . . . . . . . 17


## FRÁLÆRA Í FØROYSKUM MÁLI OG MENTAN

**Hesin parturin kunnar um føroysk málskeið, sum kvøldskúlarnir bjóða, hvørjum undirvíst verður í, hvar og hvussu tú skalt melda teg til, og eisini verður kunnað um tey rættindi, tú hevur til tulk, tá ið tú vendir tær til føroyskar myndugleikar.**


Kvøldskúlar . . . . . . . . . . 20
Skeiðsinnihald . . . . . . . . . . 20
YVIRLIT . . . . . . . . . . 21
Hvussu søkir tú? . . . . . . . . . . 22
Er tað ókeypis? . . . . . . . . . . 22
Aðrir møguleikar at læra mál . . . . . . . . . . 22
Tulking . . . . . . . . . . 23


## ARBEIÐI

**Hesin parturin kunnar um rættindi og skyldur sum arbeiðstakari í Føroyum. Her ført tú almenna kunning um arbeiðsmarknaðin, hvat ið tín arbeiðssáttmáli eigur at fevna um, hvussu skattur verður goldin og onnur evni, sum hava við arbeiði at gera.**


Almenn kunning um arbeiðsmarknaðin . . . . . . . . 26
Fakfeløg . . . . . . . . . . 26
Tíni arbeiðsrættindi . . . . . . . . . . 27
At verða sagdur úr starvi . . . . . . . . . . 30
Rættindi og trygd til arbeiðis . . . . . . . . . . 32
Skattur . . . . . . . . . . 33
Sjálvuppgáva og framskundað skattauppgerð . . . 34
Pensjónsskipanir í samband við arbeiði . . . . . . . 35
Pensjónir . . . . . . . . . . 36
Fólkapensjón . . . . . . . . . . 36
Fyritíðarpensjón . . . . . . . . . . 36
At finna arbeiði . . . . . . . . . . 37
Arbeiðsloysisskipanin . . . . . . . . . . 37
Góðkenning av útbúgving . . . . . . . . . . 38
At fara undir egið virki . . . . . . . . . . 39


## HEILSA

**Hesin parturin kunnar teg um heilsuverkið í Føroyum, hvussu almennar heilsutænastur eru skipaðar, um Heilsutrygd, og hvat tú ger fyri at sjúkramelda teg um tørvur er á tí.**


Heilsutrygd . . . . . . . . . . 42
Kommunulæknin . . . . . . . . . . 42
Hvussu setir tú teg í samband við lækna . . . . . . 42
Heilivágur og apotek . . . . . . . . . . 42
KOMMUNULÆKNIN - HVUSSU BÍLEGGI EG EINA LÆKNAVIÐTALU? . . . . . 43
HVØNN SKAL EG RINGJA TIL? KOMMUNULÆKNAN, LÆKNAVAKTINA ELLA 1-1-2? . 44
Neyðtænastur - *1-1-2 og 1870* . . . . . . . . . . 44
Viðgerð á sjúkrahúsið . . . . . . . . . . 44
Barnsburður og tænastur . . . . . . . . . . 45
Barnsburður . . . . . . . . . . 46
Tannrøkt, sálarheilsutænasta og fysioterapi . . . . 46
Barnaheilsutænastur – ráðgeving og vitjan heima av heilsufrøðingi . . . 46
Hvat geri eg, um eg ikki fái farið til arbeiðis vegna sjúku? . . . . . . . . . . 47

## BØRN, SKÚLI OG ÚTBÚGVING

**Hesin partur snýr seg um upplýsingar um skúlaskipanina í Føroyum, um veitingar, sum foreldur hava rætt til, og hvønn tit skulu seta tykkum í samband við, um familjuni tørvar ráðgeving og hjálp.**


Barsilsskipanin . . . . . 50
Barsilspeningur útgoldin í viðgongutíðini . . . . . 50
Barsilsfarloyvi og útgjald - til pápan og mammuna . . . . . 51
Hvørja veiting fær barn mítt? . . . . . 51
ÚTBÚGVINGARSKIPANIN . . . . . 52
Dagstovnaansing . . . . . 53
Fólkaskúli í Føroyum . . . . . 53
Samstarv millum lærarar og foreldur . . . . . 54
Miðnám . . . . . 54
Maritimar útbúgvingar . . . . . 55
Hægri útbúgving . . . . . 55
Útbúgving til vaksin . . . . . 55
Lektiuhjálp . . . . . 56
Skerdur førleiki og avbjóðingar hjá ungum og børnum. . . . . . 56
Ráðgeving . . . . . 56
Barnaverndartænastan . . . . . 57
SKRIVSTOVURNAR KRING OYGGJANAR . . . . . 58
Aðrir viðkomandi stovnar á barnaøkinum . . . . . 59
Seming í sambandi við hjúnaskilnað . . . . . 59
Kvinnuhúsið . . . . . 59


## FERÐAFÓLKAFLUTNINGUR OG AÐRAR TÆNASTUR

**Hesin parturin fevnir um útlendskt koyrikort og skráseting av bili. Eisini fæst at vita, um tað at eiga og koyra bil í Føroyum, og hvussu almenna samferðslan er skipað. Aðrar tænastur, banka- og samskiftistænastur, eru eisini lýstar.**


Samferðsla . . . . . 62
SKRÁSETING, AKFØR . . . . . 63
Eftirlit, lógir um akfør og skyldur . . . . . 65
Freistir og tíðarskeið á árinum . . . . . 66
Tá ið reglur og ásetingar verða brotnar . . . . . 66
FERÐSLUREGLUR . . . . . 67
Tunnilsgjald fyri undirsjóvartunnil . . . . . 69
Almenn samferðsla - bussar og ferjur . . . . . 69
Bankatænastur . . . . . 70
Telefon og internet . . . . . 70
Føroyska sjónvarpið . . . . . 70
Posttænasta . . . . . 71
Kelidjór . . . . . 71


## FRÍTÍÐ

**Í hesum partinum snýr tað seg um møguleikar innan frítíð og ítriv, mentanarkarmar í Føroyum, áhugabólkar og felagsskapir, og hvat er galdandi um ein ætlar sær á seiðaberg, á veiðu og í grind.**


Áhugabólkar, ítróttafeløg og aðrir felagsskapir . . 74
Sjálvboðið arbeiði og limaskapur . . . . . 74
Vælumtóktar ítróttagreinar . . . . . 75
Almenn bókasøvn . . . . . 75
Kvøldskúlin . . . . . 75
Musikkskúlar og tónleikalív . . . . . 76
Søvn og mentanarpallar . . . . . 76
Tiltøk og hátíðardagar . . . . . 77
ALMENNIR FRÍDAGAR . . . . . 79
TÝÐANDI DAGAR OG FREISTIR . . . . . 80
Út í náttúruna . . . . . 81
Frítíðarfiskarí . . . . . 82
Veiða . . . . . 83


### HENTAR UPPLÝSINGAR AFTAST Í BÓKINI:

- Yrkisfeløg & arbeiðsgevarar
- Tulking: Góð ráð, viðmældar tulkatænastur, rættindi og lógargrundarlag
- Stovnar og tænastuveitarar í Føroyum – stuttar lýsingar
- Orðalisti í bókstavaraði

# Kunning um føroyska samfelagið

Føroyar eru sjálvstýrandi tjóð í danska kongsríkinum. Flestu málsøki eru undir føroyskum myndugleika, m.a. skattur og avgjøld, almannamál, mentan, útbúgving og gransking. Málsøki undir donskum myndugleika eru sum er gjaldoyrapolitikkur, rættarskipan, løgregla og verjumál, familju og arvalógin, útlendingaøkið og marknaeftirlit í Føroyum. Ein týðandi munur at leggja merki til er, at Føroyar og Danmark eru tvær løgfrøðisligar eindir, tá ið umrøður útlendingamál. Haraftrat eru Føroyar ikki í Evropasamveldinum, hóast Danmark hevur limaskap í ES. Ásetingar um marknaeftirlit og tilflyting eru sostatt nakað ymiskar í báðum londum. Eitt uppihaldsloyvi í Føroyum er ikki galdandi í Danmark, og danskt uppihaldsloyvi er ikki galdandi í Føroyum.

Politiska skipanin í Føroyum er eitt avbrigdi av tí norðurlendska parlamentariska fólkaræðinum við sínum egna lóggevandi tingi, Løgtinginum, sum fólkið hevur valt, og eini útinnandi stjórn, Landsstýrinum, við løgmanni á odda. Kjarnavirðini í føroyska samfelagnum hava fyri ein part fingið íblástur úr evropiskum mentanararvi og virðum. Evropiski mannarættindasáttmálin er beinleiðis feldur inn í føroyska løggávu. Føroyar eru fevndar av høvuðssáttmálunum hjá Sameindu Tjóðum um mannarættindi. Nevnast kann eisini sáttmálan um at basa øllum mismuni móti kvinnum (CEDAW-sáttmálin), Barnarættindasáttmálan og sáttmálanum um rættindi teirra, ið bera brek.




**Vit vilja gera vart við, at í Føroyum er ásett við lóg, at:**

- Børn og rættindi teirra eru vard. Kravt er við lóg, at ein og hvør skal boða Barnaverndarstovuni frá, um illgruni er um misnýtslu ella harðskap ímóti børnum.
- Javnstøða er millum kvinnur og menn. Harðskapur er bannaður, eisini heima við hús (sí eisini síða 9)
- Øll hava persónligt frælsi, átrúnaðarligt frælsi og talu- og samkomufrælsi.
- Einstaklingar, ið føra akfar á vegunum, mugu altíð halda ferðslureglurnar.

## FØROYSKT

Føroyskt er móðurmálið og almenna málið í Føroyum. Føroyskt er germanskt mál, sum hevur røtur í norrønum og er nær skylt við mál sum íslendskt, norskt, svenskt og danskt. Í øldir var danskt mál høvuðsmálið í almennum viðurskiftum, men nú er danskt annað mál, sum lært verður í skúlunum.

Føroyskt verður nýtt á øllum samfelagsstigum. Umframt føroyskt kann danskt verða nýtt í almennum viðurskiftum á stovnum undir donsku stjórnini t.d. hjá Ríkisumboðnum og í rættinum.

At kalla øll í Føroyum skilja danskt. Danir búsitandi í Føroyum tosa tí ofta danskt, og ikki er óvanligt at hitta borgarar og starvsfólk, ið tosa danskt sum fyrsta mál.

Enskt fær so við og við størri týdning bæði í undirvísingarskipanini og úti í samfelagnum. Føroyski skúlin brúkar á leið sama tímatal til enskt sum danskt og í hægri útbúgving verður enska málið brúkt alsamt meiri.

## STUTT UM TILFLYTING

Borgarum í Norðurlondum tørva ikki uppihaldsloyvi at búgva ella arbeiða í Føroyum. ES-borgarum tørva uppihaldsloyvi til at arbeiða og búgva her. Persónar, sum hvørki eru norðurlendingar ella ES-borgarar, kunnu tørva visum fyri at koma inn í landið sum ferðandi, men teir mugu hava uppihaldsloyvi, um hesi ætla at arbeiða og búgva her.

Tørvar tær fleiri upplýsingar at fáa greiðu á onkrum, ella hevur tú ávísar spurningar um tilflyting, far so inn á heimasíðuna hjá Udlændingestyrelsen og finn teigin um Føroyar, annars kann lesarin eisini fara inn á heimasíðuna hjá Útlendingastovuni í Føroyum.

## RÆTTINDI OG SKYLDUR

Føroyar eru fevndar av donsku grundlógini, altjóða lóg og yvirlýsingum um mannarættindi, eisini um barnarættindi. Eingin eigur at liva í ótta, sum nevnt verður í nevndu sáttmálum. Sama um tú er nýliga komin til landið, ert vitjandi, um tú ert fyri harðskapi ella rættindi tíni hava verið skerd, set teg í samband við løgregluna beinanvegin um so er.

Hevur tú eitt føroyskt persónstal, p-tal, hevur tú rætt til allar almennar tænastur sum ein og hvør annar føroyskur borgari. Men gev gætur, at atgongd til ávísar tænastur, sum t.d. arbeiðsloysisskipan, kann vera avmarkað.

| | |
|---|---|
| **FERÐAFÓLK** | • Einstaklingar, ið tørva visa (innfararloyvi) at koma til Føroyar, kunnu vitja, so leingi visa er í gildi.<br>• Einstaklingar, sum ikki tørva visa (innfararloyvi), kunnu vitja upp til 90 dagar. |
| **ARBEIÐSLOYVI** | • Tú søkir og letur eina arbeiðsumsókn inn í tínum egna landi og bíðar eftir endaligari avgerð. |
| **FAMILJU-SAMEINING** | • Tú søkir og letur umsókn inn um familjusameining í tínum egna landi ella Føroyum, treytað av, at tú ert lógliga í landinum. |

Ein kann altíð spyrja viðkomandi deild ella stovn, áðrenn søkt verður um ta ávísu almennu tænastuna, hvørji krøvini og avmarkingarnar eru.

Tað er tín ábyrgd, at tú skilir treytir og skyldur, tá ið tú søkir um loyvi, veri tað seg til arbeiði ella uppihald.

Gev eisini gætur, at persónar við tíðaravmarkaðum loyvi hava skyldu at endurnýggja uppihaldsloyvið, áðrenn umsóknarfreistin gongur út, og fylgja teimum reglum, sum vóru í brævinum, tá ið loyvið varð givið frá Udlændingestyrelsen í Danmark. *Tað, ikki at søkja um at leingja uppihaldsloyvið, áðrenn freistin er úti, hevur við sær, at loyvið fellur burtur. Uppihald í landinum er tá ólógligt. Útlendingamyndugleikarnir viðgera slík mál við størsta álvara og hetta kann eisini verða sent løgregluni.*

Fyri at fáa fleiri upplýsingar hesum viðvíkjandi, set teg vinaliga í samband við Útlendingastovuna ella løgregluna.

Sama um uppihald títt í Føroyum er fyribils ella longur, gev tær stundir at kunna teg um føroyska lóg og reglur, m.a. ferðslulógina, tí tær kunnu víkja fra teimum í tínum heimlandi. Tú kanst altíð seta teg í samband við løgregluna og kunna teg um lógir og reglur.

## VAL

Trý ymisk val verða hildin í Føroyum:

**LØGTINGSVAL**

Val til *Løgtingið*, sum hevur 33 valdar limir, sum sita í 4 ár

**FÓLKATINGSVAL**

Harumframt verða tvey føroysk umboð vald í danska *Fólkatingið*.

**KOMMUNUVAL**

Staðbundin val til bý- og bygdarráð. Val verður vanliga hildið fjórða hvørt ár.

## ATKVØÐURÆTTUR

**Kommunuval:**

- Allir føroyskir/danskir ríkisborgarar yvir 18 ár, skrásettir við bústaði í Føroyum.
- Og borgarar úr øðrum londum, sum hava búð í Føroyum í trý ár framman undan valinum (hava eisini rætt at stilla upp til kommunuval.)

**Løgtings-og fólkatingsval:**

- Allir føroyskir og danskir ríkisborgarar yvir 18 ár, sum búgva í Føroyum.

*Harðskapur í parlagnum*

Hevur tú verið fyri harðskapi, set teg í samband við Kvinnuhúsið og/ella løgregluna.

Um tú ert fyri harðskapi við hús, hevur familjusameiningarloyvi og fert frá harðligum manni/sambúgva og flytur á annan bústað, kann hetta ávirka uppihaldsloyvið. Danska Udlændingestyrelsen kann koma fram til eina avgerð um at seta uppihaldsloyvið úr gildi ella sýta fyri at leingja tað, ert tú farin frá hjúnafelaga/samlivara. Hetta, hóast tú hevur verið fyri harðskapi við hús, ringari viðferð ella øðrum ágangi. Hetta fevnir eisini um álvarsligan sálarligan ágang.

Skulu myndugleikarnir gera undantak til at víkja frá kravinum um samlív og uppihaldsloyvi, mást tú prógva, at harðskapur í parlagnum er orsøkin til, at tú ikki longur livir saman við hjúnafelagnum/makanum.

Harðskapur í parlagnum kann vera skjalfestur við at vísa til løgreglufrágreiðing (um harðskapurin er meldaður til løgregluna), fráboðan frá almannaráðgeva ella frágreiðing frá skaðastovu ella kreppumiðstøð. Tú mást eisini vátta, at harðskapur er grundin til, at tú ikki býrt saman við hjúnafelaga.

Udlændingestyrelsen ger av, um linnandi umstøður gera seg galdandi í tínum føri. Linnandi umstøður eru: um tú hevur børn, sum búgva í Føroyum, ella um tað at fara aftur til upprunalandið hevði sett tína sosialu støðu í váða – til dømis, um vandi er fyri sosialari útihýsing, tí tú ert farin frá hjúnafelaga. Hvussu leingi tú hevur búð í Føroyum, og hvussu væl tú ert integrerað/ur verður eisini tikið við.

Vanliga verða offur fyri harðskap, sum hava búð í Føroyum í tvey ár ella longri áðrenn tey fara frá sínum harðliga hjúnafelaga, undantikin kravinum um samlív. Hevur tú búð í Føroyum í minni enn tvey ár, fært tú vanliga bara undantak, um linnandi umstøður eru.

Vilt tú tað, kann Útlendingastovan hjálpa tær við at skriva til løgregluna um harðskap í parlagnum.

Vilt tú hava meira kunning um hesi viðurskifti, kanst tú fara inn á heimasíðuna hjá útlendingamyndugleikunum, www.newtodenmark.dk ella ringja til Udlændingestyrelsen, tlf. +45 3536 6600.

*Serlig viðmerking um rættindi og arbeiðsloyvi*

Rættindi hjá arbeiðsloyvishavarum (t.e. til sjúkradagpengar, frítíðarløn) eru ásett við lóg og í sáttmála við arbeiðsgevaran. Best er at tosa við arbeiðsgevaran fyrst, um ivi er um sáttmálatreytirnar. Kortini, er málið viðbrekið, set teg í samband við fakfelagsumboðið ella Rættarhjálpina, ert tú ikki limur í føroyskum fakfelag.

# AT FLYTA TIL FØROYA

Hesin parturin fevnir um uppihaldsloyvi í Føroyum, um at skráseta seg í kommununi, umframt upplýsingar um, hvussu tú fært ognarlutir tínar til landið, um bústaðarmøguleikar og kommunalar tænastur.



# HESIN PARTURIN FEVNIR UM


Familjusameining . . . . . 12

Arbeiðsloyvi . . . . . 12

ÚTLENDINGAMYNDUGLEIKARNIR Í DANMARK OG FØROYUM . . . . . 13

Leingjan . . . . . 14

Kann eg fáa familjulimir við mær til Føroya? . . . . . 14

Hvussu skráseti eg meg? . . . . . 14

Kann eg taka persónligar ognarlutir við mær til Føroyar? . . . . . 14

Bústaðarviðurskifti . . . . . 15

Kommunalar tænastur . . . . . 16

YVIRLIT: KOMMUNURNAR . . . . . 17

## FAMILJUSAMEINING

Treytað av, at krøv verða eftirlíkað, kann familjusameining vanliga latast:

- hjúnafelaga ella samlivandi maka
- børnum undir 18 ár

Ein familjusameining gevur loyvishavaranum loyvi at búgva og arbeiða í Føroyum í eitt ár. Tú skalt endurnýggja loyvið í seinasta lagi ein mánað, áðrenn tað gongur út, treytað av, at tú lýkur krøvini. Krøvini eru eitt sindur ymisk í mun til tað loyvi ein kann hava, tí er eitt gott hugskot at kanna eftir, hvørji krøv og treytir galda fyri teg.

Eftir trimum árum kanst tú søkja og liva upp til krøvini um varandi uppihaldsloyvi. Varandi uppihaldsloyvi er ikki heilt treytaleyst. Longdin á uppihaldsloyvinum er varandi, til tú ikki longur lýkur treytirnar, sum útgreinaðar eru í loyvinum (brævinum frá myndugleikanum).

## ARBEIÐSLOYVI

Borgarar úr londum uttanfyri norðurlond, sum ynskja at arbeiða í Føroyum, mugu søkja um arbeiðsloyvi. Hetta verður viðgjørt í danska Styrelse for International Rekruttering og Integration í samstarvi við føroysku Útlendingastovuni.

Fyri ES-borgarar er tó ein serlig ES-skipan fingin í lag fyri lættari at fáa arbeiðsloyvi, sum bara er galdandi, tá ið arbeiðsloysið í Føroyum er undir eitt ávíst stig – undir 3,5 prosent alment og í byggivinnuni, fyri vanlig faklærd arbeiðsfólk í ávísari vinnu, má arbeiðsloysið vera undir 6%. Meiri kunning um hesa skipan fæst inni á heimasíðuni www.newtodenmark.dk ella www.utlendingastovan.fo.

Vanliga verða tey, ið søkja arbeiðsloyvi,

- Arbeiðstakari
- Lesandi
- Au pair
- Starvslesandi
- Granskari
- Ítróttafólk
- Professionellur/hálvprofessionellur venjari
- Trúboðarar

Tað eru umsøkjarin og arbeiðsgevarin, sum seta gongd á umsóknartilgongdina saman. Bæði tú og arbeiðsgevari/stuðul tín mugu geva neyðugar upplýsingar, sum eisini fevna um arbeiðstilboð og undirskrivaðan sáttmála millum arbeiðsgevara og arbeiðstakara. Grundarlagið fyri arbeiðsloyvi er knýtt at tilknýtinum til arbeiðsgevaran. Um treytirnar hjá tær ella arbeiðsgevaranum broytast, so kann hetta ávirka títt arbeiðsloyvi, spyr teg tá fyri hjá danska Udlændingestyrelsen um næsta stig, tú skalt taka.

Til tess at leingja eitt loyvi mást tú senda umsókn um leingjan í fyrsta lagi tveir mánaðar fyrr og ikki seinni enn ein mánað fyrr enn upphaldsloyvið gongur út. Arbeiðsgevarin má eisini vátta, at arbeiðstilboðið heldur fram, og útvega váttan frá føroysku Arbeiðsloysisskipanini, sum váttar, at arbeiðsgevari hevur søkt eftir arbeiðsfólki, hevur tú havt arbeiðsloyvi í styttri tíð enn tvey ár.

Hevur tú havt arbeiðsloyvi sum arbeiðstakari í sjey fylgjandi ár á sama grundarlagi, lýkur tú kanska krøvini um varandi uppihaldsloyvi.

## DENMARK

### UDLÆNDINGE-STYRELSEN

Tekur sær av málum í Føroyum, sum hava samband við:

- Visum
- Familjusameining
- Varandi uppihaldsloyvi
- Friðskjól

Kunnar og vegleiðir t.d. um mál, sum eru til viðgerðar – í telefon ella við teldupostí.

www.newtodenmark.dk
+45 3536 6600

### STYRELSEN FOR INTERNATIONAL REKRUTTERING OG INTEGRATION

Tekur sær av málum í Føroyum, sum hava samband við:

- Arbeiðsloyvi
- Lesandi (á øllum stigum)

Kunnar og vegleiðir t.d. um mál, sum eru til viðgerðar – í telefon ella við teldupostí.

www.newtodenmark.dk
+45 7214 2000

## FAROE ISLANDS

### ÚTLENDINGASTOVAN

Virkar sum hoyringsmyndugleiki viðvíkjandi staðbundnum føroyskum málum fyri donsku útlendingamyndugleikunum.

Vegleiðir og veitir útlendskum ríkisborgarum í Føroyum almenna kunning um loyvi. Skrivstovan samskipar eisini virksemi, sum virkar fyri integrasjón og fjølbroytni í Føroyum.

www.immigration.fo
+298 357979

### LØGREGLUSTØÐIR Í FØROYUM

Tekur ímóti umsóknum um uppihaldsloyvi, um at leingja uppihaldsloyvi, loyvi um at koma inn aftur í landið, visum, eisini um at leingja innferðarloyvi.

Løgreglan í Føroyum gevur eisini loyvi at koma inn aftur og laissez-passes vegna danska Udlændingestyrelsen.

www.politi.fo
+298 351448

## MINST TIL

Øll brøv frá danska Udlændingestyrelsen ella Styrelsen for International Rekruttering og Integration eru lóggildug prógv um títt uppihald. Í brøvunum finst eisini kunning um treytir og rættindi. Goym brøvini við avgerðum í, hesi brøv kunna um týðandi treytir, sum ein má fylgja.

Øll brøv frá donsku útlendingamyndugleikunum eru á donskum. Tað er týdningarmikið at skilja treytirnar, sum settar vera í brævinum. Tá ið loyvir verða givin er hetta í brævi og tá eru treytirnar eisini lýstar.

Minst endiliga til at endurnýggja loyvið, áðrenn tað gongur út, ella kanst tú verða víst/ur úr Føroyum. Tá ið tú fert út í lond, ansa tá eftir tíðini, ið tú hevur loyvi at vera uttan fyri Føroyar, um tú ætlar tær framhaldandi at búgva í Føroyum. Set teg í samband við danska útlendingamyndugleikan og bið um meiri kunning.

## LEINGJAN

Sambært heimasíðuni hjá donsku útlendingamyndugleikunum www.newtodenmark.dk mást tú senda umsókn um at leingja loyvið inn í fyrsta lagi tveir mánaðar fyrr og ikki seinni enn ein mánað fyrr enn upphaldsloyvið gongur út. Spyr teg altíð fyri hjá myndugleikunum, so tú tryggjar tær, at tú søkir rættstundis.

## KANN EG FÁA FAMILJULIMIR VIÐ MÆR TIL FØROYA?

Hjúnafelagi tín ella sambúgvandi maki kunnu søkja um uppihaldsloyvi sum familjulimur, ið fylgir við, um tey vilja búgva saman við tær í Føroyum. Hevur tú børn undir 18 ár, kunnu tey verða tikin við í umsóknina frá hjúnafelaga ella sambúgvandi maka.

## HVUSSU SKRÁSETI EG MEG? SKRÁSETING Í *KOMMUNU*, HAR TÚ BÝRT

Hevur tú fingið uppihaldsloyvi, mást tú skráseta teg í kommununi, har bústaður tín er skrásettur – fylg vegleiðingini í brævinum frá myndugleikunum.

***P-tal – Persónliga føroyska samleikanummarið***

So skjótt tú hevur fingið loyvi at búgva í Føroyum og hevur skrásett teg í kommununi, fært tú eitt persónligt samleikanummar, eitt p-tal (persónstal). Tú verður síðan sjálvvirkandi skrásett/ur í landsskrásetingini, *Landsfólkayvirlitinum*, sum er týdningarmikið bæði fyri skatt og sosialar tryggingar.

Tá ið tú hevur fingið p-tal, kanst tú stovna bankakontu og seta teg fyri telefon og alnetstænastur.

## KANN EG TAKA PERSÓNLIGAR OGNARLUTIR VIÐ MÆR TIL FØROYA?

Loyvt er at taka persónligar ognarlutir við sær til Føroya (innbúgv, húsarhaldstól o.a.), og teir eru undantiknir toll og innflutningsgjøld, um teir hava verið tín ogn seinastu seks mánaðirnar í tínum heimlandi. Men gev gætur, at ávísa vøru, sum t.d. tubbak og alkohol, kanst tú ikki geva upp sum persónligar ognarlutir. Spyr teg fyri hjá TAKS, Toll- og skattstovu Føroya, hvørjar vørur eru avgjaldsfríar.

Serlig viðmerking um bilar:
Tú hevur loyvi at flyta inn eitt akfar toll- og avgjaldsfrítt. Akfarið kann bara vera til tína egnu nýtslu. Skiftir akfarið eigara innan fyri eitt ár eftir tann dag, tað varð flutt inn, verða tollur og avgjøld kravd í samsvari við vanligar innflutningsreglur. Eitt akfar, sum verður flutt inn sum flytigóðs, má verða skrásett á Akstovuni í seinasta lagi tvær vikur eftir, at tit eru komin til Føroya. Skrásetingargjald er sett saman av einum virðisgrundaðum avgjaldi og einum útlátsgjaldi. Fyri bilar skrásettir eftir 1. januar 2017 er eitt umhvørvisgjald komið í staðin.

## BÚSTAÐARVIÐURSKIFTI

***At finna sær eitt heim og seta búgv***

Tú kanst velja ímillum at keypa ella at leiga ein bústað at búgva í. Vanliga stendur eitt húsasølufólk fyri at keypa hús ella íbúð. Ognir til sølu verða ofta lýstar í bløðunum ella á einum av heimasíðunum hjá húsasølufeløgunum.

Tá ið tú leitar tær eftir eini íbúð at leiga, eru nógvir útleigarar, sum heldur svara eini lýsing, sum ein møguligur leigari setur í. Tí kann tað vera eitt gott hugskot at seta eina lýsing í, har tú greiðir frá tínum serliga leigutørvi á heimasíðuni og í teimum gulu síðunum í bløðunum.

⚠ *Teir útlendingar, sum hava fingið loyvi til familjusameining, mugu geva gætur eftir kravinum um hóskandi bústað.*

***At búgva til leigu***

Tá ið tú leigar tær eini hús ella eina íbúð, mást tú vera fyrireikað/ur at skula gjalda depositum. Í summum førum kann útleigarin krevja, at tú rindar leigugjaldið frammanundan. Men tú fert ikki at hava stórvegis tørv á kapitali til leiguna, sum tá ið tú keypir hús ella íbúð. Depositum er upphædd, sum leigarin rindar sum trygd fyri leiguskuld ella skaða, sum gjørdur verður á ognina. Tann upphæddin má ikki fara upp um leigugjald í tríggjar mánaðir. Depositum verður goldið aftur óskert, tá ið leigarin flytur út, treytað av, at íbúðin ella húsið er í sama standi sum, tá ið leigarin flutti inn.

Føroyska leigulógin krevur, at ein standardsáttmáli, sum útgreinar leiguna og treytirnar fyri leigumálinum, verður útfyltur og undirskrivaður av leigara og eigara. Skotbráið at flyta út úr einum bústaði ella leigaðari íbúð er tríggir mánaðir, um íbúðin er partur av heiminum hjá eigaranum, og tó fimm mánaðir, um eigarin ikki býr í sama húsi. Í sáttmálanum skulu vera skrivligar treytir, sum útgreina leigu, depositum og uppsagnarfreist, nýtslurokningar og allar staklutir, ið viðkomandi eru fyri báðar partar. Leigunevndin viðger kærur um leigumál.

**Meiri kunning um Leigunevndina er á www.leigunevndin.fo, tlf. 358000.**

Bústaðir er navnið á føroyska bústaðafelagnum. Bústaðir hava í løtuni 104 leiguognir ymsastaðni í landinum, og arbeitt verður við at víðka møguleikarnar at leiga íbúðir. Bústaðir eru alment felag, og høvuðsuppgávan er at útvega, byggja og reka leiguíbúðir og leiguognir. Sum limur í Bústaðir kanst tú skriva teg upp á bíðilista til leiguíbúðir.

**Meiri kunning fæst við at seta seg í samband við Bústaðir www.bustadir.fo, tlf. 401000.**

***At keypa egnan bústað***

Eingin lóg forðar einum útlendskum ríkisborgara at keypa ognir í Føroyum. Vilt tú fegin keypa eini hús í Føroyum, skalt tú bara síggja til at hava neyðugu fíggingina. Nógv byrja við at tosa við sínar bankaráðgevar, áðrenn ella um somu tíð sum tey fara at hyggja sær eftir húsi ella íbúð.

Keypsprísin á húsi ella íbúð gera tey av, sum bjóða upp á ognina. Minst bara til, at sølan er bindandi, tá ið seljarin hevur góðtikið títt boð. Tú mást tí ongantíð bjóða, áðrenn tú ert púra vís/ur í, at tú kanst fíggja keypið. Eitt húsasølufólk stendur vanliga fyri slíkum tilgongdum.

Áðrenn húsini verða keypt, verður rátt til vandaliga at kanna, hvørjum standi húsini

eru í. Helst saman við einum viðurkendum byggimeistara ella smiði – og at tú kannar eitt og hvørt lán og veð í húsunum, sum kann vera dult.

**Stovnurin, sum varðar av tinglýsing, er Umhvørvisstovan www.us.fo.**

Størstu húsasøluvirkini eru Skyn, www.skyn.fo og Inni, www.inni.fo.

### *Trygging*

Húsatryggingar tryggja skaða á hús, ið ikki kann verða komin av sliti og vánaligari røkt. Umframt fevnir tryggingin vanliga alt endurgjald, sum tú skalt svara fyri, um so er, at annað fólk kemur fyri skaða ella ognir teirra (ábyrgdartrygging). Aðrar sjálvvaldar tryggingar, sum tryggingarfelagið bjóðar út, kanst tú tekna tær umframt.

Vanliga bjóða tryggingarfeløg tryggingarpakkar. Ein, sum fevnir um húsini sum húsánari, ein annan fyri innbúgv (skaða á innbúgv tá ið eldur, vatnskaði ella innbrot hevur verið) og biltrygging, umframt aðrar. Minst bara til, at fyri hvørja tryggingarskrá er tað altíð treytir og skyldur, sum gera av, hvørjum tryggingin tekur við.

**Les meiri um banka- og tryggingartænastur í partinum, sum nevnist *Ferðafólkaflutningur og aðrar tænastur*.**

## KOMMUNALAR TÆNASTUR

Hvør kommuna bjóðar nógvar ymsar tænastur sum t.d. eldrarøkt, skúlaflutning, sløkkilið, vatn og heilsutænastu. Kanna eftir, hvørjar tænastur eru tøkar í tínari kommunu.

### *Ruskinnsavning og endurnýtslutænasta*

Skráirnar fyri ruskinnsavning í Føroyum eru ymiskar ymsa staðni í landinum, men tær eru skipaðar eftir somu lóg.

IRF, *Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin*, er stovnur, sum nógvar kommunur eiga saman. IRF savnar rusk og skipar fyri aðrari rusktænastu í hesum kommunum – t.d. endurnýtslustøðum.

Tórshavnar kommuna hevur sína egnu rusktænastu og endurnýtslustøð.

**Hevur tú spurningar viðvíkjandi ruski, ella hevur tú tørv á meiri kunning, ring til IRF, tlf. 414243, www.irf.fo. Býrt tú í Tórshavnar kommunu, kanst tú ringja til tlf. 302010 ella fara inn á www.torshavn.fo.**

Til húsarhald sendir IRF ein gráan ruskposa, sum bara kann verða nýttur til húsarhaldsrusk og bara hesir eyðkendu gráu posarnir verða savnaðir. Ein rulla við gráum posum verður latin hvørjum húsarhaldi (fýra einstaklingum) tvær ferðir um árið. Í gráa posan letur tú bara rusk, sum ikki verður endurnýtt og ikki skal verða skilt. Tilfar sum glas, ellutir og ljósperur skulu verða skildar frá. Aðrir ruskposar markaðir til pappír (ella ruskílat til pappír) og vandamikið burturkast verða latnir húsarhaldum, sum eru skrásett til ruskinnsavnan – antin hjá IRF ella Tórshavnar kommunu.

Posin má standa tætt við veg, í mesta lagi 20 metrar frá vegi, og lætt má vera at heinta posan.

Húsarhaldsrusk, grái posin verður savnaður eina ferð um vikuna.
Aðrir posar verða savnaðir eftir tørvi ella við jøvnum millumbilum.
Pappírsendurnýtsluílatið verður savnað 6. hvørja viku.

**Er ruskið ikki tikið, ella hevur tú ongar ruskposar fingið, set teg í samband við kommununa ella IRF, tlf. 414243 og fá meiri at vita.**

**YVIRLIT: KOMMUNURNAR**



# FRÁLÆRA Í FØROYSKUM MÁLI OG MENTAN

Hesin parturin kunnar um føroysk málskeið, sum kvøldskúlarnir bjóða, hvørjum undirvíst verður í, hvar og hvussu tú skalt melda teg til, og eisini verður kunnað um tey rættindi, tú hevur til tulk, tá ið tú vendir tær til føroyskar myndugleikar.

# HESIN PARTURIN FEVNIR UM


Kvøldskúlar . . . . . 20

Skeiðsinnihald . . . . . 20

YVIRLIT . . . . . 21

Hvussu søkir tú? . . . . . 22

Er tað ókeypis? . . . . . 22

Aðrir møguleikar at læra mál . . . . . 22

Tulking . . . . . 23

Tá ið tú er nýliga komin til Føroya, hevur tú rætt til skeið í føroyskum, sum kvøldskúlin heldur. Kvøldskúlin er undir kommununum og fíggjaður av Mentamálaráðnum.
At læra seg føroyskt er eitt týdningarmikið fyrsta stig ikki bara fyri at fáa týðandi kunning um rættindi, skyldur og tøkar tænastur, men eisini fyri at fáa Føroyar at kennast heimligar.
Í løtuni er undirvísingin í føroyskum ikki kravd við lóg. Kortini viðmæla vit, at mann meldar seg til málskeið, tí førleiki í føroyskum hjálpir tær við at koma til rættis í Føroyum.

## KVØLDSKÚLAR

Tær størstu kommunurnar hava undirvísing ella skeið í føroyskum máli. Hesi skeið verða hildin á kvøldskúlunum.

Skeiðini eru treytað av, at eitt minstamark av luttakarum er. Skeiðini kunnu tí verða avlýst ella ikki hildin, um ikki nóg nógv tekna seg til.

Tú mást spyrja teg fyri hjá kvøldskúlaleiðsluni ella hjá kommununi, har skeiðini verða hildin. Í teimum fylgjandi brotunum fær lesarin eitt yvirlit yvir, hvar undirvísing verður hildin og aðra praktiska kunning.

## SKEIÐSINNIHALD

Málskeiðini eru skipaði sum byrjanarskeið við tveimum ella trimum undirvísingarstigum (byrjanarstig, miðstig og framhald). Tað veldst alt um kvøldskúlan. Nakrir skúlar hava skeið, sum eru ætlað norðurlendingum og næmingum, sum tosa enskt. Stigið og innihaldið í hvørjum skeiði er vanliga grundað á tørvin og kunnleikan hjá teimum lesandi.

Innihaldið í byrjanarskeiðnum er fyrst og fremst mál og fyri ein part mentan og samfelagsmál, og eisini eitt sindur um kommununa. Tað kann vera til dømis at fara út á almennu stovnarnar og tey stóru arbeiðsplássini. Kortini er hvør kvøldskúli sjálvstøðugur, og frálæran er ymisk frá skúla til skúla.

# YVIRLIT



**Sørvágur**
Floksstig: Laga til tørvin hjá næmingum
Nær: Treytað av næmingum
Skúlavegur 13, Sørvágur
233222 wwww.sorvagsskuli.fo

**Vestmanna**
Floksstig: Laga til tørvin hjá næmingum
Nær: Treytað av næmingum, oktobur-apríl
Toftavegur 12, Vestmanna
506670 www.vestmanna.fo

**Giljanes**
Floksstig: Laga til tørvin hjá næmingum
Nær: Kvøld
Á Giljanesi 2, Sandavágur
344424 www.sag.fo

**Vágur**
Floksstig: Laga til tørvin hjá næmingum
Nær: Kvøld, septembur-apríl
Vágsvegur 30, Vágur
269567 www.vagur.fo

**Klaksvík**
Floksstig: Byrjan/miðstig/framhald
Nær: Kvøld
Nólsoyar Pálsgøta 32, Klaksvík
215826 www.kks.fo

**Fuglafjørður**
Floksstig: Byrjanarstig & mentan
Nær: Kvøld
Ennisvegur 38, Fuglafjørður 3
238010 www.fuglafjordur.fo

**Runavík**
Floksstig: Laga til tørvin hjá næmingum
Nær: Morgun, oktobur-apríl
Rókavegur, Runavík
237133 www.kurk.fo

**Toftir**
Floksstig: Laga til tørvin hjá næmingum
Nær: Kvøld
Heygsvegur 28, Toftir
447332 www.toftaskuli.fo

**Oyrarbakki**
Floksstig: Laga til tørvin hjá næmingum
Nær: Kvøld, septembur-apríl
Skúlavegur 8, Oyrarbakki
281296 www.svs.fo

**Tórshavn**
Floksstig: Ymisk stig
Nær: Dag & kvøld
J.H. Schrøtersgøta 1, Tórshavn
302474 www.kvoldskulin.fo

**Sandoy**
Floksstig: Laga til tørvin hjá næmingum
Nær: Kvøld, oktobur-apríl
Heimasandsvegur 142, Inni í Dali
272914 www.meginskulin.fo

**Tvøroyri**
Floksstig: Laga til tørvin hjá næmingum
Nær: Kvøld, septembur-apríl
Kirkjubrekka 3, Tvøroyri
581821 www.tvoroyrarskuli.fo

## HVUSSU SØKIR TÚ?

Sum skeiðsluttakari mást tú altíð tekna teg til, áðrenn freistirnar eru úti (um tú vilt vera vís/ur í at sleppa upp í part). Og hetta verður heilt einfalt gjørt við at seta seg í samband við kvøldskúlaleiðsluna í kommununi.

Tórshavnar Kvøldskúli hevur eisini eina on-line tilmelding (á føroyskum), men til hana krevst føroyskt p-tal.

Vanliga byrja skeiðini í septembur ella oktobur og halda fram til apríl. Undirvísingartímarnir eru fyri tað mesta um kvøldið og ofta lagdir eftir arbeiðstíðunum hjá teimum, sum ganga í skúla. Nakrir skúlar fylgja ikki hesi ætlanini, so kanna eftir í tíni egnu kommunu.

## ER TAÐ ÓKEYPIS?

Allir útlendingar, sum ikki hava føroyskt sum fyrsta mál og eru skrásettir við einum føroyskum p-tali, hava rætt til púra ókeypis at sleppa á skeið um føroyskt mál og mentan á einum kvøldskúla.

Eisini ber til at søkja um serligan ferðastuðul at rinda tann ferðapening, ið krevst fyri at koma á víðkaðu skeiðini, sum verða hildin um dagin. Í løtuni eru hesi skeið bara í Havn. Set teg í samband við skúlaleiðslurnar og fá meiri at vita.

## AÐRIR MØGULEIKAR AT LÆRA MÁL

Tað er eingin almennur listi yvir privatar føroyskar málløerarar, men tað er lætt at spyrja fólk um lærarar í kommununi ella at finna ein á teimum sosialu miðlunum.

Harumframt hevur Fróðskaparsetur Føroya framleitt eitt online skeið í føroyskum til nýbyrjarar. Skeiðið ger brúk av m.m. videobrotum í fráløruni. Sí www.faroeseonline.com.

Fróðskaparsetrið hevur skeið í føroyskum sum annað mál á bachelorstigi hvørja lestrarhálvu. Harumframt hevur Fróðskaparsetrið á hvørjum ári eitt summarskeið yvir tríggjar vikur, International Summer Institute. Tað er ætlað teimum, sum tosa norðurlendskt, men ikki avmarkað til teirra. Undirvísingargjaldið liggur um 6.500 kr. Um tú vil vita meiri um hetta, set teg í samband við Fróðskaparsetrið og bið um meira kunning.

## TULKING

Í sambandi við brotsmál hevur rættarskipanin eina tulkingartænastu, sum verður veitt ókeypis, um mett verður, at tulking er neyðug. Tað samsvarar við danska fyrisitingarlóg. Í øðrum málum enn brotsmálum eru tulkingarútreiðslurnar ein partur av samlaða sakarmálskostnaðinum. Í føroyskum rættarhølum verður eisini telesamskifti við ella uttan video brúkt til tulking, tá ið tørvur er á tí.

Lógin um føroyska heilsutrygging leggur dent á, at Heilsutrygd rindar kostnaðin av tulking, tá ið tað er neyðugt í sambandi við kommunulæknavitjan ella avtalu við serlækna.

Viðvíkjandi øðrum medisinskum viðgerðum t.d. á sjúkrahúsi er tað týdningarmikið, at sjúklingurin skilir, hvat ið verður sagt um viðgerðina og heilsustøðuna. Í lógini um sjúklingarættindi í Føroyum, er staðfest, at sjúklingurin hevur rætt til at fáa upplýsingar um sína heilsustøðu og møguliga viðgerð, tað fevnir eisini um váða og hjáárin. Harumframt verður gjørt greitt, at kunning um t.d. ætlaða viðgerð skal verða givið á ein hátt, sum lagar seg eftir móttakaranum.

Í øðrum samanhangi sum t.d. í foreldraviðtalu í skúlanum ella til fundir við sosialar tænastur hjá kommununi ella tílíkt kann eisini vera tørvur á tulki. Rátt verður til altíð fyrst at kanna hjá stovnum, hvønn politikk teir hava í sambandi við tulkingarútreiðslur.

Tó er tað so, at í málum, sum viðvíkja heilsutænastu ella rættarskipan, kanst tú fáa tulk ella skjøl av tydningi týdd. Í øðrum førum kann brúkarin verða noyddur at rinda útreiðslurnar ella finna eina loysn saman við viðkomandi stovni. Almennir myndugleikar meta hvør í sínum lagi, um tørvur er á tulki í ávísu støðuni. Viðkomandi stovnur ger av, um hann rindar fyri tulkingartænastuna ella ei.

*Tulkatænastur, sum eru tøkar, eru settar í eitt yvirlit aftast í hesi bók.*

# ARBEIÐI

Hesin parturin kunnar um rættindi og skyldur sum arbeiðstakari í Føroyum. Her fært tú almenna kunning um arbeiðsmarknaðin, hvat tín arbeiðssáttmáli eigur at fevna um, hvussu skattur verður goldin og onnur evni, sum hava við arbeiði at gera.



# HESIN PARTURIN FEVNIR UM


Almenn kunning um arbeiðsmarknaðin........26

Fakfeløg........26

Tíni arbeiðsrættindi........27

At verða sagdur úr starvi........30

Rættindi og trygd til arbeiðis........32

Skattur........33

Sjálvuppgáva og framskundað skattauppgerð...34

Pensjónsskipanir í samband við arbeiði.......35

Pensjónir........36

Fólkapensjón........36

Fyritíðarpensjón........36

At finna arbeiði........37

Arbeiðsloysisskipanin........37

Góðkenning av útbúgving........38

At fara undir egið virki........39

## ALMENN KUNNING UM ARBEIÐSMARKNAÐIN

Í Føroyum er at kalla ein og hvør vaksin í starvi. Tey allarflestu arbeiða í almenna tænastugeiranum (heilsu- og sosiala geiranum) ella í privatari vinnu, sum er knýtt at fiskivinnu. Nógv tann týdningarmesta inntøkukeldan til tjóðarbúskapin er fiskivinnan – vanliga eru fiskavørur meira enn 95 % av føroyska útflutninginum. Nógvir føroyingar eru eisini sjálvstøðugt vinnurekandi, eiga sín egna handil, matstovu ella aðrar vinnur t.d. smá fiskifør.

Ein rættiliga stórur partur av føroyskari arbeiðsmegi hevur verið í starvi uttanlands. Í 2014 vóru lønirnar hjá teimum umleið 7 % av bruttutjóðarúrtøkuni. Tað er evropiskt met. Hesin bólkur hevur vanliga verið í starvi sum faklærd arbeiðsmegi t.d. timburmenn ella elektrikarar í Noregi, sum sjómenn í danska handilsflotanum ella á fremmandum fiskiførum.

Arbeiðsmegin er skipað í fakfeløg, og arbeiðsgevarar eru eisini skipaðir í feløg. Hesir partar samráðast um sáttmálar, sum áseta treytirnar fyri størv og lønir fyri arbeiðstakarar og arbeiðsgevarar.

Harafturat verður minstaløn fyri fiskimenn skipað við lóg, hvussu long arbeiðsvikan skal vera, frídagar, barnsburðarfarloyvi, arbeiðsloysisstuðul o.a. Hesir kollektivu arbeiðssáttmálarnir ímillum fakfeløg og arbeiðsgevarafeløg galda fyri allan tann føroyska arbeiðsmarknaðin. Men ein og hvør arbeiðstakari kann eisini samráðast við arbeiðsgevara sín um aðrar einstakar ágóðar og treytir.

## FAKFELØG

Fakfeløg umboða arbeiðstakarar og veita limum løgfrøðiliga ráðgeving og hjálp, stinga trupulleikar seg upp. Tú mást vera limur, skalt tú sleppa framat at brúka hesar tænastur og ágóðar. Og fyri at vera limur mást tú rinda árligt limagjald. Høvuðsarbeiðið hjá fakfeløgunum er at varðveita og at bøta um rættindi og ágóðar hjá arbeiðstakarum. Feløgini hava álitisfólk á teimum stóru arbeiðsplássunum. Tað ber altíð til at fáa fatur á einum umboði ella at seta seg í samband við skrivstovuna hjá fakfeløgunum.

Fakfeløgini eru skipað eftir tí arbeiði ella tí yrkisligu ella útbúgvingarligu bakgrund, sum arbeiðstakarin hevur. Arbeiðsmegin bæði á sjógvi og á landi er skipað í ymisk fakfeløg t.d. fiskimenn, maskinmeistarar, yvirmenn og handilsfólk, sjúkrasystrar o.a. Av tí at fakfelagsumboðanin er so ymisk, kunnu summar treytir og skipanir, sum nevndar eru í teimum pørtunum, sum koma seinni, vera ymisk frá eini starvssetan til aðra t.d. á einum fiskiskipi.

## TÍNI ARBEIÐSRÆTTINDI

Limaskapur í ávísum fakfelag kann geva atgongd til viðkomandi ágóðar sum til dømis tryggingarskipanum, sum eru gjørdar til arbeiðsumhvørvið hjá m.ø. fiskimonnum ella handverkarum.

Í Føroyum hevur tú frælsi at skipa teg í felag, so eingin verður tvingaður at fara upp í nakran felagskap ella fakfelag.

**Gev gætur**

Sí yvirlit yvir fakfeløg og felagsskapir á síðu 84

***Starvssetan***

Sambært lóg so hevur ein og hvør, sum arbeiðir í minsta lagi 8 tímar um vikuna í meira enn ein mánað, rætt til skrivligan arbeiðssáttmála. Arbeiðssáttmálin má sum eitt minstakrav fevna um hetta: hvør er sáttmálapartur, dagfesting, tá ið arbeiðið byrjar, kunning um eftirløn, starvsheiti, hvussu leingi arbeiðið væntandi fer at vara, um tað er tíðaravmarkað, arbeiðsplássið (bústaðaradressa), lýsing av arbeiðinum og starvsheiti/ funktión, uppsagnartreytir, lønartreytir og lønarásetingar, útgreinaðar arbeiðstíðir og arbeiðssteðgir, og kollektivar sáttmálareguleringar, sum skipa starvsviðurskiftini, og kanska aðrar sáttmálar, sum viðvíkja starvinum. (Gev gætur; fiskimenn hava aðra skipan, av tí at fiskimenn mynstra við skipum eftir sáttmálum við Fiskimannafelagið.)

Arbeiðsgevarin hevur við lóg skyldu at vísa arbeiðstakaranum arbeiðssáttmálan í seinasta lagi ein mánað eftir, at tikið er við starvinum.

***Lønaráseting***

Høvuðsreglan er tann, at lønir verða ikki ásettar við lóg í Føroyum, og tí eru t.d. ongar minstulønir. Tí er tað týdningarmikið at hava greiðar skrivligar arbeiðsgevarasáttmálar, sum áseta lønina.

Treytað av tí arbeiðsmarknaðargeira, tú starvast í, kunnu lønirnar verða ásettar í kollektivum sáttmálum ella sáttmálum millum arbeiðsgevarafelagið og títt fakfelag.

Øll fáa ikki løn um somu tíð. Nakrar lønir verða goldnar seinast í mánaðinum, men tímalønt arbeiði verður goldið hvørja ella aðruhvørja viku. Fær arbeiðari ikki løn til tíðina, skal arbeiðsgevarin fáa tað at vita. Hjálpir tað ikki, er fakfelagið klárt at hjálpa við ókeypis løgfrøðiligari hjálp, skuldi tað verið neyðugt.

Hvørja ferð, tú fært løn, fært tú lønarseðil - annaðhvørt sum pappír ella talgildan. Lønarseðilin vísir, hvussu nógv tú hevur fingið í løn, helst eisini arbeiðstímar og aðrar útgreiningar so sum yvirtíð, frítíðarløn, eftirlønargjald o.a. Tí verður rátt til at goyma lønarseðlarnar. Brúkar tú netbankatænastur, sært tú, hvussu nógv

er tikið av í skatti og kravdum gjaldi til Arbeiðsloysisskipanina, Barsilsgrunnin, Heilsutrygd, o.a.

***Arbeiðstíð***

Vanliga er ásetta vikuliga tímatalið lýst í einum kollektivum sáttmála millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Vanlig arbeiðstíð er uml. 40 tímar um vikuna í tí privata og tí almenna geiranum. Arbeiði, sum fer út um vanliga arbeiðstíð, verður endurgoldið við einari yvirtíðarviðbót - vanlig arbeiðstíð er lýst at byrja kl. 7 á morgni og kann halda fram til kl. 18 seinnapart vanligar vikudagar. Treytir um matarsteðg og aðrar steðgir eru vanliga lýstar í sáttmálum ímillum fakfelagið og arbeiðsgevaran.



***Frítíð, rættur til frítíð, frítíðarpeningur***

Alment er frítíðin, sum ein hevur rætt til árliga, 5 vikur umframt almennar frídagar. Eitt og hvørt arbeiðsfólk savnar sær rættin til so og so nógvar frídagar við ella uttan løn. Fyri tímalønt er frítíðarpeningurin 12 % av lønini. Løntakarar, sum fáa løn sína mánaðarliga, hava rættindi til goldna frítíð og eitt frítíðarískoyti, sum er 1,5 % av lønini, sum er goldin árið fyri.

Arbeiðstakarar hava ikki bara rættindi til frítíð, men hava eisini skyldu at brúka hana. Árligi frítíðarpeningurin verður goldin út eina ferð um árið, umleið 2. mai.

Tú eigur at lata arbeiðsgevaran vita frammanundan, nær tú ætlar tær at brúka frítíðina. Hetta kann vanliga vera gjørt í samráð við arbeiðsgevaran. Arbeiðsgevarin hevur endaligu avgerðina.

Lóggávan, sum ásetur frídagar á arbeiðsmarknaðinum, er ikki galdandi fyri fiskimenn og sjómenn. Ein onnur skipan er galdandi fyri teir.

***Sjúka - rættur til sjúkradagpening ella rættur at fáa løn, tá tú ert sjúk/ur (í styttri tíð)***

Legst tú sjúk/ur og ert ikki før/ur fyri at arbeiða, hevur tú rætt til at fáa tína inntøku endurgoldna. Treytirnar fyri at fáa endurgjald eru ymiskar í teim ymisku geirunum á arbeiðsmarknaðinum.

**Hevur tú ikki rætt til at fáa løn frá arbeiðsgevaranum**, tá ið tú ert sjúk/ur, kanst tú søkja um sjúkradagpening frá Almannaverkinum. Sama er galdandi, tá ið børn tíni eru sjúk fyrsta og annan dagin. Sjúkradagpeningurin er 80% av arbeiðsmannaløn, og verður roknað eftir tíni miðalinntøku seinastu 5 vikurnar, áðrenn fráveru. Ávísar treytir vera settar. Umsóknin um dagpening skal verða Almannaverkinum í hendi í seinasta lagi 60. dagin aftaná 1. fráverudag, fyri at dagpeningur kann játtast frá og við 1. fráveruegi. Tað er ikki nóg mikið at læknaváttanin er móttikin áðrenn tíðarfreistin er úti. Neyðugt er, at umsóknin er móttikin.

**Hevur tú rætt til at fáa løn frá arbeiðsgevara**, meðan tú ert frá arbeiði vegna sjúku, hevur tú eisini skyldu at prógva, at tú ert ikki før/ur fyri at arbeiða. Tað er høvuðsreglan. Kortini hevur tú skyldu at siga arbeiðsgevaranum frá so skjótt sum gjørligt, at tú ikki ert før/ur fyri at arbeiða. Arbeiðsgevari kann krevja læknaváttan, tó vanliga ikki fyrr enn ein vika við sjúku er umliðin.

***Sjúkradagar hjá barni***

Rætturin at vera heima og taka sær av sjúkum barni samstundis, sum tú fært løn frá tínum arbeiðsgevara, er ikki útgreinaður í nakrari lóg. Tað stendur í tí sáttmálanum, sum galdandi er fyri títt starv.

Tímalønt arbeiðsfólk hava bara rætt at vera heima og taka sær av sínum sjúku børnum við løn, um arbeiðssáttmálin útgreinar, at tey hava rætt til tað. Er barnið sjúkt, kanst tú tó søkja um sjúkradagpening frá Almannaverkinum.

Loyvi hjá arbeiðstakarum, sum fáa mánaðarløn (í minsta lagi 20 tímar um mánaðin), at vera frá arbeiði, tá ið barn er sjúkt, verður ásett í arbeiðssáttmálanum.

Tað er útgreinað í lóg, at allir arbeiðstakarar fáa frítíðarpening, meðan henda lógliga frávera er.

## AT VERÐA SAGDUR ÚR STARVI

***Frí vegna sjúku***

Starvsfólk, sum eru sjúk í longri tíð enn loyvt er sambært kollektiva sáttmálanum ímillum arbeiðsgevaran og fakfelagið, kunnu hava tørv á at koma í samband við kommunulæknan fyri at fáa eina læknaváttan. Heldur læknin, at frítíð er neyðug, skrivar hann eina læknaváttan fyri tíðarskeiðið.

Missur í inntøku, sum stavar frá sjúku ella skaða, kann geva tær loyvi til sjúkradagpengar. Ein treytin er tó, at tú hevur havt arbeiði í minsta lagi í 5 vikur, áðrenn sjúkrafrávera byrjaði. Longsta skeið, sum tú kanst taka ímóti hesum peningi er 40 vikur. Um tað stendur tær í boði, hevur tú skyldu at taka ímóti læknaligari viðgerð, sum hjálpir tær at fáa arbeiðsevnini aftur til tess at varðveita tíni rættindi til sjúkradagpening.

Fiskimenn hava eisini tryggjaðan rætt til sjúkradagpening, um ávísar treytir eru loknar. Verður fiskimaður sjúkur, meðan hann er heima, ber til at søkja um sjúkradagpening frá Almannaverkinum.

**Fá meira kunning á www.av.fo ella ring til Almannaverkið tlf. 360000**

***Barsilsfarloyvi***

Arbeiðstakarar hava loyvi at fáa sær frí í sambandi við barnsburð og barnsburðar-farloyvi.

Allir lønmóttakarar, sum eru skrásettir og rinda skatt í Føroyum, hava rætt til farloyvi við løn í sambandi við barnsburð. Foreldur fáa 52 vikur frí eftir barnsburð. Fyri meiri kunning um foreldrafarloyvi og játtanir, sí annars partin um *Børn, skúli og útbúgving*.

Skuldi tú havt tørv á at fingið farloyvi ella frí til at taka tær av einum skyldfólki í samband við lívshættisliga sjúku, t.d. til ta seinastu tíðina, so er eingin lóg ella kollektivur sáttmáli fyri ta støðuna. Tú eigur at seta teg í samband við arbeiðs-gevaran at fáa greiðu á, hvørjir møgu-leikar eru í slíkari støðu. Í øðrum førum kann ein arbeiðstakari hava rætt til pening frá almannaverkinum, um kommunulæknin heldur tað vera hóskiligt.

Aðrar umstøður fyri farloyvi kundu verið, tá ið ein arbeiðstakari verður valdur í býráð ella løgting.

**Meiri kunning á www.barsil.fo (á før-oyskum), Barsilsskipanin, tlf. 352600**

***Uppsøgn - uppsagnarfreist***

Ymsar treytir og ásetingar eru galdandi fyri uppsagnir. Uppsagnarfreistin er í samsvari við starvsaldurin hjá starvssetta. Fyri ein tímaløntan arbeiðstakara, sum hevur verið í starvi í 6 mánaðir, er uppsagnarfreistin í minsta lagi 7 arbeiðsdagar. Ein arbeiðari, sum fær regluliga mánaðarløn (settur í starv undir treytum sambært sáttmálanum við Føroya arbeiðarafelag), og sum hevur arbeitt í meira enn 6 mánaðir og minni enn 2 ár, er uppsagnarfreistin 2 mánaðir. (Tá ið arbeiðssteðgur er vegna vánaligt veður ella vantandi rávøru, galda uppsagnarfreistirnar ikki, og arbeiðararnir hava ikki krav at fáa løn frá arbeiðsgevaranum. Í staðin er ein skipan galdandi fyri arbeiðsfólk á flakavirkjum ígjøgnum Arbeiðsloysisskipanina, ALS.)

Fyri fastlønt arbeiðsfólk (t.d. í S&K), sum hava verið í starvi ímillum 6 mánaðir og 3 ár (fyribilsstarv og royndartíð í starvinum eru ikki tald við), er uppsagnartíðin 3 mánaðir.

Uppsagnarfráboðanin má vera skrivlig bæði frá arbeiðsgevara og arbeiðstakara.

Arbeiðsfólk, sum hava verið í starvi í 9 mánaðir, (t.d í starvi undir sáttmála hjá Føroya arbeiðarafelag) kunnu krevja, at orsøkirnar til uppsøgnina verða givnar skrivliga, um tey vilja tað.

Umstøður, sum føra til uppsagnir kunnu taka seg upp á einum og hvørjum arbeiðsplássi. Eitt dømi um umstøður, í mun til arbeiðstakaran, kundi verið eitt álvarsligt brot á starvssáttmálan. Dømi um umstøður, í mun til arbeiðsgevaran, kundi verið ein neyðug skerjing í arbeiðsmegini ella ein umskipan.

Starvskvinna kann ikki vera søgd úr starvi, tí hon er við barn. Kann arbeiðsgevarin ikki prógva, at uppsøgnin ikki er sett í samband við barnsburðin, er uppsøgnin ólóglig. Tað er útgreinað í barnsburðarlógini. Sama er galdandi í sambandi við ættleiðing.

***At vera sagdur úr starvi á staðnum***

Munurin á at vera sagdur úr starvi á staðnum og sagdur úr starvi er, at tá ið ein er sagdur úr starvi á staðnum, so missir viðkomandi rættindi til løn frá teirri løtu, t.e. beinanvegin. Men fólk, sum eru uppsøgd á vanligan hátt, fáa sína løn í uppsagnartíðini (og mugu arbeiða hetta tíðarskeiðið).

Tá ið persónur verður sagdur úr starvi á staðnum, so verður arbeiðið steðgað umgangandi. At siga persóni úr starvi á staðnum verður bara brúkt í teimum førum, tá ið arbeiðsgevari heldur, at lønmóttakarin hevur grovliga og týðiliga misrøkt sítt starv.

Um støða kann borga fyri einari uppsøgn á staðnum ella ei, verður altíð mett eftir ítøkiligu støðuni. Dømi eru: um ein noktar at gera arbeiði eftir boðum; at vera burtur frá arbeiði (uttan lógliga grund); at vera ov seinur til arbeiðis (eftir at hava fingið eina ávaring, sum greidliga ger vart við, at hendir hetta aftur, so vil viðkomandi missa starvið upp á standandi fót); rúsdrekkamisnýtsla, stuldur og illoyalitetur.

## RÆTTINDI OG TRYGD TIL ARBEIÐIS - ARBEIÐSUMHVØRVI

Lógin viðvíkjandi arbeiðsumhvørvi ásetur, at tú hevur rætt til tryggar og heilsugóðar arbeiðsumstøður. Arbeiðsgevarin hevur ábyrgd av at tryggja, at arbeiðsumhvørvið er so trygt sum til ber. Starvsfólkið hevur skyldu til at hjálpa arbeiðsgevaranum í hesum arbeiði.

Í stuttum hevur arbeiðsgevarin skyldu at tryggja tað, sum niðanfyri verður nevnt sambært arbeiðsumhvørvislógini: at arbeiðsvirksemið verður framt á so tryggan hátt sum til ber; at starvsfólk fáa at vita um vandar, ið standast av arbeiðinum og verða lærd í samsvari við tað; at tað er eitt virkið toymi á arbeiðsplássinum, sum arbeiðir við trygd, og at trygdarumboðini eru lærd á hóskandi hátt, eru væl kunnað og hava verið á øllum kravdum skeiðum. Arbeiðsgevarin hevur skyldu at fylgja vegleiðingum og avgerðum frá viðkomandi myndugleikum.

Ábyrgdin hjá arbeiðsgevaranum er at fylgja hesum ásetingum: at alt arbeiði verður gjørt á skilagóðan hátt; at starvsfólk fáa at vita um møguligan váða í arbeiðinum og verða vand í samsvari við tað; at samstarv um trygd og heilsu verður gjørt í samsvari við viðkomandi ásetingar (arbeiðsumhvørvislógin); at trygdarumboð fáa kunning og tíðindi frá Arbeiðseftirlitinum, og at arbeiðsgevarar gjøgnumganga mannagongdir kring trygd, um myndugleikarnir krevja tað.

Starvsfólkið hevur skyldu at fylgja trygdarreglunum og ásetingunum, sum arbeiðsgevarin setur og sum ásettar eru í lóg.

Viðvíkjandi ungdómum og arbeiði, so er høvuðsreglan tann, at børn undir 15 ár sleppa ikki at arbeiða. Børn, sum eru 13 ára gomul, kunnu átaka sær ymiskt lætt arbeiði. Børn, sum eru undir 13 ár, kunnu fáa løn fyri at vera við í ymiskum mentanarligum framførslum við samtykki frá foreldrum ella verjum.

Børn undir 17 ár sleppa ikki at arbeiða meira enn 10 tímar um dagin. Kravt verður av ungum fólki undir 17, at tey hava eina samanhangandi hvíldarløtu, sum er ikki minni enn 12 tímar um dagin. Kravt verður av ungum fólki undir 15 ár at hava eina samanhangandi hvíldarløtu, sum er ikki minni enn 14 tímar um dagin.

Øll arbeiðsfólk eru av sær sjálvum tryggjað av teirra arbeiðsgevara fyri skaða, ið stendst av arbeiði.

Fært tú skaða í einum óhappi, sum hevur samband við arbeiði, so er tað týdningarmikið, at arbeiðsgevarin sendir inn frágreiðing um tilburðin til viðkomandi myndugleikar. Eisini er týdningarmikið, at óhappið verður fráboðað Føroya Vanlukkutryggingarráði. Hesin almenni myndugleikin metir um tryggingarkrøv, ið stava frá arbeiðsóhappum, somuleiðis sjúkum og óarbeiðsføri. Dømi um sjúkur ella óarbeiðsføri, sum kunnu verða sett í samband við heilsuskaðiligt arbeiðsumhvørvi, kunnu vera skerd hoyrn, ryggjaskaði o.a.

Í teimum førum, tá ið óhapp er á arbeiðsplássinum, ella sjúkur ella vanføri, sum standast av arbeiði, stinga seg upp, kanst tú seta teg í samband við fakfelagið og fáa meira kunning.

**Fyri at fáa meira kunning um hesi viðurskifti: Arbeiðseftirlitið, www.arb.fo, tlf. 556400.**

# SKATTUR

Allir einstaklingar, sum búgva í Føroyum, mugu rinda skatt av allari inntøkuni. Meginparturin av skattinum, vit gjalda, er landsskattur, og eitt sindur er eisini kommunuskattur, pensiónsgjøld, og nógv rinda eisini kirkjuskatt. Skattur kann t.d. eisini vera tikin av aðrari inntøku, rentum, gávum og arvi. Harumframt eru eisini avgjøld, sum øll rinda. Eitt dømi er meirvirðisgjaldið, sum verður goldið av at kalla øllum tænastum og vørum. Tollur verður goldin av allari vøru og allari tænastu, sum er innflutt.

Tað almenna í Føroyum fíggjar ymsar tænastur til borgararnar. Skattur og avgjøld, sum vit rinda, verða brúkt til hesar almennu tænastur, sum fevna um heilsutrygd, sjúkrahús, útbúgving og flutnings- og samskiftisundirstøðukervið. Skattaskipanin virkar eisini lutvíst fyri eini inntøkujavnan millum skattgjaldarar.

### *Skattskylda*

Tá ið tú flytur til Føroyar, skalt tú rinda skatt av allari inntøku. Hvussu nógv, ið tú skal rinda í skatti, veldst um inntøkuna og í hvørjari kommunu, tú býr í.




## BORGARAGLUGGIN

Nettænastan hjá TAKS gevur brúkarum møguleika at avgreiða fleiri av viðurskiftunum við stovnin. Eitt nú kanst tú lata inn sjálvuppgávu og síggja ymiskar upplýsingar, t.d. hvat tú hevur fingið í løn, goldið í skatti, eigur í eftirløn, frítíðarløn og annað.

Fyri at sleppa inn á borgaragluggan. fo mást tú fyrst hava talgilda lykilin,  Mínlykil, sum er ein trygg innritingarskipan, og tú mást hava fartelefon. Far til www.minlykil.fo og tak niður tann talgilda lykilin og fylg leiðbeiningunum.

### *Avmarkað skattaskylda*

Býrt tú í Føroyum eitt avmarkað tíðarskeið uttan at skráseta fastan bústað, hevur tú avmarkaða skattskyldu í Føroyum. Hetta merkir, at skatturin, sum tú rindar, er ein føst upphædd, og hon verður ikki grundað á inntøku tína, ella í hvørjari kommunu tú býrt. Býrt tú í Føroyum í meira enn 180 dagar innan fyri 12 mánaðir, mást tú rinda skatt av allari inntøkuni í Føroyum ella uttanlands frá fyrsta degi, tú kemur til Føroya.

### *Onnur gjøld*

Umframt skatt rinda flestu einstaklingar nøkur kravd gjøld til ymsar sosialar grunnar, so sum Samhaldsfasta Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, Barsilsgrunnurin, Arbeiðsloysisskipanin, Heilsutrygd og Kringvarpið. Gjøldini verða tikin av inntøkuni á sama hátt sum skatturin.

### *Frádráttir*

Allir skattgjaldarar kunnu hava rættindi til persónligar frádráttir í skattskyldugu inntøku sínari, áðrenn landsskattur og kommunuskattur verður goldin.
Skattgjaldarar við børnum hava rætt til frádrátt í lands- og kommunuskatti fyri hvørt barn, sum er undir 18 ár, tó bert annað av foreldrunum.
Gjald til føroyskan eftirlønarveitara kann verða tikin av tí skattskyldigu inntøkuni.

*Rentustuðul og annað*

Íbúgvar í Føroyum kunnu søkja um at fáa rentustuðul fyri húsalán og útbúgvingarlán. Eingin stuðul verður latin til privat brúkaralán. Rentustuðul er bara latin fyri húsalán í Føroyum, og til hús, har ið eigarin sjálvur býr.
Annar stuðul er t.d. ferðastuðul í samband við ferðing til og frá arbeiði og stuðul til dupult húsarhald.

**Meira kunning um treytir, og hvussu tú kanst søkja um stuðul, fæst á www. taks.fo ella ring til TAKS tlf. 352600.**

## SJÁLVUPPGÁVA OG FRAM-SKUNDAÐ SKATTAUPPGERÐ

Hvørt ár skal skatturin endaliga gerast upp. Tí fáa øll, sum hava skattskyldiga inntøku í Føroyum, sendandi antin eina sjálvuppgávu ella eina framskundaða skattauppgerð.

*A-inntøka og B-inntøka*

Í skattahøpi verður skilað millum A-inntøku og B-inntøku. Flestu løntakarar í Føroyum hava A-inntøku. Hesir rinda skattin gjøgnum alt árið, og skatturin fer av lønini, áðrenn hon verður útgoldin. Skatturin verður tillagaður so hvørt, soleiðis at ein við árslok hevur rindað rættan skatt í mun til sína samlaðu ársinntøku.

Inntøka, har skatturin ikki fer av lønini við útgjald, er B-inntøka. Fólk við B-inntøku rinda skatt við at lata TAKS eina sjálvuppgávu, har tey boða TAKS frá, hvat tey hava havt av inntøku gjøgnum árið. Út frá upplýsingunum á sjálvuppgávuni roknar TAKS skattin hjá teimum við B-inntøku.

Fólk, ið bert hava A-inntøku, fáa sum oftast eina framskundaða skattauppgerð. Á framskundaðu skattauppgerðini stendur, hvussu nógva inntøku, tú hevur havt í árinum, og hvussu nógv, tú hevur rindað í skatti og øðrum avgjøldum. Uppgerðin sigur eisini, um tú hevur rindað ov nógv ella ov lítið í skatti. Hevur tú rindað ov nógv, fært tú pening aftur. Hevur tú rindað ov lítið, fært tú eina rokning sendandi fyri írestandi skatt.

Framskundaða skattauppgerðin verður vanliga send út í byrjanini av mars. TAKS ger uppgerðina út frá teimum upplýsingunum, sum TAKS hevur um teg. Fært tú eina framskundaða skattauppgerð, skalt tú kanna, um hon er røtt. Er hon røtt, nýtist tær ikki at gera meira. Er hon skeiv, skalt tú geva TAKS rættar upplýsingar við at lata inn sjálvuppgávu.

Borgarar við B-inntøku fáa altíð eina sjálvuppgávu. Fært tú eina sjálvuppgávu, er tað tí, at TAKS ikki hevur allar upplýsingar um tína inntøku. Tá skalt tú fylla sjálvuppgávuna út og lata hana aftur til TAKS. Út frá upplýsingunum á sjálvuppgávuni ger TAKS so eina skattauppgerð, sum sigur, hvussu nógv, tú eigur at rinda í skatti og øðrum avgjøldum.

Tað er altíð tú sum borgari, ið hevur ábyrgdina av, at TAKS hevur rættar upplýsingar um tína inntøku.

## PENSJÓNSSKIPANIR Í SAMBAND VIÐ ARBEIÐI

### *1. Kravd pensjónsskipan*

Kravt verður við lóg, at einstaklingar skulu savna ein part av lønini í eina pensjónsskipan frá tí, tey eru 21 ár og fram til tann føroyska pensjónsaldurin, sum er 67 ár. Nýggja eftirlønarlógin, sum kom í gildi 1. januar 2014, hevði við sær, at av allari skattskyldugari løn verður inngoldið í minsta lagi 1% til pensjón í 2014. Kravda inngjaldið veksur við 1% fyri hvørt ár, til øll eru komin upp á 15% í pensjónsgjaldi av hvørjari lønarflyting.

Tó er ikki krav, at pensjón verður goldin av løn, sum er lægri enn 3.000 kr. Tað er heldur ikki krav, at persónur, sum er yngri enn 21 ár og 60 ár og eldri, rindar pensjón av hvørjari løn.

Øll inngjøld, uttan mun til støðd, verða goldin inn á eina pensjónskonto. Tað er ikki fyrr enn tú skalt hava peningin útgoldnan, at tú skalt taka støðu til, hvussu peningurin skal útgjaldast.

Í kollektivum sáttmálum, sum galda fyri allan arbeiðsmarknaðin, er staðfest, at arbeiðsgevarin letur eina ávísa upphædd til pensjónina hjá arbeiðstakarum. Eru eingi krøv um pensjónssamansparing í sáttmálanum millum tín arbeiðsgevara og fakfelagið, so verður kravt av tær, at tú sparir saman í minsta lagi eins nógv og ásett er í lógini.

Arbeiðsfólk hava ábyrgd av, at arbeiðstakarar fara upp í eina pensjónsskipan annaðhvørt hjá pensjónsuppsparingarstovni ella fíggjarstovni í Føroyum.

Pensjónsuppsparingin er forskattað við 40%, og tað, ið loypur av, verður samanspart sambært lóggávu.

### *2. Føroyski arbeiðsmarknaðareftirlønar-grunnurin*

Einstaklingur, sum býr í Føroyum í minsta lagi í 3 ár frá tí, at hann er 15 ár til pensjónsaldur, kann fáa ávísa upphædd frá samhaldsfasta, sum svarar til tey árini, sum viðkomandi hevur búð í landinum. Fyri at fáa fullan ágóða úr hesum pensjónsgrunni, skal mann hava búð í Føroyum í 40 ár.

Henda pensjónsskipan er fyri ein part fíggjað av arbeiðsgevaranum og fyri ein part av arbeiðstakaranum. Í løtuni er talið 2,25 % av lønini, sum hvør partur rindar.

Til ber at flyta tín pensjónsrætt frá hesi pensjónsskipan, hagar tú fert at búgva, tá ið tú ert komin til pensjónsaldur.

**Meira kunning fæst á www.taks.fo ella ring til TAKS á tlf. 352600**

## PENSJÓNIR

Almenna kravið til at hava rætt til pensjón í Føroyum er annaðhvørt danskur borgaraskapur ella at vera giftur við persóni við donskum borgaraskapi, sum býr í Føroyum, ella at hava arbeitt á skipi, sum skrásett er í Føroyum, og at hava búð í danska kongsríkinum, í øllum førum í 3 ár, í aldrinum millum 15 og 67.

Sambært sáttmála við Norðurlond er kravið um danskan ríkisborgaraskap víðkað til at fevna um norðurlendskan ríkisborgaraskap, og harafturat eru rættindini at fáa pensjón í EEA-londum grundað á henda sáttmála.

## FÓLKAPENSJÓN

Lýkur tú røttu krøvini til at fáa pensjón, kanst tú fáa fólkapensjón, tá ið tú verður 67 ár.
Pensjónsrættindini eru býtt eftir teimum árum, tú hevur búð í danska kongsríkinum. Til tess at fáa fulla pensjón krevst, at tú hevur búð í danska kongsríkinum í minsta lagi í 40 ár.

**Meira kunning um fólkapensjón og rættindi til viðbøtur hjá eldri borgarum fæst á www.av.fo ella ring til Almannaverkið á tlf. 360000.**

## FYRITÍÐARPENSJÓN

Til ber at søkja um pensjónsrættindi, um mann orsakað av avlamni ikki kann starvast á vanliga arbeiðsmarknaðinum og um mann er í aldrinum ímillum 18 og 67. Umframt hetta, so kunnu onnur viðurskifti gera seg galdandi.

Fyritíðarpensjón kann býtast upp á tríggjar flokkingar: At hava mist allan førleika at uppihalda sær sjálvum við arbeiði, at hava mist tveir triðingar av evnunum, ella hava helvtarførleika at uppihalda sær sjálvum við arbeiði. Arbeiðsevnini verða roynd við ymiskum virksemi, eisini ymiskum heilsukanningum við tí í hyggju at fáa arbeiðsevnini aftur, áðrenn nøkur fyritíðarpensjón verður latin.

Pensjónsrættindi eru býtt við 4/5 av teimum árum, ein hevur búð í danska kongsríkinum, í aldrinum frá 15 og til tíðarskeiðið, tá ið fyritíðarpensjón er latin.

**Meiri kunning um fyritíðarpensjón er tøk á www.av.fo, annars ber til at ringja til Almannaverkið á tlf. 360000.**

## AT FINNA ARBEIÐI

At finna arbeiði er altíð treytað av tínum egna ídni, um tú er arbeiðsleys/ur ella um tú ætlar tær at finna nýtt arbeiði. Tá ið tú ert arbeiðsleys/ur, mást tú at hugsa um tínar møguleikar. Eitt gott stað at byrja er Arbeiðsloysisskipanin, ALS. Hesin stovnurin umsitur heimasíðuna www.starv.fo, sum hevur dagførdar upplýsingar um leys størv. Til ber at skráseta seg við eini vangamynd og CV á hesi heimasíðuni.

### MINST TIL

Hevur tú tíðaravmarkað arbeiðsloyvi ella líknandi grundarlag fyri uppihaldsloyvi, so hevur tú skyldu at boða frá hjá danska Styrelsen for International Rekruttering og Integration í Danmark um treytirnar fyri tínum arbeiðsloyvi broytast, t.d. um tú hevur mist starvið ella virkið hjá arbeiðsgevara tínum letur aftur. Hevur tú funnið eitt nýtt starv ella ætlar tær at fara undir nýtt virki, mást tú søkja um nýtt arbeiðsloyvi, áðrenn tú fer til arbeiðis í nýggjum starvi ella áðrenn títt virki fer í gongd.

## ARBEIÐSLOYSISSKIPANIN

Føroyska arbeiðsloysisskipanin gongur undir styttingini ALS. Arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar í Føroyum fíggja Arbeiðsloysisskipanina. ALS letur teimum stuðul, sum hava rætt til hann og kann vegleiða øllum, sum søkja um at sleppa aftur á arbeiðsmarknaðin.

Gev gætur, at borgarar uttan fyri Norðurlond við avmarkaðum arbeiðsloyvi (t.d. sáttmálabundin arbeiðstakari í eitt ár) hava ikki rættindi til arbeiðsloysispening úr føroysku arbeiðsloysisskipanini. Gjaldið til ALS verður sjálvvirkandi afturhildið í skattaskipanini frá øllum lønum, sum goldnar verða skrásettum íbúgvum í Føroyum. Útlendskir borgarar við einum tíðaravmarkaðum arbeiðsloyvi (1 ár) kunna søkja um at sleppa undan at rinda hetta gjald, sum er 1.25 % av A-inntøkuni.

Arbeiðstakarar, sum missa starvið og hava rætt til arbeiðsloysisstuðul, mugu boða ALS frá, beinanvegin sum tey eru vorðin arbeiðsleys. Arbeiðsloysisstuðulin er grundaður á lønina, sum fingin er seinastu 12 mánaðirnar, áðrenn ein varð arbeiðsleysur. Stuðulin er 75 % av vanligari løn upp til í mesta lagi 17.500 kr. um mánaðin.

Tú mást lúka ávísar treytir fyri at fáa rætt til arbeiðsloysisstuðul. Ein høvuðsregla t.d. er, at tú mást búgva í Føroyum. Aðrar treytir eru, at arbeiðsleysur persónur er tøkur til alt annað arbeiði og hevur skyldu at skráseta seg við vangamynd og CV á heimasíðuni www.starv.fo. Noktar viðkomandi at taka við starvi, sum ALS hevur í boði, kann rætturin til arbeiðsloysisstuðul verða tikin í 4 vikur.

Útlendskir arbeiðstakarar, sum hava mist starvið og ikki hava rætt til stuðul úr ALS, kunnu hava rættindi til tíðaravmarkaðan stuðul frá Almannastovuni. (*Gev gætur: møguligar treytir í samband við uppihaldsloyvið, kunnu krevja, at tú er førur fyri at uppihalda tær sjálvum uttan almennan stuðul.*)

**Meira kunning:**
**Arbeiðsloysisskipanin, www.als.fo, tlf. 349550**

## GÓÐKENNING AV ÚTBÚGVING

Hevur tú førleikar úr útlondum og ætlar at brúka teir í Føroyum, kann tað henda, at tú hevur tørv á eini almennari viðurkenning av førleikunum.

Av tí at lond hava ymiskar útbúgvingarskipanir og førleikagevandi skipanir, er tað ikki vist, at arbeiðsgevarar ella hægri útbúgvingarstovnar í útlondum viðurkenna tínar førleikar.

Viðurkenningar av útlendskum prógvum og øðrum førleikum í Føroyum eru í flestu førum tær somu sum góðkenningarnar av førleikunum í Danmark. Kunning um førleikagóðkenning í Danmark er tøk á heimasíðuni hjá Útbúgvingar- og Granskingarmálaráðnum og somuleiðis á partinum viðvíkjandi Danmark á heimasíðuni hjá altjóða stovninum, ið arbeiðir við góðkenning av prógvum, ENIC/NARIC Networks (www.enic-naric.net/denmark).

Til nøkur størv krevjast føroyskar ella danskar góðkenningar. T.d. læknar, sum hava útbúgving úr útlondum, og onnur heilsustarvsfólk mugu fáa sínar góðkenningar frá tí danska heilsustýrinum.

Hevur tú fingið prógv ella hægri útbúgving frá einum stovni, sum góðkendur er av danska útbúgvingarmálaráðnum, so er framhald av tíni úbúgving í Føroyum rættiliga einføld, um tú søkir inn á títt fakøki. Er hægra útbúgvingin, sum tú hevur tikið, ikki góðkend av danska Útbúgvingarmálaráðnum, fært tú ein lista yvir tey skeið, sum tú verður biðin um at taka til tess at lúka krøvini um góðkenning.

Er títt miðnámsskúlaprógv ikki góðkent, mást tú taka ískoytisskeið, sum kravd verða til góðkenningina. Hevur tú einki miðnámsskúlaprógv kann tað verða, at tú bæði skal taka fólkaskúlaprógv, 9. flokk, og miðnámsútbúgving fyri at lesa víðari.

Til 9. floks prógv eru eingir ensktalandi flokkar. Harafturat verður kanska eisini neyðugt hjá tær at læra teg danskt, av tí at nógv hægri úbúgvingarskeið eru grundað á danskar skúlabøkur. Tí verður mælt til, at tú hevur góða grundleggjandi fatan av føroyskum, bæði lesing og mállæru, áðrenn tú fert í holt við 9. flokk.

**Meiri kunning:**

**Útbúgvingar- og granskingarmálaráðið, Danmark, www.ufm.dk, tlf. +45 3392 9700.**

**Altjóða skrivstovan, Fróðskaparsetrið, Føroyar, www.setur.fo/ask, tlf. 292513.**

## AT FARA UNDIR EGIÐ VIRKI

Ætlar tú tær at fara undir egið virki, mást tú fyrireika teg væl. Har eru fleiri lógir og nógvar treytir, sum tú mást seta teg inn í. Hesar ásetingar eru gjørdar m.a. til at verja borgaran og arbeiðarar ímóti vánaligum reinføri og arbeiðsóhappum og eisini fyri at fyribyrgja skattaundandrátti.

Samstundis sum tað er gjørligt at søkja um fígging ella stuðul til at byrja egið virki, so er tað týdningarmikið at minnast, til at tú sjálv/ur má rinda til vælferðarskipanir – hjá vanligum lønmóttakarum er tað arbeiðsgevari teirra, sum rindar til ymsu vælferðarskipanirnar. Sum sjálvstøðugt vinnurekandi kanst tú rinda fyri vælferðartrygging hjá viðkomandi almennum stovnum. Tær fevna m.a. um sjúkradagatrygging, arbeiðsloysistrygging hjá ALS, og eisini ber til at tekna eina trygging av barsilspeningi hjá Barsilsskipanini. Fyri hesar báðar seinast nevndu er tað ein treyt, at tryggingin hevur verið virkin í minsta lagi í eitt heilt ár.

Í Føroyum eru vanlig dømi um sjálvstøðugt vinnuvirksemi matstovur, handlar, handilsfólk og sølufólk, eigarar av fiskiførum, sum fiska á føroyskum leiðum, og handverkarar.

Til ber at søkja sær ráð viðvíkjandi íverksetan, og at fara undir handilsvirki. Í Klaksvík og í Tórshavn er skipað fyri ráðgeving, sum ein kann venda sær til.

**Vilt tú hava meiri at vita, set teg í samband við Íverksetarahúsið í Klaksvík (www.is.fo), ella Hugskotið (www. hugskoti.fo) í Tórshavn.**

Tú kanst fara undir handilsvirksemi uttan vinnutal frá TAKS, eitt v-tal, ella kanst tú seta teg í samband við TAKS og søkja um eitt v-tal – fyri at fáa meiri kunning um tínar skyldur sum vinnurekandi set teg í samband við TAKS. Tú kanst eisini stovna eitt smápartafelag, her kunnu vera ávísir skattligir ágóðar. Síðan mást tú seta teg í samband við Skráseting Føroya, og tú fært meira at vita um tað á www. skraseting.fo (á enskum.).

*Vinnuframi* er grunnur, ið stuðlar tiltøkum, sum skapa ymiskleika í føroyskum vinnuhøpi og økja um nýtsluna av vitan. Grunnurin veitir stuðul til t.d. at menna vørur og tænastur, til nýskapandi verkætlanir og gransking.

# HEILSA

Hesin parturin kunnar um heilsuverkið í Føroyum, hvussu almennar heilsutænastur eru skipaðar, um *Heilsu-trygd*, og hvat tú ger fyri at sjúkramelda teg um tørvur er á tí.

# HESIN PARTURIN FEVNIR UM


Heilsutrygd . . . 42

Kommunulæknin . . . 42

Hvussu setir tú teg í samband við lækna . . . 42

Heilivágur og apotek . . . 42

KOMMUNULÆKNIN -
HVUSSU BÍLEGGI EG EINA LÆKNAVIÐTALU? . . . 43

HVØNN SKAL EG RINGJA TIL?
KOMMUNULÆKNAN, LÆKNAVAKTINA ELLA 1-1-2? . . . 44

Neyðtænastur - *1-1-2 og 1870* . . . 44

Viðgerð á sjúkrahúsið . . . 44

Barnsburður og tænastur . . . 45

Barnsburður . . . 46

Tannrøkt, sálarheilsutænasta og fysioterapi . . . 46

Barnaheilsutænastur
– ráðgeving og vitjan heima av heilsufrøðingi . . . 46

Hvat geri eg, um eg ikki fái farið
til arbeiðis vegna sjúku? . . . 47

## HEILSUTRYGD

Allir einstaklingar sum búgva í Føroyum, sum hava føroyskt persóntal, p-tal, verða av sær sjálvum  tryggjaðir undir *Heilsutrygd*.

Heilsutrygd fevnir um almenna og serfrøðiliga heilsuviðgerð og stuðul, annaðhvørt fullan ella fyri ein part fyri heilivág, tannrøkt og aðra serfrøðingaviðgerð t.d. fysioterapi, psykoterapi og fótarøkt.

Heilsutænasturnar eru fíggjaðar yvir landsskattin og við avgjaldi frá øllum íbúgvum landsins ígjøgnum Heilsutrygd.

Burtursæð frá gjaldinum til Heilsutrygd er heilsurøkt í síni heild ókeypis í Føroyum. Kortini eru nøkur undantøk í sambandi við heilivág, tannrøkt og aðra serviðgerð.

Allir íbúgvar eldri enn 18 ár rinda eitt mánaðargjald til Heilsutrygd. Gjaldið er ásett við lóg og er samansett av eini fastari upphædd og einum ávísum prosentparti av skattskyldugari inntøku. Gjaldið verður sjálvvirkandi tikið av inntøkuni, tað ger TAKS (av A-inntøku og vanligari løn), og hetta gjald kann broytast.

## KOMMUNULÆKNIN

Heilsutrygd er stovnurin, sum hevur yvirskipaðu ábyrgdina av kommunulæknunum. Tá ið tú ert skrásettur í Landsfólkayvirlitinum og hevur fingið títt p-tal, sendir Heilsutrygd tær eitt bræv um kommunulæknan, tú hevur fingið.

Uppgávan hjá kommunulæknanum er at veita vanligar medisinskar tænastur sum t.d. koppsetingar og regluligar barnaheilsukanningar. Kommunulæknin kann eisini senda teg til serlækna, um tað er neyðugt t.d. eygnalækna.

Kanna eftir í kommununi og finn adressu, upplatingartíðir, telefonnummar og nær, ið til ber at bíleggja tíð.

## HVUSSU SETIR TÚ TEG Í SAMBAND VIÐ LÆKNA?

Í vanligari arbeiðstíð kanst tú ringja til skrivaran hjá læknanum og fáa tær eina tíð til eitt viðtal. Kanska hevur tín lækni bókingartænastu á netinum (tú fært altíð eina váttan á telefonini, hevur tú brúkt online-bókingarskipan).

## HEILIVÁGUR OG APOTEK

Kommunulæknin kann skriva tær eina ávísing til tann heilivág, tær tørvar. Síðan mást tú fara á apotekið og heinta heilivágin. Læknin sigur tær, nær heilivágurin er klárur at heinta á apotekinum.

Heilivágur verður seldur á apotekum. Nakrar vørur fáast í handkeypi, og aðrar eru ávísingarheilivágur, til tær vørurnar tørvar tær læknaávísing. Onkur heilivágur er bíligari við ávísing, tí Heilsutrygd rindar ein part.

## KOMMUNULÆKNIN – HVUSSU BÍLEGGI EG EINA LÆKNAVIÐTALU?



### 1 HEVUR TÚ TØRV Á LÆKNAVIÐTALU

Uppgávurnar hjá kommunulæknanum eru almenn medisinsk hjálp, koppsetingar og regluligar barna- og heilsukanningar.



### 2 RING TIL KOMMUNULÆKNAN OG BÍLEGG TÆR TÍÐ

Ver til tíðina til viðtaluna, helst 5 min. frammanundan (ella bílegg online).



### 3 LÆKNIN KANNAR TEG

Kommunulæknaskipanin hevur ein týdningamiklan leiklut bæði í samband við sjúklingaviðgerð og sum partur av heilsuverkinum annars. Kommunulæknin kann senda teg víðari til serlækna ella útskriva ávísing um heilivág.




### 4 ÁVÍSING FRÁ LÆKNANUM

Hevur tú tørv á t.d. heilivági, skrivar læknin tær eina ávísing til tað.




### 5 HEILIVÁGUR

Tá ið tú hevur tosað við læknan, kanst tú fara á apotekið við ávísingini.

## HVØNN SKAL EG RINGJA TIL? KOMMUNULÆKNAN, LÆKNAVAKTINA ELLA BRÁÐHJÁLP 1-1-2?



**Kommunulæknin:** Tosa við kommunulæknan um øll vanlig heilsumál.




**Læknavaktin, ring 1870:** Henda tænastan er ætlað persónum, sum hava bráðtørv á læknaligari hjálp, sum kann standast av sjúku ella skaða, og sum ikki kann bíða til tú fært fatur á tínum egna kommunalækna (opið uttan fyri vanliga arbeiðstíð, um vikuskifti og í frítíð). Er tú í iva, so ring.




**Bráðhjálp, ring 1-1-2:** Í lívshóttandi og bráðfeingis støðum.

## NEYÐTÆNASTUR - 1-1-2 OG 1870

1-1-2 er neyðtelefonummarið í Føroyum. Tað má bara verða brúkt til neyðarkall, tá ið fólk eru álvarsliga skadd ella sjúk, um tørvur er á bráðviðgerð ella við lívsvanda.

1870 er telefonin til læknavaktina, og hon er opin eftir vanliga arbeiðstíð. Tørvar tær at tosa við ein lækna uttan fyri vanliga arbeiðstíð, og tú ikki kanst bíða, til læknin letur upp dagin eftir, so kanst tú ringja til læknavaktina uttan fyri arbeiðstíð. Henda landstænastan er opin aftan á vanliga arbeiðstíð frá kl. 16 seinnapart til kl. 08 á morgni og annars allar aðrar tíðir, tá ið læknahølini eru stongd. Henda tænastan er før fyri at meta um tína støðu, geva tær beinleiðis ráð ella senda lækna heim til tín ella kanska senda tey teg á sjúkrahús til kanningar.

*Læknavaktin* kann ringja til læknar í øðrum pørtum av landinum, sum eru á vakt og kunnu koyra út til sjúkling, er tørvur á tí.

## VIÐGERÐ Á SJÚKRAHÚSI

Kommunulæknin kann senda sjúkling á sjúkrahús.

Trý sjúkrahús eru í Føroyum - í Tórshavn, Klaksvík og Suðuroy.

Landssjúkrahúsið í Tórshavn er høvuðssjúkrahús. Landssjúkrahúsið viðger flestu sjúkur og skaðar, men í summum førum kann tað verða neyðugt at fáa viðgerð uttanlands.

## BARNSBURÐUR OG TÆNASTUR

Heilsutænastur, meðan gingið verður við barni og í sambandi við føðingar, eru ókeypis hjá hvørjari kvinnu, sum býr í Føroyum og hevur føroyskt persónstal, vanliga nevnt p-tal.

Konufólk, sum ikki hava p-tal, hava ikki rætt til ókeypis sjúkrahúsviðgerð, hóast tær eru giftar og eru fluttar á bústað í Føroyum. Tær fáa rokning sum útlendingar sambært serligari gjaldskipan.

Barnsburðarkanningum standa kommunulæknar og jarðarmøður fyri kring alt landið. Ultraljóðskanningar verða gjørdar, vanliga í 18. barnsburðarviku.

*Gigni* er stovnur, ið veitir heilsufrøðiliga tænastu til allar smábarnafamiljur, skúlabørn og tannáringar, og hevur heimavitjanir alla viðgonugtíðina, um fólk vilja tað, ella um familjan hevur serligan tørv. Málið er at geva komandi foreldrum vegleiðingar til at tryggja, at barnið fær eina heilsugóða byrjan í lívinum. Heilsufrøðingar, sum arbeiða hjá Gigni, standa fyri hesum heimavitjanum. Gigni hevur regluligar heimavitjanir hjá øllum nýggjum familjum í Føroyum. Høvuðsendamálið er at fremja heilsu, fyribyrgja sjúku, styrkja og menna foreldraførleikan og avdúka avbjóðingar í vælveruni hjá barninum og tess menning so tíðliga og so skjótt sum gjørligt.

Heilsusjúkrasystrar eru útbúnar innan barna- og familjuheilsu. Sjúkrasystirin er før fyri at geva hent og gagnlig ráð, skuldi tú verið í iva um okkurt, og hon hjálpir tær at síggja til, at barnið fær eina trygga og heilsugóða byrjan í lívinum.

### AT GEVA BARNINUM NAVN

Eftir at barnið er komið, hevur tú 6 mánaðir at velja tær eitt navn. Tú hevur skyldu at skráseta navnið ament hjá rætta myndugleika, áðrenn 6 mánaðamarkið. Kirkjan í tíni kommunu stendur fyri navnaskrásetingini.

Ert tú útlendskur ríkisborgari, og tú velur tær eitt navn í samsvari við reglur og siðvenju í tínum egna heimlandi, sum ikki er góðkent á navnalistanum, mást tú lata inn umsókn við skjalprógvan til Umhvørvisstovuna. **Fyri meira kunning um hesi viðurskifti, set teg í samband við Umhvørvisstovuna tlf. 342400, www.us.fo.**

Fyri meiri almenna kunning um nøvn kanst tú fara inn á heimasíðuna hjá Málráðnum. Har er m.a. ein almennur navnalisti bæði fyri mannfólka- og konufólkanøvn: www.malrad.fo.

## BARNSBURÐUR

Føðingar fara fram á sjúkrahúsi og í allarflestu førum á Landssjúkrahúsinum. Vanliga eru mamma og barn millum 2 og 5 dagar á sjúkrahúsinum eftir føðingina.

Heilsusystrar ella heilsufrøðingar kanna børnini regluliga heima upp til 18 mánaðir.

Heilsufrøðingar hjá Gigni starvast úti á skúlum kring landið og standa fyri regluligum heilsukanningum, persónligum viðtalum, foreldravegleiðing og kunning um evni, sum hava við heilsu at gera.

Kommunulæknin stendur fyri barnakanningum upp til 5 ára aldur og øllum koppsetingum.

## TANNRØKT, SÁLARHEILSUTÆNASTA OG FYSIOTERAPI

Tannrøkt fyri vaksin er arbeiði hjá tannlæknum í privatari vinnu. Heilsutrygd rindar ein part av kostnaðinum av tannrøktini.

Børn upp til 18 ár fáa ókeypis almenna tannviðgerð. Tannlæknatænastuna til børn umsita kommunurnar. Frá 18 árum og til 23 ár stendur Heilsutrygd fyri kostnaðinum, sum stendst av tannkanningum.

**Vilt tú hava kunning um ta tannlæknastovuna, sum er í tínum nærumhvørvi, set teg so í samband við kommununa.**

Sálarheilsutænastur og fysioterapi eru tøkar og virka í privatari vinnu.

Um kommunulæknin sendir teg til sálarfrøðing ella fysioterapeut, rindar Heilsutrygd 40% av kostnaðinum. Fert tú t.d. til sálarfrøðing uttan ávísing frá kommunulækna, rindar tú fullan prís. Tað sama er galdandi fyri fysioterapi, ergoterapi og aðra viðgerð.

## BARNAHEILSUTÆNASTUR – RÁÐGEVING OG VITJAN HEIMA AV HEILSUFRØÐINGI

Heilsutænastur til børn líka til tey fara úr skúlanum eru ókeypis. Málið við hesi tænastu er fyrst og fremst at stimbra heilsuna og fyribyrgja sjúku. Gigni veitir heilsurøktartænastu til familjur við smábørnum, børnum í skúlaaldri og tannáringum í Føroyum.

Heilsufrøðingar kanna børn í heimi teirra javnan, til tey eru 18 mánaðir. Heilsufrøðingar vitja familjuna og kanna barnið og geva foreldrunum góð ráð og upplýsingar um heilsu. Hetta byrjar so skjótt sum familjan er komin heim aftur av sjúkrahúsininum. Hevur barnið ella familjan serligan tørv, kunnu heimavitjanirnar hjá heilsufrøðingum halda fram til skúlaaldur, annars er tænastan tøk, tá ið biðið verður um hana ella við tilvísing frá lækna.

Foreldur og onnur, ið taka sær av børnum, hava við lóg ikki loyvi at sláa eitt barn – heldur ikki í sambandi við uppaling. Heilsufrøðingurin gevur fegin góð ráð um vegleiðing um barnauppaling.

Ein og hvør, sum flytur til Føroya við smábørnum, má seta seg í samband við heilsufrøðingin at fáa heimavitjanir og

tænastur, sum Gigni veitir. Tænastan fevnir eisini um familjur við børnum eldri enn 18 mánaðir. Foreldur eru altíð vælkomin at seta seg í samband við Gigni, vilja tey hava ráðgeving, heimavitjan o.a.

Fyri at koma í samband við  Gigni, kunnu familjur ringja til høvuðsskrivstovuna tlf. 562300 ella senda teldupost til gigni@gigni.fo. Familjum tørvar onga tilvísing at fáa ráðgeving ella heimavitjan frá Gigni.

Kommunulæknar kanna børnini upp til 5 ára aldur og koppseta sambært føstum mannagongdum. Foreldur hava skyldu at tryggja sær, at børnini koma til heilsukanningarnar.

Heilsufrøðingar á skúlum standa fyri regluligum heilsukanningum og persónligum viðtalum og geva foreldrum vegleiðing og upplýsingar.

Mælt verður til, at foreldur fylgja almennu tilmælunum um barnaheilsukanningar og koppsetingar.

Verður tað mett at vera neyðugt, so arbeiðir Gigni tætt saman við kommunulæknum, starvsfólkum á dagrøktarstovnum ella lærarum og sosialráðgevum á barnaverndarstovuni. Alt slíkt verður gjørt í tøttum samstarvi við foreldrini.

> **MINST TIL** – *TULKING*
>
> Minst til, at í sambandi við kommunulæknaviðtalu ella serlækna hevur tú rætt til ókeypis tulk, um tað skuldi verið neyðugt. Og soleiðis er eisini, tá ið tú fert til lækna við barninum.

## HVAT GERI EG, UM EG IKKI FÁI FARIÐ TIL ARBEIÐIS VEGNA SJÚKU?

Verður tú sum arbeiðstakari sjúk/ur, er kanska neyðugt at fáa eina læknaváttan. Tað kann vera neyðugt, um tú arbeiðir tímalønt og vilt hava sjúkraløn fyri mista inntøku. Ein og hvør, sum hevur verið í starvi í minsta lagi 120 tímar innan fyri seinastu 13 vikurnar, hevur rætt til sjúkradagpening frá fyrsta sjúkradegi. *Almannaverkið* umsitur lógina um sjúkradagpening. Ein umsókn má verða latin inn í seinasta lagi 60 dagar frá fyrsta fráverudegi fyri at dagpeningur kann játtast frá og við fyrsta fráverudegi

Kanska hevur tú rætt til fráveru við løn frá arbeiðsgevaranum frá fyrsta sjúkradegi. Tað veldst um arbeiðið, tú hevur.

## VIÐKOMANDI STOVNAR

Almannaverkið, www.av.fo, tlf. 360000

Gigni, www.gigni.fo, tlf. 562300

Landssjúkrahúsið, www.ls.fo, tlf. 304500

Heilsutrygd, www.heilsutrygd.fo,
tlf. 614000

# BØRN, SKÚLI OG ÚTBÚGVING

Hesin parturin snýr seg um upplýsingar um skúlaskipanina í Føroyum, um veitingar, sum foreldur hava rætt til, og hvønn tit skulu seta tykkum í samband við, um familjuni tørvar ráðgeving og hjálp.



# HESIN PARTURIN FEVNIR UM


Barsilsskipanin . . . . . . 50
Barsilspeningur útgoldin í viðgongutíðini . . . . . . 50
Barsilsfarloyvi og útgjald - til pápan og mammuna . . . . . . 51
Hvørja veiting fær barn mítt? . . . . . . 51
ÚTBÚGVINGARSKIPANIN . . . . . . 52
Dagstovnaansing . . . . . . 53
Fólkaskúli í Føroyum . . . . . . 53
Samstarv millum lærarar og foreldur . . . . . . 54
Miðnám . . . . . . 54
Maritimar útbúgvingar . . . . . . 55
Hægri útbúgving . . . . . . 55
Útbúgving til vaksin . . . . . . 55
Lektiuhjálp . . . . . . 56
Skerdur førleiki og avbjóðingar hjá ungum og børnum . . . . . . 56
Ráðgeving . . . . . . 56
Barnaverndartænastan . . . . . . 57
SKRIVSTOVURNAR KRING OYGGJANAR . . . . . . 58
Aðrir viðkomandi stovnar á barnaøkinum . . . . . . 59
Seming í sambandi við hjúnaskilnað . . . . . . 59
Kvinnuhúsið . . . . . . 59

## BARSILSSKIPANIN

Veitingar, sum eru knýttar at barnsburði, verða útgoldnar sum fíggjarligt endurgjald fyri inntøkumiss, tá ið tú ert burtur frá arbeiði, orsakað av at tú ert við barn, skalt eiga ella ættleiða. Barsilsskipanin hevur sum fremstu uppgávu at gjalda út hesar veitingar til teirra, ið hava rætt til tær. Harumframt kanst tú sum arbeiðstakari alt farloyvisskeiðið, ella part av tí, hava rætt til vanliga løn frá arbeiðsgevaranum gjøgnum sáttmálan, sum yrkisfelagið hevur við arbeiðsgevaran.

Høvuðstreytirnar fyri, at tú kanst fáa veitingina frá Barsilsskipanini, eru, at tú býrt í Føroyum, hevur fulla skattskyldu í Føroyum, og at tú tekur tær av barninum í nevnda skeiði. Harafturat mást tú hava havt inntøku (A-inntøku) seinastu 12 mánaðirnar, áðrenn barnsburðarfarloyvið byrjar (tey, ið eru sjálvstøðug vinnurekandi kunnu verða fevnd av líknandi skipan, tó undir øðrum treytum). Um tú ikki lýkur treytirnar fyri at fáa barsilsstuðul frá Barsilsskipanini, ber til at søkja um foreldrastuðul frá Almannaverkinum.

**Ert tú í iva, kanst tú seta teg í samband við Barsilsskipanina og fáa meiri kunning, www.barsil.fo, tlf. 352600.**

## BARSILSPENINGUR ÚTGOLDIN Í VIÐGONGUTÍÐINI

Tú kanst hava rætt til barsilspening, tá ið fýra vikur eru eftir til dagin, tú ert sett at eiga, ella frá tí degi, tú fært læknaváttan um at heilsan hjá tær ella barninum er í vanda orsakað av arbeiðsumstøðum tínum. Hetta ber tó bert til í mesta lagi 8 vikur frammanundan, tú ert sett at eiga.

Dømi um hetta kunnu vera: arbeiði við evnafrøðiligum tilfari, hart kropsligt arbeiði, ella aðrar umstøður, ið hava við strongd og líknandi at gera.

Rættindi tíni eru ymisk, alt eftir hvør yrkissáttmáli er knýttur at arbeiði tínum.

## BARSILSFARLOYVI OG ÚTGJALD – TIL PÁPAN OG MAMMUNA

Eftir barnsburð er hetta galdandi:

Foreldur hava rætt til 52 vikur farloyvi eftir barnsburð, men tey hava kortini ikki rætt til løn/útgjald frá Barsilsskipanini alt farloyvisskeiðið. Ert tú lønmóttakari, kann vera, at tú eitt ávíst tíðarskeið hevur rætt til farloyvi við løn frá arbeiðsgevaranum. Kanna hesi viðurskifti við at spyrja yrkisfelagið ella Barsilsskipanina.

Mamman hevur rætt til 40 vikur farloyvi næstu 44 vikurnar eftir barnsburð. Pápin hevur rætt til fýra vikur farloyvi saman við mammuni næstu 44 vikurnar eftir barnsburð.

Fyrstu 14 vikurnar er tað bara mamman, sum hevur rætt til barsilsstuðul. Síðstu 26 vikurnar av teimum 40 vikunum, hava annaðhvørt mamman ella pápin rætt til barsilssstuðul.

Veitingin frá Barsilsskipanini er grundað á miðallønina, sum er vunnin síðstu 12 mánaðirnar fyri farloyvi, tó við einum lofti, sum er 25.000 DKK um mánaðin.

Eftir lønt barsilsfarloyvi hava mamman ella pápin rætt til ólønt farloyvi upp til 52 vikur eftir barnsburðin.

Tá ið talan er um ættleiðing, hava foreldur rætt til barsilsstuðul í 48 vikur, eftir at tey hava fingið barnið. Í fýra av hesum 48 vikum ber til hjá báðum foreldrum at fáa hesa veiting.

**Meiri kunning viðvíkjandi viðurskiftum kring barsilspening fæst við at seta seg í samband við Barsilsskipanina www.barsil.fo**

## HVØRJA VEITING FÆR BARN MÍTT?

Barnastyrkur ella barnafrádráttur verður givin øllum børnum í Føroyum niðanfyri 18 ár. Veitingin, barnafrádráttur, er skattafrí og leys av foreldrainntøku og verður givin sum skattafrádráttur. Frádrátturin verður í fyrstu atløgu latin mammuni. Av tí at barnafrádrátturin lutvíst verður latin av kommunumyndugleika, kann upphæddin vera skiftandi.

Nærri kunning um barnafrádrátt fæst við at seta seg í samband við kommunu tína.

## GÓÐ RÁÐ TIL FORELDUR

### Ansingarstovnar

1. Far við barninum á stovnin og tosa við starvsfólkið. Tá ið barn byrjar á stovni, verður serligt uppmerksemi sýnt barninum, av tí at umhvørvið er nýtt. Foreldrini, ella annað teirra, mugu vera til reiðar at brúka tíð, heilar ella hálvar arbeiðsdagar, teir fyrstu dagarnar at vera saman við barni sínum á stovni.

2. Tú kanst eisini spyrja, um tú kanst vera á stovninum ein dag, um tú heldur tað vera neyðugt.

3. Sig starvsfólkunum frá, um okkurt serligt skuldi hent í familjuni, sum kann ávirka barnið.

4. Minst til klæði, ið hóska seg til alt veður

5. Lær onnur foreldur at kenna.

### Fólkaskúli

1. Ger skúlan varan við, um okkurt skuldi hent, ið hevur ávirkan á lív og umhvørvið hjá barninum.

2. Hjálp børnum tínum at møta rættstundis í skúla og far við teimum um neyðugt.

3. Børnini skulu vera við í allari undirvísing, sama hvussu veðrið er, so minst til hóskandi klæði.

4. Ver við til fundir og tiltøk á skúlanum.

5. Lær grannalagið kring skúlan at kenna.

## **ÚTBÚGVINGARSKIPAN:**
## DAGSTOVNAANSING - FÓLKASKÚLI - MIÐNÁM

**MIÐNÁM**
*Aldur: Vanliga yvir 16 ár*
Ókeypis - talan er um tvey høvuðsøki: yrkisútbúgving (4 ár) og fyrireiking til hægri útbúgving (2-3 ár)

**16** ár

**VALFRÍI 10. FLOKKURIN**
*Aldur: 16 til 17 (10. flokkur)*
Ókeypis - rættur, men eingin skylda.

*Millum framhaldsdeild og hægri útbúgving eru fleiri møguleikar í føroysku útbúgvingarskipanini. Fyri at sleppa inn á hægri lærustovn verða ávís upptøkukrøv sett.*

**13/14** ár

**FÓLKASKÚLI - 9 ÁRA KRAVD SKÚLAGONGD**
*Aldur: 7 til 15/16 (frá 1. til 9. flokk)*
Ókeypis - ein rættur og skylda.

**9** ár

**TILBOÐ EFTIR SKÚLATÍÐ**
*FRÍTÍÐARSKÚLI*
*Aldur: 7 til 9 (1. og 2. flokkur)*
Ikki ókeypis/tað stendur øllum frítt at taka av tilboðnum.

**6/7** ár

**DAGSTOVNAANSING**
*Aldur: 0-6 ár*
Gjald: Mánaðargjald (ymiskt frá eini kommunu til aðra)
Bíðilistar - treytað av myndugleika á staðnum.

**0** ár

## DAGSTOVNAANSING

Kommunurnar skipa fyri dagstovnatilboð upp til skúlaaldur. Barnaansing kann fara fram sum dagrøkt í vanligum heimi og á dagstovni. Børn við serligum tørvi fáa sernámsfrøðiligan stuðul á dagstovni. Foreldur kunnu skriva børn síni upp til ansing 6 mánaðir, áðrenn tey flyta til Føroya.

Sum foreldur hava tit rætt til at søkja um barnaansingaravsláttur. Henda avsláttrarskipan kallast *frípláss* og verður latin sambært foreldrainntøku. Mong foreldur nýta henda rætt.

Um tit eru foreldur at barni í skúlaaldri, mugu tit seta tykkum í samband við kommunu tykkara ella avvarðandi skúlaumsiting fyri at skriva barnið inn. Innskrivingin fer vanliga fram í januar, og tíð og stað verða vanliga lýst í útvarpinum. Skúlaárið byrjar í august.

Flestu kommunur hava stovnstilboð til fyrsta og annan flokk eftir skúlatíð.

Býrt tú í Tórshavn, har fleiri skúlar eru, ber til at søkja um pláss á ávísum skúla, men tað er ikki vist, at pláss er tøkt, av tí at ov mong børn búgva í umhvørvinum nær valda skúlanum. Tá ið tú skrivar børn tíni upp til stovnspláss ella skúla, eigur tú altíð at seta teg í samband við kommununa.

Børn eru nógv úti, **serliga tá ið tey ganga á dagstovni**, men eisini í skúla. Tey mugu sleppa at renna í garðinum, klintra o.s.fr. **og vera ílatin hareftir**.

## FÓLKASKÚLI Í FØROYUM

Øll børn skulu ganga 9 ár í skúla, vanliga frá 7 ára aldri til tey eru 15 ár.

Eru tit foreldur at barni í skúlaaldri, mugu tit seta tykkum í samband við kommununa ella skúlaumsitingina fyri at skriva barnið inn.

Skúlagongdin fevnir um 9 ár og eru tey kravd. 10. flokkur er valfríur.

Summir fólkaskúlar hava eisini eitt forskúlatilboð til 6 ára gomul børn.

Næmingur, sum av onkrari orsøk ikki er førur fyri at taka ímóti vanligari undirvísing við fullari úrtøku, hevur rætt til serundirvísing.

Næmingur, sum ikki hevur føroyskt sum móðurmál, hevur rætt til ískoytisfrálæru í føroyskum. Lærari og skúlaumsiting á staðnum skipa fyri hesum.

## SAMSTARV MILLUM LÆRARAR OG FORELDUR

Í fólkaskúlanum verður væntað av foreldrum, at tey samstarva við skúlan um barnið og fremjandi læring. Stórur dentur verður av tí sama lagdur á samrøðu og samskifti millum foreldur og skúla.

Vanliga hittast foreldur og lærarar, ið varða av einum flokki, eina ferð ella tvær ferðir um árið til felags foreldrafund. Harumframt býður flokslærarin foreldrunum hjá hvørjum næmingi sær til foreldraviðtalu eina ferð ella tvær ferðir um árið. Á slíkum fundum er vanligt, at lærarin kunnar foreldrini um, hvussu barnið lærir, trívist og mennist í skúlanum, og foreldrini verða spurd um teirra áskoðan á barnið og tess trivnað og menning.

Skúlin væntar, at foreldur koma til slíkar viðtalur. Foreldur fáa boð frammanundan. Tørvar tær tulk, ert tú vælkomin at seta teg í samband við skúlan frammanundan.



## MIÐNÁM

Fleiri sløg av miðnámsútbúgvingum eru í Føroyum, sum byggja víðari á tann lærdóm, fólkaskúlin gevur.

Miðnámsútbúgvingar eru annaðhvørt vinnurættaðar ella gymnasialar útbúgvingar. Til ber at nema sær miðnám á fimm ymsum støðum í Føroyum. Miðnám er vanliga ætlað ungum lesandi millum 16 og 19 ár, og verða eisini kallaðar ungdómsútbúgvingar, men fyrireiking til hægri lestur fyri vaksin er eisini partur av miðnámi.

Miðnámsprógv útskrivað í Føroyum hevur sama virði sum miðnámsprógv í donsku skúlaskipanini.

Gymnasialt miðnámsprógv á miðnámi, handilsskúla og tekniska skúla veitir atgongd til framhaldslestur og hægri útbúgving.

**Vilt tú hava meira at vita um útbúgving í Føroyum, kanst tú eisini fara inn á heimasíðuna hjá Føroya Ungdómsráð: www.les.fo**
**Altjóða skrivstovan á Fróðskaparsetri Føroya: www.setur.fo/ask - tlf. 292513**

## MARITIMAR ÚTBÚGVINGAR

Føroysku sjóvinnuútbúgvingarnar byggja á altjóða krøv og eru IMO-góðkendar. Tveir skúlar eru, ið standa fyri sjóvinnuútbúgvingum. Ein kann har útbúgva seg til maskinist, maskinmeistara, skipara ella skipsførara.

**Vinnuháskúlin www.vh.fo – tlf. 350250**

**Sjónám, www.sjonam.fo – tlf. 665888**

## HÆGRI ÚTBÚGVING

Fróðskaparsetur Føroya býður út hægri útbúgvingar. Fróðskaparsetrið hevur tvær megindeildir, og til ber at fáa prógv á bæði bachelor- og masterstigi í fleiri lærugreinum.

Á Føroya Handilsskúla í Tórshavn, sum er partur av Glasi, verða akademiskar vinnuútbúgvingar bjóðaðar til ung, vaksin og fyritøkur.

**Fróðskaparsetur Føroya www.setur.fo**

**Føroya Handilsskúli/Glasir í Marknagili www.fh.fo (partur av miðnámskúladeplinum, Glasir, www.glasir.fo)**

## ÚTBÚGVING TIL VAKSIN

Á kvøldskúla ber til at fáa undirvísing og taka fólkaskúlaprógv í kravdum lærugreinum so sum føroyskum, donskum, støddfrøði og enskum. Tá ið ein hevur staðið hesar próvtøkur, ber til at halda fram at útbúgva seg, t.d. á gymnasialum miðnámi.

Tað ber eisini til at taka prógv í summum lærugreinum á gymnasialum miðnámi gjøgnum kvøldskúlaskipanina.

Hesi skeið eru ikki ókeypis.

## LEKTIUHJÁLP

Lektiuhjálp kann vera tænasta, sum tín kommuna hevur í boði á bókasavninum á staðnum.

Í Tórshavn stendur henda tænasta miðnámsnæmingum í boði umframt teimum eldru næmingunum í fólkaskúlanum.

Í Fuglafirði er lektiuhjálp at fáa á bókasavninum tveir dagar um vikuna. Henda hjálp er ætlað teimum eldru næmingunum í fólkaskúlanum. Næmingar fáa hjálp við serligum uppgávum og vanligum skúlatingum. Foreldur eru vælkomin at vera við. Hetta tilboð er til øll í kommununi og er eisini ætlað og nýtt sum eitt tilboð til næmingar við útlendskari bakgrund.

## SKERDUR FØRLEIKI OG AVBJÓÐINGAR HJÁ UNGUM OG BØRNUM

Um barnið hevur skerdan førleiki, ella um tú stúrir fyri menning og trivnaði hjá barninum, ber til at venda sær til Sernám; hetta er somuleiðis galdandi fyri foreldur, ung og yrkisfólk í arbeiði á barnaøkinum. Sernám arbeiðir fyri, at børn og ung í aldrinum 0 til 18 ár eru tryggjað at sleppa at menna og betra sínar førleikar. Sernám hevur fakkunnleika innan talu- og hoyrn; fysio- og ergoterapi; námsfrøði og sálarfrøði.

Foreldur kunnu seta seg beinleiðis í samband við Sernám. Er talan um samband við Sernám í longri tíð, mást tú fylla út oyðiblað ella fáa ávísing frá kommunulækna.

**Nærri kunning: www.sernam.fo, tlf. 360200**

## RÁÐGEVING

Gigni, veitir børnum, ungum og foreldrum hjálp og ráðgeving í málum, sum snúgva seg um heilsu og eisini trivnað hjá børnum.

Heilsufrøðingur umboðar Gigni á hvørjum skúla, og umframt at hava næmingar til árliga heilsukanning, undirvísir Gigni í evnum, sum snúgva seg um heilsu og trivnað. Virksemið hjá Gigni úti á skúlunum hevur til endamáls at fyribyrgja óheppin árin á trivnaðin hjá børnum og ungum. Allir næmingar fáa tilboð um persónliga samrøðu við heilsufrøðing í minsta lagi eina ferð um árið.

Samband fæst við Gigni gjøgnum skúlan ella við at ringja ella senda teldupost beinleiðis til Gigni á høvuðsskrivstovuni í Havn. Ráðgevingin er ókeypis og kann fáast í lag á skrivstovuni hjá heilsufrøðingin á skúlanum ella heima við hús hjá familjuni.

Børn, ung og familjur teirra kunnu fáa rætt til víðkaða ráðgevingartænastu, um serligur tørvur stingur seg upp. Dømi um slíkt kundi verið: børn og ung við lágum sjálvsvirði, skerdum førleika, atferðartrupulleikum, ella tá ið

foreldur verða sundurlisin ella skild, tá ið alkolholmisnýtsla er har heima, tá ið kreppa rakar umhvørvið hjá barninum við sjúku, deyða ella fíggjarligum trupulleikum, ið hava árin á barnið og hin unga.

Leggjast skal afturat, at um familjutrupulleikar eru, ella um mamman er fyri harðskapi í heiminum og hugsar um at fara á Kvinnuhúsið, so kann hon altíð venda sær til Gigni og fáa ráðgeving og leiðbeining.

**Meiri fæst at vita á heimasíðuni hjá Gigni: www.gigni.fo, ella tlf. 562300**

## BARNAVERNDARTÆNASTAN

Lógin um barnavernd staðfestir, at myndugleikarnir skulu altíð fyrst og fremst veita loysnir, sum tæna barninum best, tá ið barnsins heilsa og trivnaður eru í vanda.

*Barnaverndartænastan* í Føroyum er býtt í 8 øki við hvør sínari skrivstovu, sum øll virka undir Barnaverndarstovuni.

Høvuðsuppgávan hjá Barnaverndartænastuni í Føroyum er at stuðla foreldrunum, so tey fáa givið børnum sínum best møguliga uppaling.

Starvsfólk hjá Barnaverndartænastuni stuðla og hjálpa børnum og familjum á ymsan hátt. Flestu barnaverndarmál verða loyst í góðum samstarvi við foreldur ella verjar. Barnaverndartænastan í Føroyum hjálpir á leið 850 børnum um árið.

*Ein og hvør hevur skyldu til sambært lóg at boða frá á skrivtovuni hjá Barnaverndartænastuni, um illgruni er um likamligan, sálarligan ella kynsligan harðskap móti barni.*

Barnaverndartænastan hevur eisini til uppgávu at hjálpa børnum, sum hava tað heldur trupult.

Barnaverndartænastan metir í hvørjum føri sær, um barninum tørvar hjálp. At fáa hjálp frá Barnaverndartænastuni er ikki ein givin rættur. Føroysk lóg staðfestir, at Barnaverndartænastan kann koma upp í leikin, um illgruni er um, at barnið ikki hevur tað gott við hús. Í einstøkum føri, til dømis um heilsa og trivnaður hjá barninum eru í vanda, kann Barnaverndartænastan seta barnið heiman; vanliga til eina fosturfamilju ella á stovn fyri børn og ung. Um foreldrini ikki taka undir við, at barnið verður sett heiman, hava tey rætt til rættarhjálp. Málið verður tá lagt fyri Høvuðsbarnaverndartænastuna at avgreiða.

**Nærri kunning: Barnaverndartænastan, www.bvs.fo, tlf. 302480.**

Barnaverndarstova Føroya



**NORÐOYGGJAR OG KLAKSVÍK**
Skrivstovutíð: 10.00-16.00 ☎ 410000
☎ **BRÁÐLINJA** - UTTAN FYRI ARBEIÐSTÍÐ: **219181**

**EYSTURKOMMUNA OG FUGLAFJØRÐUR**
Skrivstovutíð: 9.00-15.00 ☎ 238055
☎ **BRÁÐLINJA** - UTTAN FYRI ARBEIÐSTÍÐ: **238059**

**ØKIÐ KRING SKÁLAFJØRÐIN**
Skrivstovutíð: 9.00-15.00 ☎ 417000
☎ **BRÁÐLINJA** - UTTAN FYRI ARBEIÐSTÍÐ: **237090**

**NORÐSTREYMOY OG NORÐARI PARTUR AV EYSTUROYNNI**
Skrivstovutíð: 9.00-16.00 ☎ 667271
☎ **BRÁÐLINJA** - UTTAN FYRI ARBEIÐSTÍÐ: **297200**

**TÓRSHAVN OG SUÐURSTREYMOY**
Skrivstovutíð: 9.00-15.00 ☎ 302060
☎ **BRÁÐLINJA** - UTTAN FYRI ARBEIÐSTÍÐ: **216012**

**VÁGOY**
Skrivstovutíð: 10.00-15.00 ☎ 344430
☎ **BRÁÐLINJA** - UTTAN FYRI ARBEIÐSTÍÐ: **344430**

**SANDOY, SKÚVOY OG STÓRA DÍMUN**
Skrivstovutíð: 8.00-12.00 ☎ 361024/288024
☎ **BRÁÐLINJA** - UTTAN FYRI ARBEIÐSTÍÐ: **281024**

**SUÐUROY**
Skrivstovutíð: 10.00-16.00 ☎ 611090
☎ **BRÁÐLINJA** - UTTAN FYRI ARBEIÐSTÍÐ: **283033**

## AÐRIR VIÐKOMANDI STOVNAR Á BARNAØKINUM

Annar viðkomandi myndugleiki ella stovnur, ið ansar eftir barnarættindum og vælferð hjá børnum, er Barnanna Umboðsmaður og Barnabati. Barnanna Umboðsmaður er stovnur, sum børn og vaksin kunnu venda sær til, um tey halda eitt barn ikki vera væl viðfarið av almennum stovni ella øðrum myndugleika. Eitt dømi kann vera, at ein kann kæra ein skúla ella annan myndugleika, sum ikki hevur viljað hjálpt tær og barni tínum. Tú kanst ikki kæra til Umboðsmannin um rættarúrskurð ella um foreldur og vinir o.t. Um skrivstovan hjá Barnanna Umboðsmanni ikki fær hjálpt tær, kann hon í flestum førum vísa tær á rætt stað at fara.

Barnabati hevur eina hjálparlinju, ið eitur Tú-og-eg-Ráðgevingin. Henda tænasta er tøk umvegis telefon, sms-tænastu og privat kjattprát. Ert tú barn, kanst tú nýta hesa tænastu í sambandi við allar teir trupulleikur, tú hevur sum barn. Hjálpin er ókeypis, og tú kanst ringja ella skriva uttan at upplýsa navn. Beinleiðis linjan er opin tvey kvøld um vikuna.

**Vil tú vita meira um ávikavist Barnanna Umboðsmann og Barnabata, kanst tú fara á heimasíðurnar www.bum.fo og www.barnabati.fo**

## SEMING Í SAMBANDI VIÐ HJÚNASKILNAÐ

Tá ið talan er um hjúnaskilnað ella at foreldur fara hvør til sítt, er Ríkisumboðið viðkomandi myndugleiki at seta seg í samband við. Semingartilgongd kann verða sett í verk við atliti at foreldraábyrgd, barnsins støðu í komandi tíðum, hvar barnið skal búgva, og samveru. Ríkisumboðið kann bjóða barnaserkøna ráðgeving og semingsroyndir, tá ið partarnir ikki eru samdir um foreldramyndugleika, samveru og líknandi.

Tá ið talan er um hjúnaskilnað ella trupulleikar í familjuni, ber eisini til at fáa ráðgeving frá Gigni.

## KVINNUHÚSIÐ

Kvinnuhúsið í Havn hjálpir kvinnum, sum eru fyri harðskapi í egnum heimi. Kvinnuhúsið veitir eisini kvinnum/børnum í kreppustøðu fyribils innivist.

Kvinnuhúsið er staðið, tú vendir tær til, um tú ert offur fyri harðskapi, ella um tú veitst um onkra aðra í teirri støðu. Kvinnuhúsið leiðbeinir og ráðgevur teimum, sum eru offur fyri harðskapi, misnýtslu, hóttan o.s.fr.

Kvinnuhúsið í Havn er opið allar gerandisdagar frá klokkan 10.00 til 17.00. Øll, sum venda sær til Kvinnuhúsið, kunnu líta á, at tosað verður í trúnaði. Kvinnuhúsið hevur atgongd til tulkatænastu.

**Nærri kunning fæst á www.kvinnuhusid.fo, bráðlinja: 317200**

# FERÐAFÓLKAFLUTN-INGUR OG AÐRAR TÆNASTUR

Hesin parturin fevnir um útlendskt koyrikort og skráseting av bili. Eisini fæst at vita, um tað at eiga og koyra bil í Føroyum, og hvussu almenna samferðslan er skipað. Aðrar tænastur, banka- og samskiftistænastur, eru eisini lýstar.

# HESIN PARTURIN FEVNIR UM


Samferðsla . . . 62

SKRÁSETING, AKFØR . . . 63

Eftirlit, lógir um akfør og skyldur . . . 65

Freistir og tíðarskeið á árinum . . . 66

Tá ið reglur og ásetingar verða brotnar . . . 66

FERÐSLUREGLUR . . . 67

Tunnilsgjald fyri undirsjóvartunnil . . . 69

Almenn samferðsla - bussar og ferjur . . . 69

Bankatænastur . . . 70

Telefon og internet . . . 70

Føroyska sjónvarpið . . . 70

Posttænasta . . . 71

Kelidjór . . . 71

## SAMFERÐSLA

Vegirnir eru lívæðrin í flutningskervinum í føroyska samfelagnum. Vegir knýta 87% av fólkinum saman. Hóast almenna samferðslan er væl skipað, og fitt av fólki eru bundin at hesi tænastu (fyri at møta rættstundis til arbeiðis o.s.fr.), so koyra flestu føroyingar heldur í egnum bili.

### *Fái eg brúkt mítt koyrikort?*

Koyrikort, sum eru útskrivað í Norðurlondum og ES-londum (og londum, sum hava viðurkent ásetingarnar hjá ES um góðskriving av koyrikorti), eru galdandi í Føroyum. Fólk, sum hava koyrikort úr einum av nevndu londum, kunnu skifta til føroyskt koyrikort uttan at fara til koyriroynd. Tað er tó ikki kravt, at koyrikortið skal verða skift um, tá ið tað er útskrivað í einum av nevndu londum.

- Fyri at kunna skifta um koyrikort skal útlendska koyrikortið hava gildi

- Tú mást fylla út umsóknarblað og útvega øll kravd skjøl fyri at kunna skifta frá útlendskum koyrikorti til føroyskt

Fólk við koyrikorti, sum er útskrivað í landi uttan fyri ES og Norðurlond, mugu skifta til føroyskt koyrikort, um tey ætla sær at vera her longri enn 90 dagar.

Útlendskt koyrikort hevur gildi í 90 dagar. Áðrenn koyrikortið verður skift um, má ein fara upp í koyring av nýggjum.

Skjøl, sum tú mást lata málsviðgeranum á Akstovuni, eru hesi:

- Útlendskt koyrikort, sum hevur gildi
- Umsóknarblað
- Samleikaprógv, - t.d. ID-kort ella pass
- Passmynd (mynd, sum lýkur krøvini til pass)
- Heilsu- ella læknaváttan (ikki eldri enn 3 mánaðir)
- Kvittan fyri koyriroyndina (íroknað teori og koyring), DKK 550
- Tryggingarkostnaður fyri koyrikortið, DKK 250
- Uppihaldsloyvi ella prógv um lógligt uppihald (um umsøkjarin ikki er norðurlendskur ríkisborgari)

Er tørvur á tulki til royndina, ber til at fáa tað í lag. Í slíkum føri mást tú gera Akstovuna varuga við tað skjótast til ber. Akstovan tekur sær av tulking, men tú mást bera kostnaðin.

**Meiri kunning fæst við at venda sær til Akstovuna: Akstovan, www.akstovan.fo, tlf. 350400**

### *Billán*

Flestu bankar veita billán fyri heldur hægri rentu enn fyri húsalán. Ofta verður kravt, at eini 20 til 30 prosent av keypskostnaðinum verða útgoldin.
Bankin kann veita lán, um kundin hevur regluliga inntøku og góðar fíggjarligar umstøður.
Í slíkum málum geva bankarnir fegnir ráð og leiðbeining.

# SKRÁSETING Á FYRSTA SINNI AV INNFLUTTUM, BRÚKTUM BILI

### 1. ÁÐRENN AKFAR KEMUR TIL FØROYA OG VERÐUR FLUTT INN

Spyr avvarðandi myndugleikar, hvar bilurin verður skrásettur, um útflutningsavmarkingar eru, og hvat tað á leið kostar.

### 2. TÁ IÐ AKFARIÐ KEMUR TIL FØROYA – VEND TÆR TIL TOLL-MYNDUGLEIKARNAR

Innflutningsgjald skal verða goldið tollmyndugleikunum, eisini MVG. Um akfarið er framleitt í ES, kanst tú sleppa undan GATT-tolli. Í slíkum føri skalt tú skjalprógva hetta við upprunaváttan frá seljara, sum hevur stempul frá tollmyndugleikunum í nevnda landi.

### 3. TRYGGING FRÁ FØROYSKUM TRYGGINGARFELAG

Tryggingarveitarin boðar Akstovuni frá, tá ið bil- ella akfarstryggingin er komin í gildi (p-tal er kravt).

### 4. SKJØL OG OYÐIBLAÐIÐ UM SÝN, *FRÁBOÐAN TIL SÝN*

Brúka oyðiblaðið *Fráboðan til sýn*, tá ið tú fert til sýn á Akstovuni, og hav øll neyðug skjøl við tær til málsviðgeran á Akstovuni. Gjøld skulu vera avgreidd, áðrenn viðgerðin kann enda.

### 5. SÝN OG SKRÁSETING

Tá ið øll sýn eru avgreidd og øll gjøld avgreidd, er skrásetingin í lagi, og føroysku nummarpláturnar verða útflýggjaðar.

### 6. RINDA HÁLVÁRLIGT VEKTGJALD/ UMHVØRVISGJALD

Tá ið akfarið er skrásett, fært tú rokning fyri vektgjald/umhvørvisgjald hvørt hálvár.

**Minst til,**
at tú kann verða undantikin, um tú flytur inn bilin sum flytigóðs, tá ið tú flytur til Føroya (les eisini í tí partinum, sum eitur *At flyta til Føroya*).

***Hvussu skráseti eg bilin?***
Øll motorakfør, sum verða nýtt í Føroyum, skulu verða skrásett á Akstovuni (ferðafólk eru undantikin hesi reglu).

Øll, sum flyta til Føroya og hava útlendskan bil við sær, skulu skráseta bilin á Akstovuni í seinasta lagi tvær vikur eftir, at tey eru skrásett hjá avvarðandi myndugleika við føstum bústaði í landinum. Útlendsku nummarpláturnar verða skiftar um við føroyskar nummarplátur, tá ið málsviðgerðin endar.

Mælt verður altíð til at seta seg í samband við Akstovuna fyri at spyrja um skrásetingarkostnaðin og annað, áðrenn bilurin kemur til landið. Skrásetingarkostnaðurin kann vera rættiliga stórur – slag av bili og aldur á bili kann føra til ein høgan kostnað.

Tá ið tú á fyrsta sinni skrásetur ein brúktan innfluttan bil, er hetta galdandi:

Tá ið bilurin kemur, skalt tú venda tær til tollmyndugleikarnar, TAKS, at fáa neyvari leiðbeining. Mælt verður til at hava øll neyðug papír í lagi skjótast gjørligt, - íroknað frámeldingarváttan og upprunaliga skrásetingarskjalið. Eftir tollavgreiðslu verður mælt til at seta seg í samband við Akstovuna at fáa leiðbeining um, hvat tú so skalt gera. Tú verður biðin um at fylla út skjøl viðvíkjandi sýn av bili og lata inn skjøl. Hetta fevnir eisini um skjøl úr tí landi, har akfarið var skrásett.

Akstovan kannar og góðkennir akfarið, og tú rindar fyri skráseting, nummarplátur, skrásetingarsýn og eitt umhvørvisgjald, ið m.a. tekur støði í útlátinum av $CO_2$. Áðrenn akfarið verður skrásett í landinum, skal tað eisini vera ábyrgdartryggjað.

Akfarið kann bara vera skrásett, um eigarin (tann, ið brúkar akfarið), sum bað um at fáa akfarið sýnað, er fluttur til Føroya og er skrásettur við lógligum bústaði.

Skrásetingarkostnaðurin kann hækka munandi, um akfarið er 5 ár ella yngri.

***Kravd skjalprógvan:***
Akfarseigarin hevur skyldu til at útvega skjøl, sum prógva upprunavirðið á bilinum, annaðhvørt frá bilframleiðara ella góðkendum umboðsmanni.

Viðurkend skjalprógv viðvíkjandi upprunavirði á akfarinum mugu verða fingin til vega:

- Upprunarokning við nummari á bilslagi/nummari á akfarsváttan frá framleiðaranum, ella
- Upprunavirðið á nevnda akfari frá góðkendum umboðsmanni

Farmakostnaður verður lagdur afturat upprunavirðinum á akfarinum fyri at rokna út skrásetingargjaldið.

Kravdu skjølini eru hesi:

- *Fráboðan um sýn*, oyðiblað viðvíkjandi sýni í Føroyum
- Upprunaliga útlendska skrásetingarskjalið (viðvíkjandi ognarskapi og tøkniligum smálutum)
- Avrit av rokning til tín, sum flytur inn bilin, frá útlendska framleiðaranum ella umboðsmanninum
- Farmabræv ella rokning (íroknað nummar á farmabrævi)
- MVG-kvittan frá tollmyndugleikunum

Týdningarmikið er, at tú kunnar teg um galdandi reglur, áðrenn tú flytur inn ella brúkar akfar, sum er skrásett í útlandinum. Um tú brýtur reglurnar, t.d. tí tú ikki skrásetur akfarið eftir tveimum vikum, tá ið tú hevur skrásett teg hjá

kommununi við p-tali, er vandi fyri bót frá løgregluni, ella at hald verður lagt á útlendsku nummarpláturnar.

***Trygging***

Biltrygging kann vera ein samanrenning av fleiri einstøkum tryggingum.

Ábyrgdartrygging er trygging, sum allir bileigarar skulu hava, so hon er ikki valfrí. Tryggingin fevnir um alt slag av skaða ella løsti, sum fólk ella lutir fáa orsakað av bilinum. Tá ið tú skrásetur bil í Føroyum, mást tú ábyrgdartryggja hann eisini.

Trygging, sum fevnir um annan skaða á egnan bil, er valfrí.

Tveir tryggingarveitarar eru í Føroyum:

Tryggingarfelagið Føroyar, www.trygging.fo, tlf. 345600

Trygd, www.trygd.fo, tlf. 358100



### UM TALAN ER UM LÍTIÐ FERÐSLUÓHAPP OG SMÁSKAÐA

Um talan er um lítið ferðusluóhapp ella smáskaða, er meginreglan tann, at báðir bilførarar koma ásamt um eina loysn. Teir skulu upplýsa hvør øðrum navn, telefonnummar og nummarplátu.

Um bileigari, sum hevur fingið onkran smáskaða á sín bil, ikki er til at fáa fatur á, ber til at fáa hjálp frá løgregluni. Ring og bið um hjálp. Eisini kunnu eini boð við telefonnummari leggjast á hin bilin. Ábyrgdartryggingin hjá hvørjum einstøkum bileigara tekur við í allarflestu førum, tað rætta at gera í slíkum føri er at seta seg í samband við eigaran ella kunna løgregluna.

Er talan um ósemju millum bilførarar, ella um skaðarnir eru umfatandi, ella um bara okkurt ivamál er, eigur løgreglan at verða boðsend.

*Minst til*: Er talan um brot á ferðslulógina, skal løgreglan altíð verða boðsend.

## EFTIRLIT, LÓGIR UM AKFØR OG SKYLDUR

Øll vanlig motorakfør, rinda vektgjald tvær reisir um árið. Upphæddin er treytað av vekt á akfari, og hvat slag av brennievni tað brúkar. Akfør, ið verða skrásett eftir 1. januar 2017 gjalda eitt umhvørvisgjald, ið m.a. tekur støði í $CO_2$-útlátinum.

Frá 1. desembur til 30. apríl eru summardekk (slitlagið skal í minsta lagi vera 1,6 mm) einans loyvd, um koyrilíkindini eru til tað. Í hesum tíðarskeiði eru vetrardekk ella píkadekk við trimum millimetra slitlagi kravd sambært lóg, tá ið veðrið ikki er til annað. Við øðrum orðum: bilførarar, sum fara skeivir í síni meting um koyrilíkindini og hartil hóskandi dekk, bróta ferðslulógina.

Reglulig teknisk sýn á øðrum hvørjum ári eru kravd. Akstovan sendir eigaranum bræv við fráboðan um sýn, og upplýsir tíð og stað. Sýnsgjaldið er íroknað vektgjaldið ella umhvørvisgjald. Endamálið við sýni er at tryggja, at bilurin lýkur allar ásetingar og er í hóskandi standi.

***Stutt uppihald - akfarsskráseting***

Útlendingar, sum hava akfar skrásett í útlandinum og bert ætla at vera í

Føroyum styttri enn eitt ár, kunnu aloftast nýta akfarið uttan at skráseta tað í Føroyum. Hetta er tó eingin regla, og tí er týdningarmikið at fáa serligt loyvi frá Akstovuni. Eingin, sum býr í Føroyum, skal í slíkum førum brúka akfarið, eins og tað heldur ikki skal verða nýtt til vinnuligan flutning.

## FREISTIR OG TÍÐARSKEIÐ Á ÁRINUM

Loyvt er at nýta píkadekk millum 15. oktobur og 1. mai.

Freistir fyri vektgjald: 2. januar og 1. juli (um rokningarnar ikki eru goldnar eftir tvær áminningar, fær løgreglan fráboðan og klippir nummarpláturnar)

Frá 1. desembur til 30. apríl eru summardekk einans loyvd, um veðrið er til tað. Í hesum tíðarskeiði eru vetrardekk og píkadekk við í minsta lagi trimum millimetra slitlagi kravd sambært lóg, tá ið veðrið ikki er til annað. Við øðrum orðum: bilførarar, sum fara skeivir í síni meting um koyrilíkindini og hóskandi dekk, bróta ferðslulógina.

## TÁ IÐ REGLUR OG ÁSETINGAR VERÐA BROTNAR

Ferðslulógin í Føroyum eru ógviliga strong. Løgreglan ger regluligar ferðslukanningar á føroysku vegunum. Serligur dentur verður lagdur á ferðmátingar, einstakar rúsdrekkakanningar (bæði fyri rúsdrekka og onnur rúsandi evni), atburð í ferðsluni, og at verndarútgerð so sum trygdarbelti og barnastólar verður nýtt. Brot á ferðslulógina, t.d. við at koyra ov skjótt ella ávirkað/ur, kann verða hart revsað við bót, mistum koyrikorti og í álvarsligari førum enntá fongsling.

Ein sokallað klippikort-skipan er sett í verk viðvíkjandi koyrikorti. Hetta er ein revsiskipan í mun til títt koyrikort. Løgreglan kann geva tær klipp í koyrikortið hvørja ferð, tú brýtur ferðslulógina (álvarsliga). Revsitiltøkini eru í samsvari við klippini. Trý klipp í kortið eftir trimum árum elvir til treytaða frádøming av koyrikortinum.

Klippikortskipanin er strangari fyri bilførarar fyrstu trý árini eftir at teir hava fingið koyrikort. Høvuðsendamálið við hesi skipan er at læra og ávara bilførarar ímóti vandamiklari koyring.

## FERÐSLUREGLUR



Tað er kravt at brúka trygdarbelti, eisini á baksetrinum. Børn verða íbundin í barnastóli ella barnalyftu, ið hóskar til teirra aldur og hædd.




Ásetta alkoholpromillan, tá ið tú koyrir, er 0,2 mg/ml.



Bilførarar skulu altíð hava koyrikort, skrásetingarskjal og ávaringartríkant í bilinum, tá ið teir koyra.



Tað er bannað at nýta handhildna fartelefon, tá ið tú koyrir.




Hámarksferðin er 50 km/t í bygdum øki og 80 km/t uttan fyri bygt øki, uttan so at vegskelti tilskila nakað annað.




Dagførd kunning um veður og koyrilíkindi í ymsu pørtunum av landinum fæst við at fara inn á www.landsverk.fo or call 340800.

### TÁ IÐ TALAN ER UM FERÐSLUÓHAPP

- Kemur tú til eitt ferðsluóhapp, skalt tú steðga og hjálpa til og tryggja vanlukkustaðin.
- Persónar, sum onkursvegna eru partur av ferðsluóhappi, hava skyldu at útflýggja navn, bústað og koyrikortnummar
- Er talan um deyða ella álvarsligan løst, skal løgreglan fáa boð um tað við at ringja til alarmsentralin á 112. Í slíkum vanlukkum skulu akfør bara verða flutt við loyvi frá løgregluni

## TÁ IÐ REGLUR OG ÁSETINGAR VERÐA BROTNAR - *FRAMHALD*

Fært tú klipp í kortið í sambandi við eina ferðsluvanlukku, ella at lív og heilsa hjá øðrum var í váða, kann rætturin frádøma tær koyrikortið.

Smærri og álvarsligari brot á ferðslulógina verða revsað ymiskt:

**Bót**
Tú fært bót fyri at parkera ólógliga, fyri ikki at koyra íbundin, at tosa í telefon, meðan tú koyrir, o.s.fr. Bótin verður send við postinum. Bótin skal verða goldin sambært leiðbeiningini í brævinum.

**Klipp í kortið og bót**
Eitt klipp í revsing er ásett, tá ið bilførarin viðgongur brotið á staðnum. Dømi: koyrt 21 km/t meira enn loyvt er, um barnið ikki er nóg væl íbundin í barnastólinum ella barnalyftuni, koyrt í skeivari síðu ella á einvegis gøtu ímóti mótkoyrandi ferðslu o.s.fr. Klipp verða altíð givin saman við eini bót. Ein viðmerking um klippið verður skrivað á bótina, sum bilførarin fær sendandi.

**Fráboðan um revsing**
Er talan um álvarslig brot á ferðslulógina, fær bilførarin bót, og kann ákærumyndugleikin fáa málið fyri rættin. Dømi: koyrt út av lagi skjótt, koyrt fyri reyðum ljósi, hættislig yvirháling, um akfarið hevur elvt til vanda í ferðsluni o.s.fr. Klipp verður givið fyri slík brot. Kemur ein fyri rættin, verður ein úrskurður gjørdur.

**Treytað og treytaleys fongsulsrevsing**
Um bilførari verður ákærdur fyri álvarslig lógarbrot, so sum at koyra ávirkaður, at elva til mannskaða orsakað av ov nógvari ferð, so kann viðkomandi fáa boð um at møta í rættinum. Bilførari kann fáa dóm um bót og klipp í koyrikortið.

**Frádøming av rættinum at koyra bil**
Løgreglan kann taka koyrikortið frá persóni, um hann hevur koyrt skilaleyst, ella um hann hevur gjørt seg sekan í álvarsligum lógarbroti, t.d. við at koyra ávirkaður, koyra ov skjótt, vera partur av samanstoyti ella ferðsluóhappi.

**Vilt tú vita meir um ferðslureglur, skalt tú seta teg í samband við løgregluna. Harumframt kanst tú venda tær til Ráðið fyri Ferðslutrygd, sum virkar fyri at betra um ferðslutrygd, www.rff.fo, tlf. 220064.**

## TUNNILSGJALD FYRI UNDIRSJÓVARTUNNIL

Tveir undirsjóvartunlar eru, ein gjaldskipan er knýtt at báðum.

Tú mást gjalda tunnilsgjald, tá ið tú koyrir gjøgnum undirsjóvartunlarnar. Tunnilsgjaldið verður goldið á annaðhvørt eini Magn- ella Effostøð, innan tríggjar dagar, eftir at tú ert farin gjøgnum tunnilin. Ein sjálvvirkandi myndaskráseting av nummarplátuni ger at rokning verður send til bústaðin hjá bilførararanum/ bileigaranum. Ein avsláttarskipan er eisini tøk.

**Nærri kunning um avsláttrarskipan og annað fæst við at venda sær til skrivstovuna:**
**Tunnil, www.tunnil.fo, tlf. 350200**

## ALMENN SAMFERÐSLA – BUSSAR OG FERJUR

Føroyar hava eina væl útbygda almenna samferðslutænastu við bussum og ferjum, sum sameina oyggjarnar. Tyrlutænastan knýtir útoyggjarnar saman við restina av landinum.

Býir og bygdir eru knýttar at hvør øðrum við almenna samferðslukervinum. Strandfaraskip Landsins, sum almenna flutningstænastan eitur, hevur ábyrgd av bæði bussleið og sigling.

Í Tórshavn og Klaksvík eru býbussarnir ókeypis. Kommunan rekur hesa koyring.

Atlantic Airways tekur sær av tyrlutænastuni.

**Meiri kunning:**

**Strandfaraskip Landsins, www.ssl. fo, rutuupplýsing svarar allar dagar alt samdøgrið, tlf. 343030**

**Atlantic Airways, www.atlantic.fo, tlf. 341000**

**Vága Floghavn, www.fae.fo, tlf. 354400**

Regluligt loft- og sjóvegis samband (bilferjur og farmaskip) føra fólk og farm út í heim og aftur alt árið.

***Serligur flutningur fyri fólk við skerdum førleika***

Um tað ikki ber tær til at nýta vanligu almennu flutningstænastuna orsakað av sjúku ella breki í longri ella styttri tíð, kanst tú søkja um at fáa serflutningstænastu.

Tænastuna veita kommunurnar í Klaksvík, Eysturoynni og Tórshavn.

Vilt tú vita meir, kanst tú seta teg í samband við kommunuskrivstovuna í tínum bústaðarøki.

## BANKATÆNASTUR

***Hvussu fái eg stovnað bankakontu til løn og annað? Hvørjar møguleikar havi eg? Hvørjum skjølum havi eg tørv á?***

Tú mást hava føroyskt p-tal, fyri at stovna kontu í føroyskum banka. Bankin hevur løgfrøðiliga skyldu at kanna eftir og fáa til vega avrit av løggildum samleikaprógvi frá hvørjum einstøkum persóni, ið stovnar kontu, t.d. pass ella ES-koyrikort.

Nógv útgjøld sum løn, almannaveitingar, pensjón og avlopsskattur verða flutt á kontu. Tí er neyðugt at hava bankakontu.

Føroyskir bankar kunnu hjálpa tær við at stovna fastar flytingar og gjaldsavtalur og annað.

Við slíkum tænastum kanst tú tekna sjálvvirkandi gjaldsavtalu við bankan, so tú rindar rættstundis. Hetta merkir, at upphæddin, sum fellur til gjaldingar, verður skuldskrivað á kontuni á gjaldsdegnum. Hetta er vanligur máti at gjalda rokningar frá til dømis SEV, fyri olju, telefon, avdráttir til húsalán o.s.fr. Við hesum sleppur tú undan áminningargjaldi.

Bankarnir veita realkredittlán, tá ið tú keypir fastogn, umframt lán til onnur endamál, t.d. til bil. Bankin ger eina meting av fíggjarstøðu tíni, áðrenn lán verður játtað. Tað vanliga er, at bankin biður um skjalprógv fyri inntøku tína, t.d. lønarseðlarnar seinastu mánaðirnar. Rentan fyri kassakreditt er hægri enn fyri vanlig lán.

Bankatænastur fevna eisini um útskrivan av gjaldskorti og netbankatænastu, sum eisini er á enskum. Viðskiftafólk verða mæld til at nýta netbankaskipanina, tí bankar oftast krevja eykakostnað, tá ið tey verða avgreidd við kassan í bankanum.

Bankin kann geva tær góð ráð um tíni privatu fíggjarviðurskifti, og bankaráðgevarar eru fúsir at tosa við teg um tínar møguleikar sum kundi. Ein skal tó minnast til at bankar eru privatar vinnufyritøkur við egnum vinnuligum áhugamálum.

### HVUSSU STOVNI EG EINA KONTO?

- Tú mást hava føroyskt persónstal, p-tal, fyri at stovna kontu í føroyskum banka. Bankar hava fingið álagt við lóg at kanna eftir og fáa til vega avrit av løggildum samleikaprógvi frá hvørjum einstøkum persóni, ið stovnar kontu, t.d. pass ella koyrikort umframt skjal, ið prógvar bústað og føroyskt p-tal í Føroyum.
- Set teg í samband við bankan og fá fund í lag, so tit kunnu práta um, hvat slag av kontu tær tørvar. Tú mást fylla út og lata inn oyðiblað.

## TELEFON OG INTERNET

Mælt verður til, at tú kannar treytir, prísir og egnan tørv, tá ið tú teknar telefonhald til fartelefon, fastnet ella breiðband.

## FØROYSKA SJÓNVARPI

*Kringvarp Føroya* sendir føroyskar útvarps- og sjónvarpssendingar umframt danskar, norskar og aðrar útlendskar sendingar við donskum undirteksti.

Kringvarp Føroya verður fíggjað lutvíst við kringvarpsgjaldi og lutvíst við sjónvarps- og útvarpslýsingum, umframt eydnuspølum, V4 og Gekkinum.

## POSTTÆNASTA

Vanlig posttænasta í Føroyum er rikin av Posta. Sjey posthús eru kring oyggjarnar. Upp- og afturlatingartíðirnar eru ymiskar frá einum stað til annað. Tænastan fevnir um:

- Sølu av brævbjálvum
- Sølu av frímerkjum, postkortum og smáum pakkum
- Útbering av innskrivaðum brøvum
- Útbering av brøvum, postkortum og pakkum
- Útbering av altjóða svarkupongum og undangoldnari svarporto.
- Útbering av tryggjaðum brøvum
- Handfaran av innskrivaðum brøvum og pakkum

**Meiri kunning um upp- og afturlatingartíðir, posthús í tínum øki og tænastur hjá Posta fæst við at fara inn á heimasíðuna www.posta.fo ella við at ringja á høvuðsskrivstovuna, tlf. 346000.**

## KELIDJÓR

Hundar og kettur kunnu bert koma til landið, um eigarin hevur fastan bústað í Føroyum, ella um hann flytur til Føroya at búgva. Kelidjór hava ikki loyvi at vera í landinum styttri enn 3 mánaðir ella vera í Føroyum ávegis til annað land

Vanlig regla er, at tað er bannað at flyta inn fremmand og hættislig djór til Føroya.

Stríðshundar og aðrir hundar við ágangandi atburði hava ikki loyvi at koma inn í landið.

Hundur ella ketta, sum er innflutt til Føroya, skal lúka nógv krøv. Hesi (galdandi fyri hundar og kettur) eru í samsvari við ISO-standard, koppseting, viðgerð fyri parasittar, heilsukanning o.s.fr.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur eftirlit við djórainnflutningi til Føroya. Stovnurin kann sýta fyri, at ávíst dýr verður innflutt, um sjúkustøðan í upprunalandinum er óviss, ella um heilsuváttanin vantar ella er ófullfíggjað.

**Meiri fæst at vita við at seta seg í samband við Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, www.hfs.fo, tlf. 556400.**

### MINST TIL

Viðvíkjandi posttænastu:

- Títt fulla navn skal standa á postkassanum. Hevur tú børn, skal teirra fulla navn eisini standa á postkassanum
- Brøv frá føroysku myndugleikunum verða ikki send sum innskrivaður postur. Av tí sama skalt tú lata upp øll brøv, sum tú fært, tí tey kunnu fevna um týðandi upplýsingar og freistir, sum tú mást svara uppá

# FRÍTÍÐ

Í hesun partinum snýr tað seg um møguleikar innan frítíð og ítriv, mentanarkarmar í Føroyum, áhugabólkar og felagsskapir, og hvat er galdandi um ein ætlar sær á seiðaberg, á veiðu og í grind.



# HESIN PARTURIN FEVNIR UM


Áhugabólkar, ítróttafeløg og aðrir felagsskapir . . . . 74
Sjálvboðið arbeiði og limaskapur . . . . 74
Vælumtóktar ítróttagreinar . . . . 75
Almenn bókasøvn . . . . 75
Kvøldskúlin . . . . 75
Musikkskúlar og tónleikalív . . . . 76
Søvn og mentanarpallar . . . . 76
Tiltøk og hátíðardagar . . . . 77
ALMENNIR FRÍDAGAR . . . . 79
TÝÐANDI DAGAR OG FREISTIR . . . . 80
Út í náttúruna . . . . 81
Frítíðarfiskarí . . . . 82
Veiða . . . . 83

## ÁHUGABÓLKAR, ÍTRÓTTAFELØG OG AÐRIR FELAGSSKAPIR

Nógvir sjálvbodnir felagsskapir og nógv feløg eru í Føroyum.

Eitt nú trúarsamkomur, skótalið, kór, ítróttafeløg, hjálparfelagsskapir, fyri at nevna nøkur. Annað virksemi kann vera, ið ikki er á so skipaðum stigi, t.d. bindiklubbar, bingo og kortspæl. Set teg endiliga í samband við kommununa og fregnast um tað. Bindiklubbar eru óformliga skipaðir og ofta knýttir at skyldskapi, vinfólki, skúlafeløgum, men tó ikki altíð.

Almenn svimjing kann vera eitt tilboð í tíni bústaðarkommunu, og sum einstaklingur kanst tú eisini melda teg til regluliga venjing ella fasta tíð í ítróttahøllini í eitt ár, t.d. til badminton ella innandurafótbólt við vinfólki.

Flestu feløg krevja limagjald. Vanligt er, at tað er árligt ella hálvárligt, og flestu feløg ella bólkar eru almennir, t.e., at øll kunnu melda seg til og eru vælkomin.

Er ein ávís ítróttagrein ella virksemi, sum tú sóknast eftir, er tað altíð skilagott at byrja við at spyrja seg fyri í kommununi.

## SJÁLVBOÐIÐ ARBEIÐI OG LIMASKAPUR

Flestu felagsskapir eru skipaðir við sjálvbodnum arbeiði og fíggjaðir við limagjaldi, eydnuspæli og ymsari smásølu, tá ið stevnur og tiltøk eru. Tað hevur stórt virði fyri hvørt felagið og hvønn felagsskapin at hava virknar limir og sjálvboðin, ið hjálpa til við at skipa fyri og fáa pening til vega.

### *NGO-felagsskapir og aðrir*

Aðrir felagsskapir og áhugabólkar við samfelagsligum áhugamálum eru í Føroyum, og ber til hjá nýggjum limum og sjálvbodnum at tekna seg – til dømis Amnesty International og Reyði krossur. Politisku ungmannafeløgini taka eisini fegin móti nýggjum limum og sjálvbodnum.

### *Átrúnaður og trúarsamfeløg*

Mangir føroyingar eru limir í trúarsamkomum og trúarsamfeløgum. Nøkur fólk taka virknan lut í barna- og ungdómsarbeiði sum sunnudagsskúla, barnakórum og summarlegum. Eisini hjálpa sjálvboðin og parttíðarlønt við at skipa fyri møtum og tiltøkum bæði í fólkakirkjuni og í øðrum samkomum.

Aðrir føroyingar eru bara við í meiri rituellum høpi, eitt nú til dóp og ferming ella brúðarvígslu og jarðarferð, sum kirkjan ella trúarsamkoman stendur fyri. Átrúnaður hevur stóran leiklut í føroyskari mentan. Luthersk-evangeliska kirkjan er almenna kirkjan í Føroyum, men aðrar kirkjur og samkomur finnast eisini í landinum. Brøðrasamkoman, The Plymouth Brethren, er næststørsta trúarsamkoma. Harumframt hava t.d. katolikkar, adventistar, limir í Bahai-samkomuni og Jehova vitni, trúarsamfeløg í Føroyum.

Sambært grundlógini hava øll rætt at geva seg í samkomu at biðja eftir síni sannføring. Tað almenna stuðlar trúarsamfeløgum fíggjarliga.

## VÆLUMTÓKTAR ÍTRÓTTAGREINAR

Fótbóltur, handbóltur og fimleikur eru millum best umtóktu ítróttagreinar í Føroyum. Ítróttafeløg eru í næstan øllum stórum bygdum. Serliga børn og ung eru virkin í teimum væl umtóktu ítróttagreinunum.

Í Føroyum eru øll vælkomin at lima seg inn í ítróttafeløg, men ambitiónir, støði og krøv eru ymisk bæði frá einum ítróttafelag til annað og eisini millum ymsu ítróttagreinarnar. Ítróttavirksemið fyri børn er lagað til barnið, og øll børn sleppa upp í part, sama hvørjar ambitiónirnar eru, og hvør tørvurin er. Endamálið er, at børnini hugna sær og hava tað stuttligt saman við vinunum. Foreldur mugu gjalda limagjald fyri børnini, tá ið tey lima seg inn í eitt ítróttafelag.

Kappróður er tjóðarítrótt í Føroyum. Kappróður er á stevnum, sum verða hildnar í ymsum býum og bygdum í mai, juni og juli. Finaluróðurin er í Havn á ólavsøku, 28. juli.

Aðrar ítróttir eru svimjing, talv, bridge, dart, badminton, golf, judo og borðtennis.

## ALMENN BÓKASØVN

Hvør kommuna hevur alment bókasavn. Flestu almennu bókasøvn er skipað sum partur av skúlanum á staðnum. Bókasøvn eru til øll at brúka, og tú fært lánarakort, um tú hevur p-tal. Bøkur, sjónbond, fløgur og DVD-fløgur o.s.fr. er ókeypis at lána. Bókasøvnini eru ymisk, tá ið tað snýr seg um bøkur og bókmentaúrval, og hvørji mál eru umboðaði. Enskar bókmentir eru vanliga til at fáa fatur á, umframt føroyskar og danskar bókmentir. Bókasavnsvitjandi hava á flestu bókasøvnum eisini atgongd til teldu og internet. Bókasøvnini hava ymsar upplatingartíðir og ymiskt er, hvørjar tænastur eru tøkar frá eini kommunu til aðra.




## KVØLDSKÚLIN

Kvøldskúlin hevur undirvísing í ymsum lærugreinum – alt frá enskum máli til sveising. Tú meldar teg til eitt skeið, tær dámar, rindar skeiðsgjald og so kanst tú vænta tær eina áhugaverda og sosialt gevandi løtu, har tú møtir øðrum fólki við somu áhugamálum sum tú. Flestu skeið eru á føroyskum. Vilt tú vita meira um málskeiðið føroyskt fyri útlendingar, kanst tú eisini hyggja at partinum *Frálæra í føroyskum máli og mentan*.

Vanliga er tilmeldingar- og gjaldsfreist fyri tey ymsu skeiðini.

Sosiala samveran er týðandi partur av kvøldskúlaskeiðunum, og ein natúrligur liður í hesum er ein góður drekkamuður.

Ætlar tú tær á kvøldskúla, er skilagott at spyrja seg fyri hjá kommununi ella í skúlanum, tey duga at beina teg víðari til rætta viðkomandi.

## MUSIKKSKÚLAR OG TÓNLEIKALÍV

Tónleikagleðin í Føroyum er ómetaliga stór. At kalla hvørt høvi, ið býðst, verður sungið og spælt. Tað veri seg til høgtíðir, møti, gudstænastur, brúdleyp, jarðarferðir, stórar føðingardagar o.l.. Eisini eru mong ymisk kór, t.d. kvinnukór, manskór og blandað kór.

Føroyski musikkskúlin er væl umtóktur, og mong børn læra at spæla upp á ymisk ljóðføri. Musikkskúlin við sínum 10 skúlum kring landið er lutvíst alment og lutvíst kommunalt fíggjaður, og undirvísingin er á høgum yrkisligum stigi. Bíðilistar kunnu vera at sleppa á musikkskúlan í tíni kommunu.

## SØVN OG MENTANARPALLAR

***Norðurlandahúsið***

Norðurlandahúsið er mentanarstovnur undir Norðurlendska ráðharraráðnum, ið hevur til endamáls at stuðla og fremja norðurlendska og føroyska mentan. Norðurlandahúsið skipar fyri ørgrynnu av tiltøkum alt árið, t.d. konsertum, framsýningum og leikframførslum.

Meiri kunning fæst við at venda sær til: Norðurlandahúsið í Føroyum, www.nlh.fo

***Listasavnið***

Listasavnið í Havn hevur eina fasta framsýning av siðbundnari og modernaðari føroyskari list umframt skiftandi sersýningar við útlendskum eins væl og føroyskum listafólkum.

Meiri kunning fæst við at venda sær til: Listasavnið, www.art.fo

***Tjóðpallur Føroya***

Tjóðpallur Føroya heldur til á Gamla meiarínum mitt inni í Havnini. Leikhúsið setur upp føroyskar leikir umframt klassiskar og modernaðar leikir úr øðrum londum.

Meiri kunning fæst við at venda sær til: Tjóðleikhúsið, www.tjodpallur.fo (á føroyskum)

***Sjónleikarhúsið***

Sjónleikarhúsið hevur í mannaminni verið miðdepilin í einum ríkum og fjøltáttaðum mentanarlívi. Húsið er karmur um leikir og mentanarligar framførslur.

Meiri kunning fæst við at venda sær til: Sjónleikarhúsið, www.sjonleikarhusid.com (á føroyskum)

***Landsbókasavnið***

Landsbókasavnið er tjóðbókasavn í Føroyum. Landsbókasavnið savnar, skrásetir og varðveitir føroyskar bókmentir umframt bøkur og greinar, ið snúgva seg um Føroyar.

Meiri kunning fæst við at venda sær til: Føroya Landsbókasavn, www.flb.fo (á føroyskum)

## TILTØK OG HÁTÍÐARDAGAR

***Fornminnissavnið***

Fornminnissavnið er tjóðarsavn og bæði mentanar- og náttúrugripasavn. Sýningin fevnir um jarðfrøði, fornfrøði, fólkalívsfrøði og siðsøgu. Savnið fevnir eisini um útisavn í Gomlu Hoyvíkini nærhendis føstu sýningini.

Meiri kunning fæst við at venda sær til: Tjóðsavnið, www.savn.fo

***Reinsaríið***

Hetta staðið er partur av mentanartilboðnum í høvuðsstaðnum, og hvørja viku eru tónleikaframførslur av ymsum slag á skránni.

Meiri kunning fæst við at venda sær til: www.reinsariid.fo (bara á føroyskum)

Føroyingar hava eina rúgvu av vælumtóktum afturvendandi mentanartiltøkum, sum varpa ljós á føroyska mentan og list, fiskivinnu og aðrar tættir í samfelagnum.

Á hvørjum ári í juni er Mentanarnátt í Tórshavn. Skráin fyri tiltakið fær hópin av fólki út at vitja arbeiðspláss, sum hava serliga opið til hetta høvið, og ókeypis listasýningar hava opið alt kvøldið – bara fyri at nevna okkurt úr rúgvuni.

*Føroya Sjómannadagur* er árligt tiltak, sum er í Klaksvík miðjan august. Umframt at breiða út vitan um sjólívið og tað, ið er knýtt at tí við fyrilestrum og sýningum, so er talan eisini um familjutiltak, sum hevur stóra vatnkríggið á vágni í Klaksvík sum endabrest.

Sjógætisdagur verður hildin í Havn fyrst í mai. Borðreitt verður við alskyns feskum sjógæti og fiskaúrdráttum, bæði vanligum og forkunnugum. Alt fingið undir Føroyum.

Bindifestivalurin er gott høvi at kunna seg við føroyska bindimentan. Føroyingar og gestir uttan úr heimi savnast um binding og njóta samveruna. Bindifestivalurin hevur seinastu árini verið hilden um miðjan apríl.

***Bygdastevnur***

Bygdastevnur við ítrótti, konsertum, dansi, tivoli og øðrum til allar aldrar hava í mong ár verið hildnar kring oyggjarnar í summarhálvuni. Fyrsta stevnan er í Klaksvík, og aðrar, sum eru í juni, eru í Runavík, Sundalagnum og Suðuroy, og í juli eru tær í Fuglafirði, Vágum, á Skálafjørðinum og í Vestmanna. Kappróður er hæddarpunktið á hesum stevnum, serliga tá ið róðurin telur við í kappingini um føroyameistaraheitið.

***Ólavssøka***

Ólavssøka, tjóðarhátíð føroyinga, verður hildin í Havn 28. og 29. juli. Fólk úr øllum landinum koma til høvuðsstaðin at halda ólavsøku, sum bæði er ítrótta- og mentanarstevna við kappróðri, fótbóltsdystum, listasýningum, tónleiki og føroyskum dansi.

Ólavsøkan verður sett ólavsøkuaftan, 28. juli, tá ið ítróttafólk og reiðfólk ganga skrúðgongu oman á Vaglið, og

hátíðarløta verður hildin framman fyri løgtingshúsinum. Kringvarpið sendir vanliga frá ólavsøkusetanini.

Ólavsøkudag, 29. juli, kemur tingið saman eftir summarsteðgin, og ganga tey fólkavaldu saman við kirkjuligum leiðarum skrúðgongu av Vaglinum og oman í Dómkirkjuna til gudstænastu.

*Tónleikafestivalur*

Ein rúgva av festivalum og konsertum eru at velja í alla summarhálvuna. Bæði lokalir og tónleikarar uttan úr heimi framføra á føroyskum pallum.

**G! Festivalurin** er tónleikafestivalur við drúgvari skrá við navnframum føroyskum og altjóða tónleikanøvnum. Festivalurin er í Gøtu um miðjan juli.

Meiri kunning: www.gfestival.fo

**Summarfestivalurin** er stórur festivalur við heimligum tónleikarum og stórum útlendskum orkestrum. Festivalurin er í Klaksvík fyrst í august.

Meiri kunning: www.summarfestivalur.fo (á føroyskum)

**Summartónar** eru modernaður og klassiskur tónleikafestivalur við konsertskrá í kirkjum, á søvnum og á øðrum almennum støðum kring oyggjarnar. Summartónar eru í juni og juli kring alt landið.

Meiri kunning: www.composers.fo

**Sørvágs Country & Blues festivalur** er í Sørvági fyrst í juni.
Meiri kunning: www.country.fo

**Voxbotn** er dagsfestivalur, sum er í Havn síðst í juni.

Meiri kunning: www.voxbotn.fo

## ALMENNIR FRÍDAGAR

### JANUAR

1. januar
**Nýggjársdagur**

### FEBRUAR

### MARS / APRÍL

Falla millum mars og apríl

Pálmasunnudagur, skírisdagur, langafríggjadagur, páskadagur, 2. páskadagur – páskirnar eru millum mars og apríl

25. apríl
**Flaggdagur**
*Hálvur frídagur hjá summum og heilur frídagur hjá øðrum*

**Dýrabiðidagur**
*Føroyskur/danskur almennur frídagur fjórða fríggjadag eftir páskir*

**Hvítusunnudagur**
*Almennur frídagur sunnudagin, sum er næstur 50. degi eftir páskir*

**2. Hvítsunnudagur**
*Almennur frídagur*

**Kristi himmalsferðardagur**
*Almennur frídagur 40. dagin eftir páskir*

### MAI

1. mai
**Altjóða arbeiðaradagur**
*Frídagur hjá flest øllum*

### JUNI

5. juni
**Grundlógardagur**
*Hálvur frídagur hjá teimum flestu*

### JULI

28. Juli
**Ólavsøkuaftan**

29. Juli
**Ólavsøka**

### AUGUST

### SEPTEMBUR

### OKTOBUR

### NOVEMBUR

### DESEMBUR

24. desembur
**Jólaaftan**

25. desembur
**Jóladagur**

26. desembur
**2. jóladagur**

31. desembur
**Nýggjársaftan**

## TÝÐANDI DAGAR OG FREISTIR

### Januar

| | |
|---|---|
| Hálvárligt vekt- ella umhvørvisgjald | *Umleið 2. januar* |
| Børn, sum hava skúlaaldur, verða skrivað inn. Set teg í samband við kommununa ella skúlaumsitingina. | *Í januar verður lýst í útvarpinum, nær og hvar innskrivingin verður* |

### Mars

| | |
|---|---|
| Grækarismessa – tjóðfuglurin, tjaldrið, kemur aftur og við honum eisini várið. | *12. mars* |
| Evstafreist at søkja inn á miðnámsskúla | *15. mars* |
| Skúlarnir hava páskafrí | *Á páskum* |
| Evstafreist at søkja inn á hægri útbúgving (Kvota 2, Danmark) | *15. mars* |
| Summartíð byrjar | *Millum 25. og 31. mars* |

### Apríl

| | |
|---|---|
| Fyri 1. apríl eru summardekk bert loyvd, um koyrilíkindini er til tað | *1. april* |
| Evstafreist at søkja inn á hægri útbúgving (Kvota 2, Føroyar) | *15. april* |
| Lembingin | *Mánaðarskiftið apríl-mai* |

### Mai

| | |
|---|---|
| Píkadekk eru ikki loyvd eftir 1. mai | *1. mai* |
| Evstafreist at lata inn sjálvuppgávuna | *Umleið 1. mei* |
| Mammudagur | *Annar sunnudagur í mai* |
| Frítíðarlønin verður útgoldin | *2. mai* |
| Hin fyrsta av summarstevnunum, Norðoyarstevna í Klaksvík | *Mánaðarskiftið mai-juni* |
| Pápadagur | *5. juni* |

### Juni

| | |
|---|---|
| Skúlaárið endar | *Seinast í juni* |

### Juli

| | |
|---|---|
| Evstafreist at søkja inn á hægri útbúgving (Kvota 1, Føroyar) | *1. juli* |
| Evstafreist at søkja inn á hægri útbúgving (Kvota 1, Danmark) | *5. juli* |
| Hálvárligt vekt- ella umhvørvisgjald | *Umleið 1. juli* |
| Ólavsøka | *28. – 29. juli* |

### August

| | |
|---|---|
| Skúlaárið byrjar | *Um miðjan august* |

### Oktobur

| | |
|---|---|
| Píkadekk loyvd | *15. oktobur* |
| Heystfrítíð | *Um miðjan oktobur* |
| Summartíð endar | *Millum 25. og 30. oktobur* |
| Fjøllini verða gingin, og seyðurin flettur | *Í oktobur* |

### Novembur

| | |
|---|---|
| Harutíðin byrjar | *2. novembur* |

### Desembur

| | |
|---|---|
| Summardekk bert loyvd, um koyrilíkindini eru til tað. Vetrardekk og píkadekk eru kravd. | *1. desembur* |
| Harutíðin endar | *31. desembur* |

## ÚT Í NÁTTÚRUNA

Gongutúrar í fjøllunum, fram við bakkanum og í fjøruni eru altíð ein møguleiki. Tað eru sera fáar avmarkingar. Gongutúrar í fjøllunum í Føroyum eru vorðnir alsamt betur umtóktir.

Áðrenn vegir vóru asfalteraðir og aðrar ábøtur av samferðslukervinum vórðu gjørdar, var tað at ganga í fjøllunum og millum bygdir næstan einasta farleið. Postverkið, læknar, prestar og onnur við brúktu regluliga fjallagøturnar, ið knýttu bygdirnar saman. Við fjallagøturnar standa varðar – ein arvur frá fornari tíð, ið verða brúktir sum vegvísari í mjørka. Fert tú ein túr í hagan í dag, verður framvegis rátt til at brúka fjallagøturnar heldur enn at klíva um stik ella hegn.

Tó eru avmarkingar, og strangari reglur eru fyri eitt nú dyrkaða jørð, har seyður og neyt eru innistikað og onnur innigird støð. Har ið stik er, eru ofta portur, sum kunnu brúkast. Minst til, at tað er ólógligt at ganga á privatari ogn, og hugsa um, at alt gras er ætlað til fóður.

At ganga í føroysku náttúruni krevur fyrivarni. Sumt er meiri natúrligt enn annað. Her eru nøkur fyrivarni at taka:

- Sært tú gomlu bygdagøturnar, skulu tær brúkast heldur enn at klatra um stik.
- Fyrireika túrin, áðrenn farið verður.
- Kanna altíð veðurvánirnar. Gakk ikki í fjøllunum, um tað er mjørkakent, og minst til, at mjørki brádliga kann koma á teg.
- Spyr staðkend fólk, hvar ráðiligt er at ganga, og far ikki aðrastaðni.
- Órógva ikki fugl og seyð. Latið aftur øll portur.
- Gevið gætur, at harutíð er frá 2. novembur til 31. desembur.

Tú kanst eisini gerast limur í einum gongufelag. Hvør túrur kostar ofta eitt gjald, ella verður árligt limagjald goldið.

**Nærri kunning og árliga gonguskráin hjá Gongufelagnum í Tórshavn fæst á: www.Visittorshavn.fo.**

Kemur tú í trupulleikar, tá ið tú ert gongutúr, - tú ert kanska vilst/-ur ella ert komin til skaða, ring so eftir hjálp á 1-1-2 (Bráðhjálp og neyðarkall). Gevið gætur, at fartelefonnetið røkkur ikki í øllum fjøllum og langt frá búseting.

## FRÍTÍÐARFISKARÍ

***Á landi – mola, seiðabergi ella líknandi***

At fiska á seiðabergi ella stutt úr landi stendur vanliga øllum frítt. Tú skalt bara halda teg uttan fyri tey øki, sum eru merkt til ídnaðarvirksemi, og síggja til, at tú ikki órógvar virksemið á kaiini.

***Í lítlum báti***

Fert tú á flot í lítlum báti, mást tú tryggja tær, at øll neyðug trygdarútgerð er umborð, og at øll eru í bjargingarvesti.

***Tá ið tú fiskar í vøtnum og áum***

Tá ið tú fiskar laks og síl í áum og vøtnum, er viðhvørt neyðugt við fiskiloyvi. Tað er sostatt ikki altíð ókeypis, serliga um vatnið er privat ogn. Reglur eru eisini galdandi fyri, hvar fiskað verður. Tað er tískil skilagott, áðrenn tú leggur túrin til rættis, at spyrja seg fyri á staðnum, t.d. hjá kommununi ella Føroya Sílaveiðufelag. Tey vita at siga, hvar fiskiloyvi fáast til keyps, hvar og nær fiskað verður, og tey kunnu vísa á serliga góð støð.

Reglur og ásetingar eru, sum tú mást hava í huga. Tú kanst seta teg inn í vanligu reglurnar á heimasíðuni hjá Føroya Sílaveiðufelag, www.laks.fo (eisini á enskum).



## VEIÐA

*Haruveiða*

Harutíðin er frá 2. novembur til 31. desembur. Hann, ið eigur hagan, er eisini hann, ið eigur rættindini at skjóta haru. Í flestu pørtum av landinum ber til at skjóta haru, og veiðirættindini fáast við at "keypa haruhagan" frá eigaranum.

*Fuglaveiða*

Fuglur verður fyri ein part veiddur í oyggjunum annaðhvørt við at skjóta ella fara á fleyg. Lógin bannar veiðu sunnu- og halgidagar. **Set teg í samband við løgregluna um veiðutíð, hvørji sløg eru loyvd at veiða og aðrar treytir; www. politi.fo – tlf. 351448.**

*Grindadráp*

Grindadráp hevur altíð verið ein máti at tryggja sær føði fyri at yvirliva á fjarskotnum, lítlum samfelag í Norðurhøvum.

Grindarakstur í Føroyum hevur sum endamál at fáa mat til høldar og kann koma fyri nær sum helst á árinum. Rakstur, landgongd, dráp og grindabýti er greitt skipað við lóg og reglum. Grindin verður skift millum teirra, ið eru við í drápinum og bygdarsamfelagið.

Tá ið ein grind hevur lagt beinini, verður hon skift í partar. Sýslumaðurin ger grindabýtið upp, og seðlar koma út, sum siga, hvussu nógv spik og tvøst er til hvønn.

Tvøstið og spikið verður býtt millum teirra, ið hava verið við í drápinum, og er býtið í samsvari við, hvussu mangir hvalir eru dripnir. Vanligt er, at fólkið, ið býr á staðnum, har grindin er dripin, eisini fær part, men tað er alt eftir, hvussu stór grindin er.

Tá ið seðlarnir eru komnir út, fara fólk til hvalin, tey hava fingið, at skera upp. Ofta eru fleiri fólk um ein hval. Um tú vilt hava part ella vita meiri um ávís viðurskifti, skalt tú seta teg í samband við sýslumannin.

# FAKFELØG OG ARBEIÐSGEVARAFELØG

**Yvirlit – nøkur føroysk fakfeløg og abeiðsgevarafeløg:**

Havnar Arbeiðsmannafelag (Tórshavn General Workers' Union)

Havnar Arbeiðskvinnufelag (Tórshavn Women Workers' Union)

Føroya Arbeiðarafelagð (Faroese General Workers` Union)

Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag (Klaksvík General Workers` Union)

Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag (Klaksvík Women Workers` Union)

S & K-Felagið (Office and Retail Workers` Union)

Føroya Handverkarafelag (Confederation of Faroese Unions for Craftsmen)

Landsfelag Handverkaranna (Faroese National Confederation of Craftsmen`s Unions)

Føroya Fiskimannafelag (The Faroese Fishermen`s Union)

Samtak (Umbrella organisation for several workers` unions, www.samtak.fo)

**Onnur fakfeløg:**

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar (Nurses)

Heilsurøktarafelagið (Health carers assistants in the public health sector, e.g. the hospitals.)

Heilsuhjálparafelag Føroya (Health care assistants in retirement homes, institutions or private homes.)

Starvsmannafelagið (Salaried professionals in different positions, journalists, secretaries and others)

Føroya Lærarafelag (Teachers in Faroese public primary and lower secondary school)

Føroya Pedagogfelag (Social educators, in e.g. day care centres)
Akademikarafelag Føroya (Academics)

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya (Economists, legal experts and lawyers)

**Arbeiðsgevarafeløgini í privata geiranum hava skipað seg í samtøkufelagsskapin: *Føroya Arbeiðsgevarafelag***

Tá ið sáttmálasamráðingar eru við fakfeløgini á føroyska arbeiðsmarknaðinum, er parturin vegna almenna geiran annaðhvørt Kommunusamskipan Føroya ella Lønardeildin hjá Fíggjarmálaráðnum.

**Onnur arbeiðsgevarafeløg í privata geiranum eru:**

Føroya Handverksmeistarafelag (Carpentry)

Reiðarafelagið fyri Farmaskip (Shipping)

Føroya Prentsmiðjufelag (Printing houses)

Arbeiðsgevarafelagið hjá fíggjarstovnum í Føroyum (Banking)

## TULKATÆNASTA Í FØROYUM

Fleiri mál verða tulkað í Føroyum. Vanliga í rættinum og hjá løgregluni, viðhvørt eisini á løgreglustøðini ella á Landssjúkrahúsinum í Havn.

Tað eru tó ikki so nógvir tulkar til staðar í Føroyum. Og tørvurin kann vera eftir tulki, ið ikki er í landinum. Í teimum førunum ber til at fáa fatur á tulkatænastu umvegis telesamskifti á netinum, t.d. í rættinum, har tulkað verður til enskt ella til danskt.

Ein annar týðandi táttur í hesum sambandi er, at tulkurin kanska ikki er útbúgvin ella góðkendur at loysa eina ávísa tulkauppgávu, ella eisini kann evnið vera viðkvæmt. Í slíkum føri kann tulkatænasta úr Danmark ella aðrastaðni verða nýtt, eisini umvegis internetið.

***Viðmæld tulkatænasta úr útlandinum***

Útlendingastovan veit um niðanfyrinevndu tænastur, sum eru tøkar gjøgnum netið ella telesamskifti. Tænasturnar verða nýttar í norðurlendsku grannalondunum og veita regluliga, fakliga tænastu til eitt nú dómstól og sjúkrahús.

- **Language Line, +800 752-6096, www.languageline.com (USA)**
- **Social-Medicinsk Tolkeservice, +45 7020 9012, www.tolkeservice.dk (Denmark)**
- **TolkeService (Dansk Flygtningehjælps Tolkeservice), +45 3373 5335, www.tolkeservice.flygtning.dk (Denmark)**

Mælt verður til, at allir stovnar, sum nýta tulk, tryggja sær frammanundan, at tulkurin er góðkendur og skikkaður til uppgávuna – um evnið er viðkvæmt, verður altíð mælt til at fáa fatur á útbúnum og royndum tulki til uppgávuna. Útlendingastovan er til reiðar at hjálpa einstaklingum og stovnum í málum, sum snúgva seg um tulking. Um tú hevur spurningar viðvíkjandi tulking, kanst tú seta teg í samband við Útlendingastovuna. Málini, umframt tey norðurlendsku, sum hava verið tulkað í Føroyum við hjástøddum tulki eru hesi:

| | | |
|---|---|---|
| **Enskt** | **Polskt** | **Serbiskt** |
| **Franskt** | **Spanskt** | |
| **Týskt** | **Russiskt** | |

Einstaklingar, ið búgva í Føroyum, sum tosa hesi mál, eru eisini fúsir at hjálpa við tulking: Italskt, portugisiskt, arabiskt, filipinskt (tagalog og ilocana) og thai.

***Rættindi – lógarásetingar***

• Løgtingslóg um almenna heilsutrygd, § 3,4 – Public Health Insurance Act.

• Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om patienters retstilling, § 7 – The Patient's Rights Act for the Faroe Islands.

**Báðar nevndu lógir eru at finna á almennu heimasíðuni www.logir.fo.**

## GÓÐ RÁÐ

*Tulkatænastan hjá Dansk Flygtningehjælp vísir til hesi hentu ráð, tá ið tulkað verður:*

**Undan samrøðu:**

- Tryggja tær, at tú bíleggur rætta tulkin til rætta málið ella dialektina.
- Tryggja tær, at tú setur nóg mikið av tíð av. Ein samrøða, ið verður tulkað, kann taka tvífalt so langa tíð sum vanlig samrøða.
- Kunna tulkin frammanundan um innihaldið í samrøðuni ella viðtalinum.
- Hugsa um, hvar og hvussu tulkur og aðrir luttakarar í samrøðuni sita, soleiðis at samrøðan kann ganga so lættliga sum gjørligt. Og um tú nýtir telesamskifti, skalt tú tryggja tær, at alt tað tøkniliga er í lagi.
- Tryggja tær, at tað er tú, sum stílar fyri samrøðuni og ikki tulkurin.

**Undir samrøðu:**

- Tak stig til at brúkari, ið hevur tørv á tulking, og tulkur fáa heilsað uppá hvønn annan.
- Greið frá leiklutinum hjá tulkinum, eisini við at nýta tulkin, og kunna um trúnaðarskylduna, sum tulkurin hevur.
- Tosa beinleiðis við brúkaran/klientin, ikki við tulkin.
- Gev kropsmáli brúkarans/klientsins gætur.
- Tryggja tær, at tú orðar teg týðiliga og halt teg frá truplum yrkisorðum.
- Brúka stuttar, neyvar og einfaldar setningar.
- Vænta, at tulkurin tulkar alt, sum hvør einstakur sigur undir samrøðuni.

**Til langar samrøður:**

Minst til, at tað kann vera strævið at tulka, serliga um samrøðan er long. Hav ein ella tveir steðgir undir samrøðuni.

**Eftir samrøðu:**

- Øll skulu fara úr rúminum samstundis fyri at varðveita álitið partanna millum.
- Hugsa um, hvørt tað er neyðugt ella ikki, at hava eitt prát við tulkin, um evnið er trupult og viðkvæmt.
- Hugsa um, um tú skal bíleggja sama tulk til eina aðru ferð.

## HJÁLP OG FRÁBOÐAN

**Neyðstøða**

Ring 1-1-2 eftir bráðhjálp: Løgregla, sløkkilið ella sjúkrabilur

**Løgregla**

Tlf. 351448 ella 1-1-4

**Landssjúkrahúsið**

J.C. Svabosgøta 41-49, 100 Tórshavn

Tlf. 304500

**Læknavaktin**

Tlf. 1870

Sí eisini síðu 44.

## HENTAR TÆNASTUR

### KVINNUHÚSIÐ

Kvinnuhúsið hjálpir kvinnum, ið eru fyri harðskapi í heiminum. Kvinnuhúsið fær eisini veitt kvinnum og børnum teirra fyribils innivist, tá ið talan er um kreppustøðu.

**www.kvinnuhusid.fo**
**Tlf.: 317200**

### RÆTTARJÁLPIN

Ráðgevararnir á Rættarhjálpini fáa hjálpt í fleiri málum, t.d. tá ið kært verður um avgerð hjá almennu myndugleikunum í sambandi við hjúnaskilnað, sundurlesing, foreldramyndugleika og samverurætt, brúkaralóg, skuldarsanering, arv og testamenti.

**Rættarhjálp Føroya**
**Gongin 20, 110 Tórshavn**
**www.raettarhjalpin.fo, tlf. 319823**

### BARNABATI
*- TÚ OG EG RÁÐGEVINGIN*

Barnabati umsitur hjálparlinjuna Tú-og-eg Ráðgevingin, sum er ætlað børnum. Henda tænasta er tøk umvegis telefon, sms-boð og sum kjattprát. Ert tú barn, kanst tú nýta hesa tænastu, sama hvørjar trupulleikar tú skuldi havt. Tænastan er ókeypis, og børn kunnu skriva ella ringja. Tú kann ringja uttan at siga navn og tosa í trúnaði. Hjálparlinjan er opin tvey kvøld um vikuna.

**www.barnabati.fo**
**Tú-og-eg Ráðgevingin**
**Tlf.: 807010**

## TAKS

TAKS er føroyska skattavaldið, sum er almennur stovnur undir Fíggjarmálaráðnum. 120 fólk starvast hjá TAKS, sum hevur deildir í Klaksvík, Saltangará, Havn, á Tvøroyri og á flogvøllinum í Vágum.
Høvuðsuppgávan hjá TAKS er at tryggja landinum inntøkur, at fyrisita skatting og toll, umframt at byrgja fyri ólógligum inn- og útflutningi. TAKS umsitur lógir um skatt, toll og onnur avgjøld. TAKS umsitur eisini ávísar almennar veitingar og almenn ískoyti, eitt nú barsilspening, ferðastuðul, rentufrádrátt og frítíðarløn.

**Samband**
**Telefon: 352600**
**Internet: www.taks.fo**

## HEILSUTRYGD

Heilsutrygd sær til, at lógin um heilsutrygd verður hildin. Heilsutrygd umsitur soleiðis veitingar og ágóðar, sum fevna um kostnaðin á flestu grundleggjandi heilsutænastum í Føroyum.
Heilsuveitingar verða fíggjaðar av landinum og einum ásettum gjaldi frá øllum myndugum borgarum í landinum. Heilsutrygd fevnir um vanliga læknaliga viðgerð og serviðgerðir, og letur eisini ískoyti til heilivág, tannrøkt og aðra serviðgerð, t.d. fysioterapi, psykoterapi og fótarøkt. Aðrar tænastur, sum Heilsutrygd tekur sær av, eru ferðaútreiðslur í sambandi við viðgerð og gravarhjálp.

**Samband**
**Telefon: 614000**
**Internet: www.heilsutrygd.fo**

## AKSTOVAN

Akstovan hevur ábyrgd av bilskoðan og koyrikorti. Høvuðsmálið hjá Akstovuni er at virka fyri størri trygd í ferðsluni. Umframt at skipa fyri koyriroynd, útinna bilsýn og veita øðrum myndugleikum hjálp í ferðslumálum, sum snúgva seg um ferðslu, so hevur Akstovan eftirlit við bilaskrásetingini, dátugrunninum fyri koyrikortskrásetingar og ymsu gjøldum, ið viðvíkja akførum.

**Samband**
**Telefon: 350400**
**Internet: www.akstovan.fo**

## GIGNI

Gigni veitir børnum, ungum og foreldrum teirra hjálp og ráðgeving í málum, sum snúgva seg um heilsu og trivnað hjá børnum, til tey fara úr fólkaskúlanum. Gigni kemur á regluliga heimavitjan hjá pinkubarnafamiljum í Føroyum. Høvuðsendamálið er at fremja heilsu, fyribyrgja sjúku, styrkja og menna foreldraførleikan og skjótast gjørligt gera vart við, um barn ikki trívist og mennist, sum tað skal.
Heilsufrøðingar hjá Gigni eru á øllum skúlum.
Gigni hevur eisini skikkað fólk at veita ráðgeving í fosturtøkumálum. Gigni veitir øllum kvinnum, sum hava spurningar um fosturtøku ráð og leiðbeining. Henda tænasta fæst við at ringja ella senda teldupost.

**Samband**
**Telefon: 562300**
**Internet: www.gigni.fo (Gigni@gigni.fo)**

## BARNAVERNDARSTOVA FØROYA

Barnaverndartænastan er skift í 8 øki hvørt við sínari skrivstovu og Barnaverndarstovu Føroya, sum virkar oman fyri barnaverndartænastur og høvuðsbarnavernd.

Høvuðsuppgávan hjá Barnaverndartænastuni í Føroyum er at stuðla foreldrunum, so at tey fáa givið børnum sínum best møguliga uppaling.

**Samband**
**Telefon: 302480**
**Internet: www.bvs.fo**

## STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landsins reka buss- og ferjusambandi. Høvuðsuppgáva teirra er at knýta oyggjar og bygdir saman - bæði á meginøkinum og til útoyggjarnar. Á leið 160 fólk arbeiða hjá Strandfaraskipum. Flotin telur 7 ferjur og 30 bussar. Tyrlutænastuna rekur Atlantic Airways (www.atlantic.fo).

**Samband**
**Telefon: Høvuðsskrivstovan, tlf. 343000**
**– Rutuupplýsing, tlf. 343030**
**Internet: www.ssl.fo**

## LANDSVERK

Høvuðsskrivstovan hjá Landsverki er í Havn. Landsverk rekur 8 vegastøðir um alt landið, umframt tríggjar smiðjur, eitt asfaltvirki, fýra grótbrot, eina asfaltgoymslu og eina saltgoymslu. Landsverk hevur eftirlit við vegum, havnum og byggivirksemi. Stovnurin veitir ráðgeving, leggur til rættis, útinnir, rekur og røkir landsvegir, havnir, bygningar, tyrlupallar og økið kring flogvøllin.

**Samband**
**Telefon: 340800**
**Internet: www.landsverk.fo**

## ALMANNAVERKIÐ

Almannaverkið umsitur fleir vælferðarskipanir. Almannaverkið er við sínum 750 starvsfólkum hornasteinurin í føroyska vælferðarsamfelagnum. Almannaverkið veitir tænastur sum: ráðgeving um skyldur og rættindi hjá tí einstaka, fólkapensjón til eini 8.000 fólk, tænastur til fólk við serligum tørvi, sum annaðhvørt búgva heima ella á stovni, um skipanina við sjúkradagpeningi og familjuískoyti til familjur við lágari inntøku.

**Samband**
**Telefon: 360000**
**Internet: www.av.fo**

## LØGREGLAN

Løgreglan í Føroyum er undir danska løgmálaráðnum og virkar fyri friði, trygd, lóg og landaskili. Høvuðsvirksemið er:

- Fyribyrgja, steðga, kanna og rættarsøkja í sambandi við lógarbrot
- Samstarva við onnur – veita øðrum stuðul og hjálp innan fyri teir karmar, sum løgreglan, ákærumyndugleikin og sýslumenninir hava.

Seks løgreglustøðir eru í Føroyum – í Klaksvík, Runavík, Tórshavn, Miðvági, á Sandi og Tvøroyri.

Ákærumyndugleikin í Føroyum telur tíggju starvsfólk.

Rætturin í Føroyum hoyrir eisini undir danskan myndugleika. Høvuðsskrivstovan er í Havn, men ein onnur skrivstova er í Suðuroy. Eini 25 fólk arbeiða við rættin.

**Samband**
**Telefon: 351448**
**Internet: www.politi.fo**

## BARNANNA UMBOÐSMAÐUR

Barnanna umboðsmaður er stovnur, sum vaksin og børn kunnu venda sær til, um tey halda, at almennur stovnur ella myndugleiki ikki hevur givið barni nøktandi viðferð. Tú kanst til dømis leggja fram kæru um skúla, sum ikki hevur sýnt vilja at hjálpa barni tínum. Um skrivstovan hjá Barnanna umboðsmanni ikki fær hjálpt tær eru tey helst før fyri at seta teg í samband við onkran annan, sum kann hjálpa.

**Samband**
**Telefon: 358500**
**Internet: www.bum.fo**

## ORÐALISTI Í STAVRAÐI


### A

Apotek; 42

Arbeiðsloyvi; 12

Arbeiðssáttmáli; 27

At læra seg føroyskt; 20

### A

Ábyrgdartrygging; 65

### B

Bankatænastur; 70

Barnaansing; 53

Barnabati; 59

Barnanna Umboðsmaður; 59

Barnarættindasáttmálin; 6

Barnaverndarstovan; 57

Barnaverndartænastan; 57

Barsilspeningur; 50

Barsilsskipanin; 30, 50

Billán; 62

Biltrygging; 65

Bindifestivalurin; 77

Bindiklubbar; 74

Bókasøvn; 75

Borgaragluggin; 33

Bussar og ferjur; 69

Bygdastevnur; 77

### C

CEDAW-sáttmálin; 6

### D

Dagstovnur; 53

Danska grundlógin; 7, 74

### F

Fakfeløg; 26, 84

Familjusameining; 12

Familjutrupulleikar; 57

Ferðslukanningar; 66

Føðingar; 46

Frádráttir; 33

Frí vegna sjúku; 30

Frídagar; 26, 79

Fríplláss; 53

Fuglaveiða; 83

Fysioterapi; 42

### G

Gigni; 45

Gravarhjálp; 88

Grindadráp; 83

### H

Haruveiða; 83

Heilivágur; 42

Heilsufrøðingar á skúlum; 46

Heilsutrygd; 42

Hjúnaskilnaður; 59

Húsatryggingar; 16

### I

Ítróttagreinar í Føroyum; 75

### K

Kelidjór; 71

Keypa egnan bústað; 15

Kollektivu arbeiðssáttmálarnir; 26

Kommunalar tænastur; 16

Kommunuskattur; 33

Koppseting; 46

Koyrikort; 62

Kvinnuhúsið; 9, 59

Kvøldskúlin; 20, 75

### L

Læknavaktin; 44

Læknaváttan; 47

Landsskattur; 33

Leiga bústað; 15

Lektiuhjálp; 56

Lønarseðil; 27

Løn; 27

### M

Miðnámsútbúgving; 54

**N**

Neyðstøða; 86

Neyðtelefonummarið; 44

**O**

Ólavsøka; 77

**P**

Posttænastan; 71

P-tal – Persónstal; 7

**R**

Rættarhjálpin; 9, 87

Realkredittlán; 70

Rentustuðul; 34

Ruskinnsavning; 16

**S**

Sálarheilsutænastur; 46

Samvera(við barn); 59

Seiðaberg; 82

Sjálvstøðug vinnurekandi; 39

Sjálvuppgáva; 34

Skattur; 34

Skráseta bilin; 64

Summardekk; 65

**T**

Tilflyting; 6

Trygd til arbeiðis; 32

Tulkatænasta; 23, 85

Tulking; 23

Tunnilsgjald; 69

**U**

Uppsagnir; 30

Útflutningur; 26

**V**

Val; 8

Varandi uppihaldsloyvi; 12

Vetrardekk; 66

**Æ**

Ættleiðing; 31, 51

# NÝKOMIN TIL FØROYA

**Ert tú stutt síðan flutt/ur til Føroya? Hevur tú starvsfelagar, vinir og onnur, sum tú kundi hugsað tær at kunna um lívið í Føroyum?**
**Í hesum bóklingi finnur tú hentar upplýsingar um almennar stovnar og tænastur annars.**

- Er tað neyðugt hjá mær at fáa nýtt koyrikort?
- Hvar fái eg undivísing í føroyskum?
- Nær skulu børnini í skúla?
- Hvat hendir, um eg leggist sjúk/ur?
- Hvussu eru heilsutænasturnar skipaðar í Føroyum?
- Hvussu stovni eg bankakontu?

***Nýkomin til Føroya*** **svarar hesum og mongum øðrum spurningum.**

ÚTLENDINGASTOVAN IMMIGRATION OFFICE

Útlendingastovan – The Faroese Immigration Office www.immigration.fo

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERK
Svanamerktur prentlutur 541 705